# GERÐABÓK

**Dato:** 24. mars 2022 **Kl**. 16:00
**Stað:** Býráðssalurin
**Málsnr:** 54/22-77/22

**FUNDARLEIÐARI:**
Heðin Mortensen

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Annfinn Brekkstein
Kári Johansen
Kristianna Winther Poulsen
Súna Mørk
Bjørg Dam
Elsa Berg
Jákup Dam
Gunvør Balle
Annika Olsen
Birgir Nielsen
Ruth Vang
Bergur Robert Dam Jensen

**LUTTÓKU EISINI:**
Bogi Jacobsen
Eyðfríð Jacobsen
Eyðna Justinussen
Barbara Vang

**LUTTÓKU IKKI:**
Tróndur Sigurðsson

**SKRIVARI:**
Bjørgfríð Ludvig

**PROTOKOLLFØRARI:**
Magnus Dam

**Innihaldsyvirlit** **Síða**

**Til viðgerðar**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 54/22 | 22/01345-2 | Tróndur Sigurðsson bert frá at møta á býráðsfundi 24. mars 2022 | 259 |
| 55/22 | 22/00011-1 | Mál beind í nevndir 2022 | 260 |
| 56/22 | 21/05095-2 | Keyp av lendi av matr.nr. 1083aa, at leggja saman við matr.nr. 1083n. | 262 |
| 57/22 | 22/00511-1 | Nýggj dagstovnapláss 2022 | 264 |
| 58/22 | 16/01316-10 | Vegna nevndina í Bridgehúsinum Pól E. Egholm : Umbøn um fund viðvíkjandi Brigdehúsinum í Gundadali | 266 |
| 59/22 | 16/02772-1 | 06-12 Málslýsing - Hoyvíkar skúli dagføring | 275 |
| 60/22 | 18/00992-1 | Lendisgøtur | 279 |
| 61/22 | 21/01777-1 | Útstykking oman fyri Argjahamar | 288 |
| 62/22 | 20/00622-1 | Heildarætlan fyri Karlamagnusarbreyt | 293 |
| 63/22 | 22/00349-1 | Broyting av almennu byggisamtyktini fyri part av matr. nr. 138a, Stórubrekka og 138fe, Dalurin Langi. | 301 |
| 64/22 | 14/00417-16 | Fimleikahøll til skúlan í Kaldbak | 303 |
| 65/22 | 21/04997-6 | Umsókn um keyp av kommunalari ogn og marknaumskipan á matr.nr. 1457a. | 311 |
| 66/22 | 21/04393-9 | Umsókn um byggiloyvi til sambýli á matr. nr. 4cl og 4bs, Argir | 314 |
| 67/22 | 21/01446-16 | Fyrispurningur um at byggja íbúðir á matr. nr. 1467e, SMÆRUGØTA, Tórshavn | 316 |
| 68/22 | 17/03154-1 | Orkupolitikkur | 319 |
| 69/22 | 21/02467-1 | Bussleiðin - undangóðkenning / prækvalifikation av bjóðarum til komandi útbjóðing og gerð av útboðstilfari til rakstur av komandi bussleið | 327 |
| 70/22 | 21/02538-2 | Áheitan um yvirtøku av vegi matr. nr. 781n, Mariugøta 5 , Tórshavn | 334 |
| 71/22 | 22/00319-2 | Parkeringsviðurskifti vid fótbóltsvøllin í Vika á Argjum | 336 |
| 72/22 | 18/03468-1 | Skipan av Stórutjørn | 338 |
| 73/22 | 22/00751-1 | Ársroknskapur og granskoðanarprotokoll fyri 2021 hjá Westward Ho | 348 |
| 74/22 | 22/00009-1 | Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2022 | 350 |

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>24. mars 2022 | Blað nr.: 258 |
| | Formansins merki: |


| | | | |
|---|---|---|---|
| 75/22 | 22/01221-1 | Heildarætlan fyri dagstovnaøkið | 352 |
| 76/22 | 22/00358-80 | Argja kirkja : Ætlan um nýggjan kirkjubygning á Argjum - matr. nr. 56a og 115, Argir - broyting av byggisamtyktini (2006-0769) | 353 |
| 77/22 | 21/01228-1 | Nevndarval til nevndina í P/F Visit Faroe Islands | 357 |

**Til viðgerðar**

## 54/22 Tróndur Sigurðsson bert frá at møta á býráðsfundi 24. mars 2022

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 24.03.2022 | 54/22 | 22/01345-2 |

**Málslýsing**
Tróndur Sigurðsson hevur boðað frá, at honum berst frá at møta til býráðsfundin.

Sambært § 18, stk. 3, í kommunustýrislógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Bergur Robert Dam Jensen, eru loknar.

**Býráðsfundur 24. mars 2022:** Bergur Robert Dam Jensen tók sæti í býráðnum.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>24. mars 2022 | Blað nr.: 260 |
| | Formansins merki: |

# 55/22 Mál beind í nevndir 2022

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 27.01.2022 | 3/22 | 22/00011-1 |
| 2 Býráðsfundur | 24.02.2022 | 25/22 | 22/00011-1 |
| 3 Býráðsfundur | 24.03.2022 | 55/22 | 22/00011-1 |

**Upprunin til málið**

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**

**Býráðsfundur 27. januar 2022:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 24. februar 2022:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 24. mars 2022:** Tikið til eftirtektar.

# 56/22 Keyp av lendi av matr.nr. 1083aa, at leggja saman við matr.nr. 1083n.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.03.2022 | 54/22 | 21/05095-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 16.03.2022 | 66/22 | 21/05095-2 |
| 3 Býráðsfundur | 24.03.2022 | 56/22 | 21/05095-2 |

**Upprunin til málið:**
Aga-Føroyar hevur sent kommununi umsókn um keyp av lendi, sum liggur millum grundstykkið hjá felagnum, og "gamla" Velbastaðvegin.

**Lýsing av málinum:**
Aga-Føroyar, sum er eigari av matr.nr. 1083n, har felagið rekur sítt virksemi, søkir um at keypa lendið uml. 299 m$^2$, sum liggur millum teirra grundøki, og nýggja staðsetta vegin. Lendið verður ætlandi lagt afturat teirra vinnugrundstykki.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Kommunustýrislógin. Kunngerð um alment útboð. Matrikullógin.

**Upplýsingar frá umsitinginі.**
Kommunan hevur ætlanir um at umleggja part av "gamla" Velbastaðvegnum. Vegurin verður fluttur nakað og og verður lendi tøkt millum vegin og verandi vinnustykkir, sum liggja fram við vegnum.

Kommunan hevur bjóðað arbeiðið við vegnum út, og hevur býráðið hin 27.01.2021 samtykt at taka av lægsta tilboðnum uppá verkætlan, sum umfatar at dagføra part av Velbastaðvegnum. Fígging er enn ikki samtykt til vegagerðina.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið.**
*J.nr. 21/03506-* Býráðið samtykti hin 30. september 2021 at selja eigara av matr.nr. 1083r, 299,5 fermetrar av matr.nr. 1083aa, at leggja afturat matr.nr. 1083r. Talan er um grannan vestanfyri.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl.**
J.nr. 21/05095-3 Umsókn_Fyrispurningur
J.nr. 21/03506-5 213/21 Samtykt Býráðsfundur, 30.09.2021 PF Kemilux. Umsókn um keyp av lendi at leggja saman við grundstykki matr.nr. 1083r, Mykinesgøta 1. Tórshavn.
J.nr. 21/00676- 1 Uppskot vegaloysn Gl. Velbastaðvegur og Mykinesgøta.pdf

J.nr. 21/00676 - 23 13/22 Samtykt Býráðsfundur, 27.01.2022 Vegagerð á ídnaðarøkinum við Kemilux matr. nr. 1083r, Tórshavn

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís øki í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin, leiðarin á byggimálsdeildini, kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla til at ganga umsóknini um keyp av lendi á møti.

Sølan av lendinum verður ikki avgreidd, fyrr enn vegurin er liðugt gjørdur, og tað ber til at seta vegin av matrikulert. Søluprísurin er 750 kr./$m^2$. og skal keypari harumframt rinda allar útreiðslur til avgreiðslu av málinum, herundir matrikul og skeytisútreiðslur.

Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. mars 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 16. mars 2022:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. mars 2022:** Einmælt samtykt.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>24. mars 2022 | Blað nr.: 264 |
| | Formansins merki: |

# 57/22 Nýggj dagstovnapláss 2022

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 09.02.2022 | 23/22 | 22/00511-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 16.02.2022 | 34/22 | 22/00511-1 |
| 3 Býráðsfundur | 24.02.2022 | 30/22 | 22/00511-1 |
| 4 Býráðsfundur | 24.03.2022 | 57/22 | 22/00511-1 |

**Upprunin til málið**
Víðkan av plásskapasitetinum í sambandi við, at Miðstovnurin verður liðugt umbygdur. Harumframt at stovna nýggj pláss í Lonunum í Hoydølum.

**Lýsing av málinum**
Nýggj pláss í Loninum í Hoydølum og í Miðstovninum

**Miðstovnurin í Kongagøtu**
Eftir ætlan verður Miðstovnurin í Kongagøtu klárur at taka í nýtslu tann 1. apríl. Sum er gongur arbeiðið eftir ætlan, og kann virksemið í Kongagøtu byrja tá. Í fyrstu atløgu skulu øll barnagarðsbørnini, sum eru í Finsen, flyta yvir í Kongagøtu, og skulu børn og starvsfólk finna seg til rættis har.

Ætlanin er at stovna 2 nýggjar vøggustovur í skipanini nú, t.e. 24 vøggustovupláss.

**Lonirnar í Hoydølum**
Fyri at kunnu taka nógv fleiri børn inn í Lonunum, sum hølini loyva, er neyðugt at gera tillagingar. Neyðugt er at fáa fleiri vesi gjørd, lítlar køk við vask inn á stovurnar, eisini skulu møblar og annað fáast vil vega. Neyv kostnaðarmeting fyriliggur ikki til etablering av stovunum og vesum. Hædd skal tó eisini takast fyri, at leigumálið gongur 31. desember 2023.

Ætlanin er stovna 1 nýggja vøggustovu og 1 barnagarðsstovu, t.e. í alt 32 pláss.

**Játtan**
Tað er ikki tøk játtan til hesi nýggju plássini í 2022 í fíggjarætlanini § 3 Børn og ung. 36 vøggustovupláss í 6 mánaðir krevja eina játtan uppá kr. 1.630.000, og 20 barnagarðsstovupláss í 6 mánaðir krevja eina játtan uppá kr. 549.000. Tað vil siga kr. 2.179.000.

Skotið verður upp at játtað upphæddina av tøkum peningi at flyta á kontu 3215-32019 (Aðrar útreiðslur barnaansing), sum síðani flytur játtanina til stovnarnar, so hvørt plássini verða tikin í nýtslu.

Ein treyt fyri at kunnu taka í móti nýggjum børnum er sjálvandi, um hesir stovnarnir hava nokk av starvsfólkum. Plássini verða latin upp í BARN-skipanini og børnini byrja, so hvørt tað letur seg gera.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, miðfyrisitingarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til at góðkenna, at Miðstovnurin verður víðkaður við tveimum vøggustovum (24 pláss) og einari barnagarðsstovu (20 pláss), og at Lonirnar í Hoyvdølum verður víðka við einari vøggustovu (12 pláss) og einari barnagarðsstovu (20 pláss), og at hesi pláss verða latin upp í BARN-skipanini.

Harumframt verður mælt til at játta kr. 2.179.000 av tøkum peningi at flyta á kontu 3215-32019 (Aðrar útreiðslur barnaansing).

Málið at beina í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 09. februar 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 16. februar 2022:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. februar 2022:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 24. mars 2022:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

# 58/22 Vegna nevndina í Bridgehúsinum Pól E. Egholm : Umbøn um fund viðvíkjandi Brigdehúsinum í Gundadali

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 10.01.2018 | 17/18 | 16/01316-10 |
| 2 Mentamálanevndin | 14.05.2018 | 161/18 | 16/01316-10 |
| 3 Mentamálanevndin | 19.10.2020 | 268/20 | 16/01316-10 |
| 4 Fíggjarnevndin | 21.10.2020 | 257/20 | 16/01316-10 |
| 5 Mentamálanevndin | 27.04.2021 | 107/21 | 16/01316-10 |
| 6 Fíggjarnevndin | 28.04.2021 | 101/21 | 16/01316-10 |
| 7 Býráðsfundur | 29.04.2021 | 117/21 | 16/01316-10 |
| 8 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.06.2021 | 104/21 | 16/01316-10 |
| 9 Mentamálanevndin | 09.06.2021 | 158/21 | 16/01316-10 |
| 10 Mentamálanevndin | 22.06.2021 | 186/21 | 16/01316-10 |
| 11 Fíggjarnevndin | 23.06.2021 | 173/21 | 16/01316-10 |
| 12 Býráðsfundur | 23.06.2021 | 175/21 | 16/01316-10 |
| 13 Mentamálanevndin | 15.09.2021 | 219/21 | 16/01316-10 |
| 14 Fíggjarnevndin | 22.09.2021 | 203/21 | 16/01316-10 |
| 15 Býráðsfundur | 30.09.2021 | 216/21 | 16/01316-10 |
| 16 Mentamálanevndin | 09.03.2022 | 88/22 | 16/01316-10 |
| 17 Fíggjarnevndin | 16.03.2022 | 71/22 | 16/01316-10 |
| 18 Býráðsfundur | 24.03.2022 | 58/22 | 16/01316-10 |

**Upprunin til málið:**
Brigdehúsið hevur vent sær til kommununa fyri at fáa avklára framtíðina hjá húsi felagsins, ið stendur á kommunalari grund.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Í 2016 lat nevndin fyri Brigdehúsið skriv til kommununa viðv. verandi loysn fyri Brigdehúsinum í Gundadali. Húsið fevnir um virksemi hjá teimum 3 brigdefeløgunum í Havn. Sí hjálagt skriv.

Felagið hevur 3 uppskot til loysn:

1. At Tórshavnar kommuna veitir Brigdefeløgunum nýggj og egnaði høli. (sí hjálagt skriv við kravfesting).
2. At Tórshavnar kommuna yvirtekur Brigdehúsið í Gundadali nú og fremur tær neyðugu ábøturnar og bridgefeløgini fáa framíhjárætt at nýta húsið.
3. At Tórshavnar kommuna leingir verandi leiguavtalu í minst 10 ár, og hjálpir bridgefeløgunum at fíggja

neyðugar íløgur.

Síðani skrivið hevur umsitingin samskift við brigdehúsnevndina við atliti at pkt. 1 uttan at hetta hevur ført við sær nakað sum felagið tekur undir við.

Felagið keypti húsið í 1992 frá Havnar Bóltfelag (sí hjálagt skjal) og fekk leigusáttmála við kommununa sama ár (sí hjálagt skjal). Í grein 2 er ásett at leigumálið ikki kann vera uppsagt fyrrenn til 1. Februar 2017, uttan so at leigarin í aðrar mátar ikki hevur hildið sáttmálan.

Á fundinum fer umsitingin at gjøgnumganga málið.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávisar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingar avleiðingar | | | | |
| Unhvørvis avleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða málið við atliti til at umsitingin vendur aftur til nevndina við ítøkiligum tilmæli til ein komandi fund.

**Mentamálanevndin 10. januar 2018:** Málið umrøtt.
Marin Katrina Frýdal luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti**
17. Januar 2018 var ástaðarfundur millum umsitingina og nevndina í Brigdehúsinum og limafeløgunum. Myndir eru tiknar, ið eru tøkar í hjáløgdum skjali. Sí eisini avrit av virðismeting, ið Sp/f Protek gjørdi í 2011.

Eftir fundin fær kommunan skriv har feløgini siga:
*"At bridgefeløgini ikki hava nakað serstakt ynski um at eiga hølir ella hús til sítt virksemi. At tað snýr seg um at hava føst, góð og væl egnaði høli til virksemi, við so lítið stríð og so lítlan kostnað sum gjørligt – uppá langt sikt. At Tórshavnar kommuna (TK) kanska skal nýta øki har vit eru, og at TK ynskir at skapa góðar karmar fyri ítrótt og frítíðarvirksemi í kommununi, eigur tí at kunna loysast skjótt, trygt og gott. Hóast húsini treingja til ábøtur, so hava tey eitt virði á t.d. 2 - 3 mió kr, og tí ynskja bridgefeløgini, at ein avtala við TK avspeglar tann veruleikan, at TK við keyp og yvirtøku av húsinum fáa eitt stórt virði sum feløgini hava skapt.*

*Møguleiki 1 omanfyri kann bera til, og Frúutrøð bleiv nevnt. Ímóti talar, at TK ynskir at selja ognir ið "leypa av"og at bridgefeløgini trívast væl í Gundadali.*
*Møguleiki 3 omanfyri hevur ein avmarking í, at TK bert kann stuðla við 33%, og at bridgefeløgini ikki ynskja at verða byggiharri í slíkari verkætlan, og ei heldur at taka upp lán.*

*Við at tillaga møguleiki 2 ynskja vit tí fylgjandi:*
*At TK keypir bridgehúsið fyri kr 1,00, pluss møgulig skuld og aðrar skyldur. Afturfyri fáa feløgini ein 30 ára leiguavtala fyri kr 0,00 um árið, og soleiðis at bert rakstrarútreiðslurnar verða goldnar av feløgunum. (alternativt keypir TK nú, men yvirtaka dispositiónsrættin um 30 ár). (alternativt keypir TK fyri kr 3 mió, og feløgini leiga frá TK fyri 100.000 p.a. í 30 ár – men tað gevur tað sama). Langtíðar viðlíkahald og umvælingar verða framdar av TK eftir avtalu við feløgini. Innibera umvælingar av húsinum, at virksemi má flytast út úr húsinum, skal TK fáa til vega líknandi og hóskandi hølir í tíðarskeiðinum. TK kann siga upp leiguavtaluna, um so er, at TK skal nýta húsini til annað endamál ella at tey skulu takast niður. Hetta tó bert, um TK kann bjóða feløgini hóskandi og samsvarandi hølir aðrastaðni.*

*Feløgini eru sinnaði at samstarva um hóskandi loysnir, og eisini um talan skal verða um, at byggja út og deila hølini við t.d. talvfelagið."*

Økið húsini standa á, innganga í heildarætlanina fyri Tórsvøll/Gundadal. Tí er mest upplagt at húsini vera tikin burtur innan ávísa áramál. Eisini er upplagt at vita um felagið kann innganga í eina loysn saman við t.d. Telvingarfelagnum. Sí eisini mál 17/00846 Hølisviðurskifti o.a. – Havnar Telvingafelag.

**Tilmæli**
Trivnaðastjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at heimila umsitingini at samráðast víðari við felagið um møguleikan at hýsa felagnum á øðrum stað og um møguligt saman við øðrum felag.

**Mentamálanevndin 14. mai 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**:
Víst verður til viðgerð í máli 18/01969 Tøkir skúlabygningar, umframt til mál 16/01194 Herluf Jakobsen: Áheitan vegna Bragdið um útvegan av hølum til felagið.

Av tí at felagið rykkir eftir eini avkláring og av tí at tað ikki longur er serliga sannlíkt, at tað verður rúm í komandi tøku skúlabygningunum til virksemi hjá Brigdehúsfelagnum verður mett hóskandi at geva felagnum afturboðan um tað og at fara undir tilgongd viðv. yvirtøku av bygninginum og endurgjald fyri tí.

Byrjað verður við samráðingum og roynt at fáa eina semju. Um tað ikki ber á mál verður er skipan í galdandi leigusáttmála um at partarnir biðja tveir óheftar metingarmenn um at áseta eitt hóskandi endurgjald fyri ognina á leigaðum lendi.

Á fundinum greiðir umsitingin frá metingum viðv. endurgjaldi og kostnaði av niðurtøku.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin, deildarleiðarin á stjórnarskrivstovuni og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka støðu til:

a). um farast skal undir samráðingar við Brigdehúsfelagið um yvirtøku av ognini í 2021 ella 2022.
b). um samráðingar ikki bera á mál so at heimila umsitingini at fáa tilnevnt metingarmenn um at áseta endurgjaldið.

Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 19. oktober 2020:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal og Jákup Dam samtykti at taka undir við a og b og beina málið í fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Halla Samuelsen og Helena Dam á Neystabø, atkvøður blankt.

**Fíggjarnevndin 21. oktober 2020:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við Mentamálanevndini.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, atkvøður blankt.

**Ískoyti:**
Samskifti hevur aftur verið við Bridgehúsfelagið um yvirtøku av bridgehúsinum og endurgjald í tí sambandi, nú torgverkætlanin er farin í gongd.

Ynski teirra er, at framtíðar staðsetingin av bridgehúsinum verður í ítróttaøkinum, og at talan er um teirra egnu høli, sum ikki eru minni enn verandi, tvs. uml. 250 m2. Kommunan hevur ikki slík høli at bjóða til leigu, so tí verður mest sannlíkt talan um nýbygging.
Felagið leigar grundøkið, sum bygningurin stendur á, frá kommununi.

Mett verður, at ein semja um endurgjald skal hava sum fortreyt, at felagið sjálvt byggir sær nýtt felagshús, og at kommunan endurrindar felagnum í mesta lagi kr. 2.500.000 fyri gamla Bridgehúsið. Grundøkið kann skipast í nýggjum langtíðarsáttmála.

Byggi- og býarskipanarnevndin skal viðgera staðsetingina.

Mett verður, at fígging til endurgjaldið kann játtast av kontu 5775 Ítróttaranlegg L57015 Langhylur.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at geva umsitingini heimild at samráðast og gera avtalu um endurgjald fyri bridgehúsið í mesta lagi kr. 2.500.000 fíggjað av kontu 5775 Ítróttaranlegg L57015 Langhylur.

Mælt verður harumframt til at heita á byggi- og býarskipanarnevndina um at staðseta nýggja bridgehúsið, og at møguligur leigusáttmáli um grundøkið verður at viðgera og samtykkja eftirfylgjandi.

**Mentamálanevndin 27. apríl 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum. Málið viðv. heimild at gera avtalu um endurgjald verður beint í býráðið um fíggjarnevndina, og málið um staðseting av nýggjum bridgehúsi verður beint í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Fíggjarnevndin 28. apríl 2021:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson, tekur undir við mentamálanevndini og beinir málið viðv. heimild at gera avtalu um endurgjald í býráðið.

Málið um staðseting av nýggjum bridgehúsi verður beint í byggi- og býarskipanarnevndini.

Ein minniluti, Annika Olsen, atkvøður ímóti vísandi til, at eingin óheft meting fyriliggur av bridgehúsinum, ið kann verða grundarlag undir einari avtalu við felagið um endurgjald. Ynski er tó, at ein loysn verður funnin á hølisviðurskiftunum hjá felagnum.

Ein minniluti, Elsa Berg, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 29. apríl 2021:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri, ongari ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Jákup Dam, Gunvør Balle, Kristian M. Skála, Birgir Nielsen og Ruth Vang.
Blankt atkvøddi: Elsa Berg.

**Ískoyti:**
Bridgefelagið hevur virkað í Gundadali í umleið 30 ár. Fólkini handan felagið hava eitt stórt ynski um, at verða verandi í Gundadali, hóast felagshúsið nú eftir ætlan verður tikið niður í sambandi við at økið skal brúkast sum partur av býartorginum í Gundadali, mál nr. 20/04581, Tórsvøllur Torg.

Ymiskar staðsetingar hava verið umrøddar í sambandi við at finna felagnum eina nýggja staðseting. Niðanfyri eru 4 staðsetingar í Gundadalsøkinum lýstar yvirskipað:

1. Býarskipanarliga er Gundadalur eitt øki, sum er um at verða fult útbygt. Heildarætlanin fyri Gundadali vísir tó á møguligar útbyggingarmøguleikar. Í heildarætlanini verður víst á økið millum HB- og B36-húsið. Hetta er eitt øki, sum í dag stendur óbygt, og sum partvíst kundi hóska seg til eitt bridgehús. Um byggjast skal á hesum stað, so skal alt økið byggjast, og hevði tað verið upplagt, at bygt tað við møguleika fyri áskoðaraplássum út móti ovara vølli, umframt at kjallarahæddin verður nýtt til okkurt hóskandi. Kjallahæddin skal helst brúkast av virksemi, sum partvíst kann húsast í myrkri, av tí at stórur partur av bygninginum verður undir jørð. Virksemið hjá Bridgefelagnum vildi helst hóska seg betri í ovaru hæddini, har inniklimaði kann gerast gott til kortspæl.
   Økið liggur í D2 í Almennu byggisamtyktini, har umráðisparturin D2 verður kannaður ítrótti og øðrum, sum eftir eini heildarætlan fyri alt økið ella ein part av økinum kann virka saman við ítróttinum, umframt at økið liggur í C3 í serstøku byggisamtykt nr. 3 og verður kannað ítróttum og tílíkum.
   Fyrimunur við staðsetingini er, at tað er rættiliga lætt at fara undir bygging á hesum stað.
   Vansar við staðsetingini er, at her skulu byggjast rættiliga nógvir fermetrar, sum møguliga ikki er hóskandi til Bridgefelagið, umframt at fótbólsfeløgini í fleiri umførum hava havt ymisk ynskir til økið.

2. Ein onnur staðseting, sum hevði hóskað seg væl til virksemið og teirra ynskir um at verða í Gundadalsøkinum, er í økinum við Tórsbreyt. Kring Tórsbreyt er møguligt at byggja rættiliga nógvar fermetrar, og eigur hendan loysnin at verða umhugsað sum ein framtíðar útbyggingarmøguleiki, bæði til at húsa ymiskum ítróttarligum virksemi, men so sanniliga eisini fyri at betra um veður og hølis avbjóðingarnar, sum virkandi ítróttarfeløgini á Tórsbreyt stríðast við. Við at staðseta bridgefelagið í hesum økinum, so kundi skjøtil verið settur á enn ein ítróttarmiðdepil, sum vildi gagnað fleiri enn bara Bridgefelagnum, tí tørvur er støðugt á fleiri hølum til ymisku ítróttagreinarnar, sum virka í høvuðsstaðnum.
   Økið liggur í D2 í Almennu byggisamtyktini, har umráðispartarturin D2 verður kannaður ítrótti og øðrum, sum eftir eini heildarætlan fyri alt økið ella ein part av økinum kann virka saman við ítróttinum.

Fyrimunir við staðsetingini er, at skjøtil verður settur á arbeiðið at menna Tórsbreyt til eina veruliga kappingarbreyt, umframt at møguleiki er fyri at staðseta fleirir ítróttargreinar á økið, sum í dag tørva fermetrar.
Vansar við staðsetingini er, at kommunan má luttaka við í planleggingini av økinum, umframt at tað møguliga verður ein longri tíðarhorisontur, tá Bridgefelagið einans hevur tørv á fáum fermetrum í økinum.

3. Ein triðja staðseting, sum hevur verið umrødd í sambandi við at vísa á eina staðseting til Bridgefelagið, er á matr. nr. 1268b, sum er økið beint yvir av verandi Bridgehúsi. Leigusáttmáli er galdandi fyri part av økinum, har ein privatur vinnubygningur stendur á leigaðum lendi hjá kommununi. Hóast leigusáttmálan, so eigur ikki at verða nøkur forðing í at byggja á hesum økinum. Í sambandi við at Tórsvøllur er bygdur, so er eitt parkeringskrav upp á 150 parkeringspláss, har 75 pláss skulu skipast inni á sjálvum byggiøkinum og kann restin teljast millum tey, sum longu eru í Gundadalsøkinum. Sum liður í at skipa Tórsvallar torgið verður økið aftan fyri Gundadalshøllina og økið sunnan fyri Gundadalsvegin skipað sum grøn parkeringspláss fyri at nøkta parkeringskravið frá UEFA, og verður vøkstur við til at skipa innrættingina og skapa eitt grønt umhvørvi.
   Økið liggur í C1 øki í serstøku byggisamtykt nr. 3, sum er lagt til miðstaðarbygging. Mest loyvda byggistig er 0,4 og mest loyvda nýtslustig er 0,8. Grundstykkið er 1250 m$^2$, og um bygt verður í einari hædd, kunnu í alt uml. 500 m$^2$ byggjast (inkl. aðrir bygningar á stykkinum).
   Fyrimunir við staðsetingini erfjór, at økið er lætt at fara til.
   Vansar við staðsetingini er, at ætlanirnar at innrætta parkeringsøkið og fríðka um í økinum tá ikki kunnu gerast og verður parkeringstørvurin helst óneyðuga stórur í hesum partinum at Gundadali.

4. Fjórða staðsetingin, sum hevur verið umrødd, er partur av matr. nr. 1292n, sum er á Oknarvegi, á vegnum til nýggja høvuðssæti hjá Bank Nordik. Matrikulin er 2000 m$^2$ til støddar, og rúmast Bridgefelagið væl á hesum økinum, og tískil kann hugsast, at bert ein partur av økinum skal setast av til Bridgefelagið.
   Økið liggur í umráðispartinum A í serstøku byggisamtyktini nr. 3 og er ætlað til sethúsabygging. Hóast økið liggur í sethúsaøki, so verður mett, at tað er grundarlag fyri at broyta ásetingarnar fyri økið, tí matrikulin er í beinleiðis sambandi við hotel- og bankavirksemið, sum annars í økinum.
   Fyrimunir við staðsetingini er, at økið er rímiliga lætt at fara til.
   Vansar við staðsetingini er, at byggisamtyktin skal broytast fyri at virksemið kann verða staðsett í hesum økinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at heimila umsitingini at fara í samráðingar við felagið um part av økinum á matr. nr. 1292n, Oknarvegur – staðseting 4.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. juni 2021:** Samtykt at fara víðari við staðseting 3.

**Mentamálanevndin 09. juni 2021:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Bridgehúsfelagið tekur undir við staðsetingini til nýggja Brigdehúsið á matr.nr. 1268b, sum byggi- og býarskipanarnevndin hevur samtykt.

Uppskot til semju fyriliggur, sum Bridgehúsfelagið tekur undir við. Upphæddin, sum kommunan skal endurgjalda felagnum fyri verandi Bridgehús, verður kr. 2,5 mió, ið er tann upphæddin, sum býráðið samtykti 29. apríl 2021. Møguligur yvirtøkudagur av húsinum verður at avtala nærri.

Aftrat skal kommunan játta íløgustuðul (konta 5370 stuðul til íløgur) til byggingina í mesta lagi kr. 1,5 mió svarandi til uml. triðingin av metta byggikostnaðinum. Henda játtan verður at rinda í tveimum líka stórum pørtum árni 2022 og 2023.

Endalig bygging er treytað av byggiloyvi, og herundir viðgerð hjá friðingarmyndug-leikunum av tí at talan er um bygging tætt uppat viðarlundini.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at taka støðu til uppskotið um semju.

Um samtykt, mæla trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin til at gera keypssáttmála fyri kr. 2,5 mió sbrt. hjálagda skeyti. Harumframt verður mælt til at fíggja íløgustuðul til nýtt Bridgehús á fíggjarætlanini fyri 2022 við upphædd kr. 750.000 og fyri árið 2023 kr. 750.000.

Mælt verður eisini til at gera leigusáttmála við Bridgehúsfelagið um part av lendinum matr.nr. 1268b, tá neyvari avmarking av grundøkinum er gjørd.

**Mentamálanevndin 22. juni 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 23. juni 2021:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beinir málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. juni 2021:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Leigusáttmáli um lendi til nýggja húsið (kemur mánadagin 13. september 2021)

Umsitingin hevur verið í samráðingum við Brigdehúsfelagið um staðseting og eru komin ásamt um hjálagda uppskot til leigusáttmála.

Yvirtøkudagur gamla húsið
Ætlandi verður yvirtøkudagurin 2. november 2021. Hareftir húsið ætlandi verður tikið niður á várið 2022.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, trivnaðarstjórin, býararkiteturin mæla nevndini til at innganga hjálagda leigusáttmála um lendi í 30 ár. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 15. september 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Ruth Vang var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 22. september 2021:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Annika Olsen, tekur ikki undir við málinum.

**Býráðsfundur 30. september 2021:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 9 atkvøðum fyri, 4 blonkum atkvøðum og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Birgir Nielsen og Ruth Vang.

Blankt atkvøddu: Elsa Berg, Jón Kragesteen, Gunvør Balle, Annika Olsen.

**Ískoyti:**

**Rætting viðv. kontering**
Í sambandi viðgerðina av keypi av brigdehúsinum í býráðnum 29. apríl 2021 var samtykt at játta 2.500 tkr. av løgukontu 5775, projektkontu - L57015 Langhylur - til at fíggja keypið.

Her skuldi av røttum verið fluttar 2.500 tkr. til aðra kontu, tí annars vil keypið av brigdehúsinum fara inn í byggi-/verkætlanarroknskapin fyri langhylsverkætlanina og geva eina skeiva mynd har.

Gjørd er nýggj projektkontu til endamálið - t.e. - L61010 Keyp av bygninginum - og verður so bókingin av keypinum flutt yvir eins og fíggingin.

**Niðurtøka av Bridgehúsinum**
Sbrt. sáttmálanum við Brigdehúsfelagið skal felagið vera farin úr húsinum pr. 30. apríl 2022. Tá virksemi so byrjar aftur eftir summarfrítíðina er ætlanin at tey fara at hava virksemi á onkrum fyribils stað inntil nýggja brigdehúsið verður klárt. Nýggja Brigdehúsið er í gerð og verður væntandi klárt at taka í nýtslu í oktober 2022.

Ætlanin er at fara undir niðurtøku av gamla brigdehúsinum í mai 2022. Søkt verður um loyvi frá byggivaldinum. Ætlanin er at bjóða arbeiðið út sum undirhondsboð til tvey feløg. Niðurtøkan verður fíggjað av L57035 Tórsvøllur torg.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, fíggjarleiðarin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til:
a). at flyta 2.500 tkr. av projektkontu- L57015 langhylur - til projektkontu - L61010 Keyp av bygningum. Málið verður beint í fíggjarnevndina.
b). at heimila umsitingini at fara undir niðurtøku av gamla brigdehúsinum og at bjóða arbeiðið út sum undirhondsboð til tvey feløg og fíggja arbeiðið av projektkontu L57035 Tórsvøllur torg.

Málið verður beint í fíggjanevndina.

**Mentamálanevndin 09. mars 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum

**Fíggjarnevndin 16. mars 2022:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson og Annika Olsen, tekur undir við mentamálanevndini.

Ein minniluti, Elsa Berg, tekur undir við pkt. a, men tekur ikki undir við pkt. b vísandi til, at hon viðmælir, at arbeiðið verður boðið út í innbodnari lisitatión millum fleiri arbeiðstakarar.

**Býráðsfundur 24. mars 2022:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð einmælt samtykt.

# 59/22 06-12 Málslýsing - Hoyvíkar skúli dagføring

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 31.08.2016 | 214/16 | 16/02772-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 16.01.2019 | 13/19 | 16/02772-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 23.01.2019 | 17/19 | 16/02772-1 |
| 4 Býráðsfundur | 31.01.2019 | 14/19 | 16/02772-1 |
| 5 Mentamálanevndin | 15.01.2020 | 3/20 | 16/02772-1 |
| 6 Trivnaðarnevndin | 11.03.2021 | 18/21 | 16/02772-1 |
| 7 Trivnaðarnevndin | 10.03.2022 | 22/22 | 16/02772-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 16.03.2022 | 73/22 | 16/02772-1 |
| 9 Býráðsfundur | 24.03.2022 | 59/22 | 16/02772-1 |

**Málslýsing:**
Arbeiðssetningur og arbeiðsbólkur:
Í álitinum um skúlabygnað og skúlabygging árini 2012-2021 ( mál 2011-0679), sum skúlastýrini eisini hava viðgjørt og gjørt viðmerkingar til, er mælt til, at bygnaðurin í Hoyvíkar skúla verður tann sami, umframt at forskúli verður í skúlanum. Mælt er eisini til, at samstarvið millum báðar skúlarnar í Hoyvík um 8. og 9. flokk heldur fram, so næmingarnir í hádeildini hava fleiri valmøguleikar.

Hoyvíkar skúli er ein tvey-sporaður skúli við næmingum úr 1. – 9. fl., umframt frítíðarskúla til fyrsta og annan flokk og tveimum serflokkum. Haraftrat er Klubb 188 í skúlanum.

Viðvíkjandi høvuðsumvæling og dagføring av Hoyvíkar skúla, verður víst til samtyktina frá 26. februar 2015 (mál 14/01124), at arbeiða víðari við ætlan at byggja uppí sjálvan skúlan til tess, at alt skúlavirksemið kann rúmast har, verður harumframt samtykt at játta kr. 445.000 av íløgukarminum til dagføring av skúlum til íløgukontu L41013 Hoyvíkar skúli, høvuðsumvæling og dagføring, til at fáa til vega tørvslýsing, skitsuprojekt og kostnaðarmeting fyri uppíbygging og høvuðsumvæling, herundir hvussu skúlavirksemið kann skipast, meðan byggiarbeiðið fer fram og tíðarætlan tí viðvíkjandi.

Umsitingin hevur í vár havt fundir við leiðsluna í Hoyvíkar skúla um høvuðsumvæling, dagføring og hølistørv. Við støði í teimum fundunum og við støði í álitinum um skúlabygnað og skúlabygging árini 2012-2021, er arbeiðssetningurin hesin:

Hoyvíkar skúli skal høvuðsumvælast og dagførast, so karmarnir eru tíðarhóskandi og pláss er fyri øllum virkseminum í skúlanum.

Í Hoyvíkar skúla skal pláss vera fyri tveimum flokkum í 10 árgangum frá forskúla til og við 9. flokki, fyri tveimum serflokkum og fyri frítíðarskúla frá forskúla til og við 3. flokki. Skúlin ynskir at halda fast við skipanina av hølunum, soleiðis at skilja, at kjarnin er námsfrøðiligur tænastudepil, leiðsla/fyrisiting, starvsfólkarúm, og at næmingar og lærarar ikki hvørva út í lonir, men eru í trimum deplum. Grunddeild forskúli-3.fl., miðdeild 4.- 6.fl., hádeild 7. – 9.fl., og at sertilboðið er í friðarligari eind skúlanum.

Hølini til handverk og list eru ikki nøktandi og ikki nóg nógv, sostatt er neyðugt at útvega fleiri og dagføra tey, sum eru.

Umstøðurnar at eta hjá næmingum og starvsfólkum skulu vera góðar, so ikki er neyðugt at eta í flokshølunum.

Tørvur er á førleikastovu, fleiri fundar- og bólkahølum og námsfrøðiligum tænastudepli.

Klubb 188 er í skúlanum.

Starvsfólkini skulu hava umstøður at ráðleggja og fyrireika í skúlanum, so ikki er neyðugt at gera ein part av arbeiðinum við hús.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at samtykkja arbeiðssetningin og geva umsitingini heimild til at útvega byggiskrá.

**Mentamálanevndin 31. august 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
Arbeiðið at gera byggiskrá er komið væl áleiðis, men er ikki gjørt liðugt. Byggiskráin varð sett í bíðistøðu í januar 2018, tí greiði var ikki á løgujáttan til dagføring og høvuðsumvæling av Hoyvíkar skúla. Í langtíðar løguætlanini er nú peningur settur av til verkætlanina frá 2020 og nøkur ár fram. Ætlanin er tí at gera byggiskránna lidna í ár.

Hóast ætlanina at dagføra og høvuðsumvæla Hoyvíkar skúla, er neyðugt at gera ábøtur og umvælingar, áðrenn sjálv høvuðsumvælingin fer í gongd. Átrokandi umvælingar, sum verða gjørdar í 2019, eru umvæling av ávísum útveggjum, tekjan á nýggja bygninginum verður skift, og haraftrat verða nøkur vindeygu skift.

Í sambandi við umvælingarnar í 2019, er ætlanin, at ein partur verður gjørdur, meðan næmingarnir hava frí, so umvælingin órógvar undirvísingina sum minst. Men meginparturin verður væntandi gjørdur, meðan skúlagongd er, og tí má støða takast til, hvussu skúlin verður skipaður, meðan arbeitt verður. Ein møguleiki er at flyta úr tveimum flokshølum, starvsfólkarúminum og hølunum til fyisiting og so brúka kantinuna í Hoyvíkshøllini og møguliga kjallaran í Hoyvíkar kirkju, meðan útveggir verða umvældir. Húsaumsitingin, mentamáladeildin og skúlin samskifta um, hvussu umvæling og skúlagongd verða skipað.

<u>Innbúgv</u>
Fyri at bøta um umstøðurnar serliga í miðhøllini/bókasavninum hevur skúlaleiðslan ynski um at keypa innbúgv, soleiðis at hølini verða hugnaligari og kunnu verða brúkt til fjølbroyttari virksemi, bæði til sosiala samveru í fríløtum, til undirvísing og næmingaarbeiði. Mett verður at 150.000 kr. kunnu setast av til tað. Ætlanin er, at innbúgvið eisini verður brúkt í høvuðsumvælda bygninginum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, leiðarin á barna- og ungdómsdeildini og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja, at hildið verður fram við at gera byggiskrá fyri høvuðsumvæling og møguliga útbygging av Hoyvíkar skúla, íroknað frítíðarskúla og forskúla.

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at játta 150.000 kr. av 4175 Dagføring av skúlum til innbúgv til Hoyvíkar skúla.

Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 16. januar 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 23. januar 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 31. januar 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Nú høvuðsumvælingin av Hoyvíkar skúla er útsett á langtíðarløguætlanini, verður mett skilabest at bíða við at gera byggiskránna lidna til greitt er, nær játtan verður tøk, so farast kann undir høvuðsumvæling og møguliga útbygging av Hoyvíkar skúla og Frítíðarskúlanum í Hoyvík.

Hildið verður fram at gera ábøtur og umvælingar í skúlanum, og í 2019 eru hesi arbeiði gjørd í Hoyvíkar skúla: Klædningur og tak eru skift í vestara bygningi, og nýggjur útveggur og vindeygu eru skift á suðursíðuni í elsta parti av skúlanum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla mentamálanevndini til at samtykkja , at byggiskráin fyri høvuðsumvæling og møguliga útbygging av Hoyvíkar skúla íroknað frítíðarskúla og forskúla verður útsett.

**Mentamálanevndin 15. januar 2020:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal, tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Halla Samuelsen og Helena Dam á Neystabø, heldur fast í at man heldur fram við arbeiðnum at gera byggiskrá í Hoyvíkar skúla

**Ískoyti**
Tørvur er at fáa greiði á nær ætlanin er at gera møguliga høvuðsumvæling og útbygging av Hoyvíkar skúla v.m. Hetta m.a. soleiðis at húsaumsitingin kann avgera nærri í mun til neyðugar umvælingar.

Aftur í fjør vóru ein røð av umvælingum gjørdar tí tað ikki toldi at bíða.

Fígging er ikki raðfest til endamálið í 2021. Umsitingin metir at tað ikki er upplagt at byrja arbeiðið við byggiskrá fyrrenn tað er greitt viðv. nær løgufígging umleið kann vera tøk.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla nevndini til at taka støðu nær farast skal undir at gera byggiskrá. Málið verður beint í mentamálanevndina.

**Trivnaðarnevndin 11. mars 2021:** Nevndin er samd um at farast skal undir at gera byggiskrá, sum skal verða liðug í heyst, tá ið fíggjarætlanin fyri 2022 verður gjørd.

**Ískoyti**:
Arbeiðið við at gera byggiskrá byrjaði ikki sum ætlað í fjør vegna ógreiðu um raðfesting av hesi lutfalsligu stóru verkætlan. Síðani tá hevur býráðið í sambandi við fíggjarætlanina fyri 2023 samtykt at játta 2.000 tkr. til Hoyvíkar skúla. (LK41013 Hoyvíkar skúli, høvuðsumvæling og dagføring), umframt at tað longu eru 158 tkr. á L41013 Hoyvíkar skúli, høvuðsumvæling og dagføring.

Umsitingin er byrjað uppá tilgongdina og hevur eisini fundur verið her í feb. við skúlastýrið í Hoyvíkar skúla.

Avrátt er, at fyrsta stigið er at bygningsdeildin fær gjørt eina neyva støðulýsing av bygninginum, ið kann vera grundarlag fyri víðari støðutakan til umvælingar, umbyggingar og útbyggingar. Henda støðulýsing verður væntandi tøk í mai 2022.

Samstundis er ætlanin í mai 2022 at halda fram við gerð av byggiskrá saman við leiðslu og starvsfólkum í skúlanum og frítíðarskúlanum. Ætlandi skal byggiskráin vera liðug í september 2022, soleiðis at málið kann vera tikið við í sambandi við fíggjarætlanartilgongdina fyri 2023.

**Innbúgv**
Á fundi í skúlastýrinum var ynski sett fram um at fáa játtað nakað av innbúgvi til skúlan og sum kann vera brúkt eisini í sambandi við komandi verkætlanina. Nevnd var upphædd á umleið 200-300 tkr.

**Onnur arbeiðir**
Í játtanini hjá bygningsdeildini á kontu 6110 er sett nakað av til umbyggingar ves'um í Hoyvíkar skúla.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla trivnaðarnevndini til at samtykkja:

a). at flyta 2.000 tkr. av LK41013 til L41013 Hoyvíkar skúli, høvuðsumvæling og dagføring.
b). at játta Hoyvíkar skúla 300 tkr. til keyp av innbúgvi.

Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Trivnaðarnevndin 10. mars 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum. Pkt. b. verður at játta av projektkontu L41013.

**Fíggjarnevndin 16. mars 2022:** Samtykt at taka undir við trivnaðarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. mars 2022:** Einmælt samtykt.

# 60/22 Lendisgøtur

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.03.2018 | 40/18 | 18/00992-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 14.03.2018 | 81/18 | 18/00992-1 |
| 3 Býráðsfundur | 22.03.2018 | 67/18 | 18/00992-1 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.03.2019 | 36/19 | 18/00992-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 20.03.2019 | 83/19 | 18/00992-1 |
| 6 Býráðsfundur | 28.03.2019 | 68/19 | 18/00992-1 |
| 7 Byggi- og býarskipanarnevndin | 01.04.2020 | 65/20 | 18/00992-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 06.04.2020 | 86/20 | 18/00992-1 |
| 9 Býráðsfundur | 06.04.2020 | 58/20 | 18/00992-1 |
| 10 Byggi- og býarskipanarnevndin | 23.04.2020 | 82/20 | 18/00992-1 |
| 11 Býráðsfundur | 30.04.2020 | 82/20 | 18/00992-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | 21.10.2020 | 265/20 | 18/00992-1 |
| 13 Býráðsfundur | 29.10.2020 | 236/20 | 18/00992-1 |
| 14 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.02.2021 | 9/21 | 18/00992-1 |
| 15 Fíggjarnevndin | 17.02.2021 | 23/21 | 18/00992-1 |
| 16 Býráðsfundur | 25.02.2021 | 56/21 | 18/00992-1 |
| 17 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.04.2021 | 65/21 | 18/00992-1 |
| 18 Fíggjarnevndin | 21.04.2021 | 91/21 | 18/00992-1 |
| 19 Býráðsfundur | 29.04.2021 | 121/21 | 18/00992-1 |
| 20 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.02.2022 | 21/22 | 18/00992-1 |
| 21 Fíggjarnevndin | 16.02.2022 | 38/22 | 18/00992-1 |
| 22 Býráðsfundur | 24.02.2022 | 31/22 | 18/00992-1 |
| 23 Býráðsfundur | 24.03.2022 | 60/22 | 18/00992-1 |

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Ein mió. kr. eru avsettar á íløgum 2018 til lendisgøtur og verður mælt til at gera hesa raðfesting:
1. Sandá heimari partur av gøtuni 765 m
2. Part av 235 m ringgøtuni í Villingadalsfoss.

Kostnaður er mettur til 1 mió. kr.

Ad. 1. Framhald og nýgerð av gøtu við Sandá, nýgerð av gøtu uml. 765 m.
Búnaðarjørð, krevur skrivligt samtykki frá Búnaðarstovuni og festara.

Ad. 2. Nýgerð av gøtu við Villingadalsfoss, niðan á fossin. So langt sum 235.000 kr. røkka. Búnaðarjørð, krevur skrivligt samtykki frá Búnaðarstovuni og festara.

Havast skal í huga ognarviðurskifti, brúksrættindi, viðlíkahaldsskyldur, kostnaður og fígging. Avgerandi er, at eigarin av lendinum gevur loyvi, har sum kommunan ikki eigur, og at ferðslurættindi verða lýst á farleiðina, antin sum servituttur ella onnur avtala.

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og virkandi býararkitekturin mæla til at játtaðar verða kr. 1 mió. av løgukarminum L00001 á konto 6275 Fríðkan av kommununi til framhaldandi gerð av lendisgøtum og at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. mars 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 14. mars 2018:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 22. mars 2018:** Einmælt samtykt.

Bergun Kass luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Í 2019 er ætlanin at fara undir gøtuna við Sandá, sum varð sett á breddan í 2018, umframt gøtuna frá gl. vatnbrunninum yvir til ánna í Villingadali.

Fyri gøtuna við Sandá hevur umsitingin í 2018 fingið til vega tilboð, áljóðandi 2.9 mió. kr. Arbeiðið varð raðfest í 2018, og er nakað av arbeiðinum longu gjørt. Játtanin í 2019 skal fevna um írestandi fígging, soleiðis at allur teinurin kann raðfestast.

Gøtan frá gl. vatnbrunninum yvir til ánna í Villingadali er mett til at kosta einar 500.000 kr.

Írestandi fígging fyri 2019 sæst niðanfyri:

| | |
|---|---:|
| Gøta við Sandá | 2.900.000 kr. |
| Gøta við Sandá (goldið) | 701.250 kr. |
| Gøta Villingadal (meting) | 500.000 kr. |
| Írestandi játtan fyri 2018 | 1.200.000 kr. |
| **Eftir at játta fyri 2019** | **1.500.000 kr.** |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at játta 1.5 mió kr. av íløgukarminum L00001 á konto 6275 Fríðkan av kommununi til lendisgøtur L62019, og at beina málið **í** býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. mars 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. mars 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býraðið.

**Býráðsfundur 28. mars 2019:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 28. mars 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**

Arbeitt hevur verið fyri 1.9 mill. í 2019, á strekkinum fram við Sandá. Stígur kom í við at fáa endaligt loyvi frá lendisánara til seinasta strekkið. Sambært tilboði frá arbeiðstakara er kostnaðurin til seinasta strekkið 1,0 mill. kr. eftir. Skjal 18/00992-22 Planlagdar lendisgøtur 2020 Sandá

Lendisgøtan við Villingadal bíðar eftir loyvi frá Búnaðarstovuni. Rykt er fleiri ferðir eftir loyvi, og hevur Búnaðarstovan boðað frá, at loyvi verður sent í næstum. Arbeiðið er mett til 500.000,- kr. Skjal 18/00992-22 Planlagdar lendisgøtur 2020 Villingadal

Ynski er at gera gøtusamband millum gomlu Vatnbrunnarnar í Grásteinsgøtu og Rossagøtuna. Rás er traðkað, men lendisviðurskiftini og hall á lendinum gera tað neyðugt at gera trappur í støðum í lendinum. Skjal 18/00992-22 Planlagdar lendisgøtur 2020 til Rossagøtuna

**Skjøl:**
18/00992-22 Planlagdar lendisgøtur 2020 Sandá
18/00992-22 Planlagdar lendisgøtur 2020 Villingadal
18/00992-22 Planlagdar lendisgøtur 2020 til Rossagøtuna
18/00992-51 Gøtur at gera í 2022

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til at framflyta avlop frá 2019 1.227 mió. kr. og at játta 1.00 mió. kr. av íløgukarminum L00001 á konto 6275 Fríðkan av kommununi til lendisgøtur L62019, og at beina málið **í** býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 01. apríl 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 06. apríl 2020:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 06. apríl 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Rættleiðing til gøtuna við Sandá
Gøtan við Sandá varð boðin út í 2018.
2 tilboð komu inn, lisitatión var 6. novembur 2018:
Tikið varð av lægra tilboðnum, sum var áljóðandi 2.221.250 kr.

**Mettur kostnaður var sostatt:**

| | |
|---|---|
| Tilboð | 2.221.250 kr. |
| Mettur eykakostnaður | 678.750 kr. |
| **Mettur kostnaður íalt** | **2.900.000 kr.** |

**Status:**

| | |
|---|---|
| Goldið higartil tilboð | 1.765.550 kr. |
| Goldið higartil eyka (t.e. Eyka hegn, eyka atkoma frá AB vøllinum.o.a. | 258.520 kr. |
| **Goldið higartil** | **2.024.070 kr.** |

| | |
|---|---|
| Arbeiði eftir av gera tilboð | 455.700 kr. |
| Eftir til eyka | 420.230 kr. |
| **Eftir av játtan** | **875.930 kr.** |

Henda upphædd er íroknað framflutta upphædd frá 2019

Avlop verður brúkt til Lendisgøturnar planlagdar í 2020. T.e. gøtan í Villingadali og niðan á Rossagøtuna.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 23. apríl 2020:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 30. apríl 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti.**
Viðvíkjandi lendi burtur av matr.nr. 32a, Kirkjubøur/Argir, sum er privatogn. Sí kortskjal 18/00992 - 33

Kommunan hevur í samráð við eigaran gjørt gøtu framvið ánni, inni á matr. nr. 32a, Kirkjubøur/Argir, og hevur í hesum sambandi flutt hegnið niðan um gøtuna. ( Sí kortskjal 18/00992 – 33 )

Neyðugt verður at keypa uml. 270m2, av lendi til gøtuna, frá verandi eigara.

Talan er um D1 øki í byggisamtyktini. Fermeturprísur sambært yvirliti hjá Búnaðarstovuni fyri velt lendi og væl dyrkingarbært lendi, sum liggur væl fyri er 137kr. pr. m2. Samlaður keypsprísur verður uml. 37.000,- kr. og skal kommunan harumframt rinda rinda allar allar útreiðslur til matrikulering. Mettur kostnaður kr. 4.000,-

**Tilmæli.**
Kommunustjórin og leiðarin á Stjórnarskrivstovuni mæla býráðnum til umvegis fíggjarnevndina, at keypa neyðugt lendið uml. 270 fermetrar, burtur av matr.nr. 32a, Kirkjubøur/Argir, til gøtuna fyri 37.000,00 kr. og at rinda útreiðslur til matrikulering uml. 4.000,00 kr.

Konto 6275 Fríðkan av kommununi til lendisgøtur L62019.

**Fíggjarnevndin 21. oktober 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 29. oktober 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í sambandi við víðkan av gøtukervinum í Tórshavnar kommunu er ætlanin at raðfesta 4 gøtustrekkir í árinum 2021. Talan er um gøturnar:

1. Framhald av gøtuni fram við Sandá úti í Havnardali
2. Gøtusamband millum gomlu Vatnbrunnarnar í Grásteinsgøtu og Rossagøtuna
3. Framhald av gøtu Frammi í Dal, Kollafjørður
4. Gøta út á Hvítasand

Ad. 1 – Framhald av gøtuni fram við Sandá úti í Havnardali, sí j.nr. 18/00992-38. Ynskiligt er at gøtan framvið Sandá heldur áfram víðari út í dalin sambært kortskjalinum. Í fyrsta umfari skal gøtan leggjast í lendi, soleiðis at hon í minst møguligan mun ávirkar náttúruna og djóralívið á staðnum. Kommunan varðar av stórum parti av lendinum, men eru eisini traðir, sum eru privat ogn og verður tí neyðugt at fara í samráðingar við hesar eigarar um hvussu gøtan gongur framvið teirra ogn. Talan er um eina tilgongd, sum kann draga út, alt eftir hvussu samráðingarnar ganga, men kann eisini hugsast, at fólk hava sæð virknaðin og stóru gleðina hjá borgarum fyri verandi gøtur framvið Sandá.
Tá gøtan er staðsett, kann arbeiðið bjóðast út og verður tá komið aftur í avvarðandi nevndir fyri at raðfesta neyðugu fíggingina.

Ad. 2 – Gøtusamband millum gomlu Vatnbrunnarnar í Grásteinsgøtu og Rossagøtuna, sí j.nr. 18/00992-39. Hendan gøtan varð raðfest í 2020, men vísti tað seg, at tilboðið upp á gøtuna var so høgt, at kommunan vrakaði tilboðið. Ætlanin er at bjóða gøtuna út av nýggjum og verður síðani komið aftur í avvarðandi nevndir fyri at raðfesta neyðugu fíggingina.

Ad. 3 – Framhald av gøtuni Frammi í Dal í Kollafirði, sí j.nr. 18/00992-40. Gøturnar í Kollafirði verða gjørdar av sjálvboðnum initiativi, sum merkir, at fólk á staðnum standa fyri gøtugerðini, meðan kommunan fíggjar tilfarið til gøtugerðina. Í 2021 væntast at brúka 300.000 kr. til framhald av verandi gøtum.

Ad. 4 – Gøta út á Hvítasand, sí j. nr. 18/00992-41. Sambært Frílendisætlanini fyri Hoydalar er ynskiligt, at gøta verður gjørd út á Hvítasand. Gøtan skal leggjast væl í lendið og síðani bjóðast út til arbeiðstakarar at gera. Tá eitt tilboð fyriliggur fyri gerð av gøtuni, verður komið aftur í avvarðandi nevndir fyri at raðfesta neyðugu fíggingina til arbeiðið.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:
- At farið verður undir fyrireikingararbeiðið til gøtu 1, 2 og 4, fyri síðani at venda aftur í avvarðandi nevndir við eini ætlan og tilboði fyri gerð av gøtunum.
- At játtaðar verða kr. 300.000 av L00001, Løgukarmur fyri árið til L62019, Lendisgøtur, til framhald av gøtu nr. 4, Frammi í Dal í Kollafirði.
- At málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. februar 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2021:** Samtykt at taka undir við Byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðsfundur 25. februar 2021:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Gøturnar, ið eftir ætlan skulu raðfestast í ár (2021) verða gjøgnumgingnar niðanfyri í mun til kostnað o.a.. Ein eyka gøta er løgd afturat raðfestingarlistanum: gøtan kring vatnbrunnin í Havnardali.

1. Framhald av gøtuni fram við Sandá úti í Havnardali
2. Gøtusamband millum gomlu Vatnbrunnarnar í Grásteinsgøtu og Rossagøtuna
3. Framhald av gøtu Frammi í Dal, Kollafjørður
4. Gøta út á Hvítasand
5. Gøta kring vatnbrunnin í Havnardali

<u>Ad 1 - Framhald av gøtuni fram við Sandá úti í Havnardali, sí skjal 18/00992-38</u>
Gøtan varð koyrd í útboð í mars mánað. Ástaðarfundur var á gøtuni t. 19. mars, har greitt var frá arbeiðinum. Samlaða gøtulongdin, sum skal gerast, er áleið 1910 m, og er arbeiðið á gøtuni deilast sundur í trý strekki.
Níggju veitarar við viðkomandi arbeiðsroyndum vórðu bjóðaðir at luttaka, og hava fýra av hesum bjóðað uppá arbeiðið. Innkomnu tilboðsupphæddirnar vóru hesar:

| | |
|---|---|
| Veitari 1: | 2.144,459,16 kr. |
| Veitari 2: | 3.145.070,00 kr |
| Veitari 3: | 4.373.882,00 kr |
| Veitari 4: | 6.016.500,00 kr |

Prísir eru uttan MVG. Mælt verður til, at umsitingin fer undir samráðingar við veitara 1, sum eigur lægsta tilboðið uppá arbeiðið. Harumframt at fáa neyðugu avtalur og loyvi til vega frá viðkomandi pørtum, eitt nú frá traðaeigarum og náttúrufriðingar myndugleikanum, soleiðis at arbeiðið kann fara í gongd..

Kostnaður í alt: 2.273.127 kr. v/mvg
Av tí at gøtan gongur gjøgnum nógvar privatar traðir, so verður mett neyðugt við 200.000 kr. til óvæntaðar útreiðslur.

Ad. 2 - Gøtusamband millum gomlu Vatnbrunnarnar í Grásteinsgøtu og Rossagøtuna sí j.nr. 18/00992-39. Gøtan er koyrd í útboð, og ástaðarfundur var á gøtuni 25. mars. Freistin hjá veitarum at senda tilboð inn er 12 apríl. Arbeiðið fevnir um at gera eina lendisgøtu við trappu. Samlaða longdin á gøtuni er 110 m.

Mettur kostnaður fyri arbeiðið er áleið 600.000 kr.

Ad. 3: Framhald av gøtu Frammi í Dal, Kollafjørður, sí j.nr. 18/00992-40.
Umsitingin hevur sent eitt svarskriv um játtan á kr. 300.000, samtykt í býráðnum 25. februar, til lokalu borgararnar, sum standa fyri arbeiðinum á hesi gøtuni.
Hetta arbeiðið verður framt í ár sambært avtalu.

Ad. 4: Gøta frá Boðanesið út á Hvítasand sí j. nr. 18/00992-41
Gøtan varð koyrd í útboð í mars mánað, og hevur ástaðarfundur verið á gøtuni 19. mars. Samlaða longdin á gøtuni er umleið 250 m.

Somu veitarar, sum til gøtu 1, vórðu bjóðaðir at luttaka, og hava 7 bjóða uppá arbeiðið:

| | |
|---|---|
| Veitari 1: | 172.500 kr. |
| Veitari 2: | 181.427 kr. |
| Veitari 3: | 275.000 kr. |
| Veitari 4: | 311.250 kr. |
| Veitari 5: | 349.750 kr. |
| Veitari 6: | 402.250 kr. |
| Veitari 7: | 404.417 kr. |

Prísir eru uttan MVG. Mælt verður til, at fara undir samráðingar við veitara 1, sum eigur lægsta tilboðið uppá arbeiðið, umframt at fáa neyðugu avtalur og loyvi til vega frá viðkomandi pørtum, eitt nú yvirfriðingarmyndugleikanum.

Kostnaður íalt við MVG er 200.000 kr.

Ad.5 - Gøta kring vatnbrunnin í Havnardali, sí j.nr. 18/00992-045
Afturat omanfyri nevndu gøtum er uppskot til gerð av gøtu kring vatnbrunnin í Havnardali (sí hjálagda kort). Uppskotið kann síggjast sum partur av frílendisætlanini fyri Havnardal, har endamálið er at skipa og varðveita økið sum frítíðarøki til almenningin.

Samlaða longdin av gøtuni er áleið 1260 m, og gongur gøtan gjøgnum landsjørð umframt kommunalt lendi. Neyðugt verður at fáa loyvir frá avvarðandi festarum, soleiðis at gøtan kann ganga gjøgnum teirra lendir.

Ætlanin er at bjóða gøtuna út til royndar veitarar. Tá tilboð fyriliggur, verður tað lagt aftur í nevnd til kunningar. Fyri at seta fyrireikingar/arbeiðið í gongd verður mælt til at játta 1.000.000 kr. til gøtuna.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:
- At farið verður undir at fáa neyðugu avtalur og loyvi frá viðkomandi pørtum til gerð av nevndu gøtu 1, 2, 4 og 5.
- at játta í alt kr. 4,3 mió. kr. av konto 6275, L00001 Løgukarmur fyri árið, til konto 6275, L62019 Lendisgøtur, til gerð av niðanfyri nevndu gøtum:

| Gøta – heiti: | Kostnaður: |
|---|---:|
| Gøta 1 - Framhald av gøtuni fram við Sandá úti í Havnardali: | 2.473.127 kr. |
| Gøta 2 - Gøtusamband millum gomlu Vatnbrunnarnar í Grásteinsgøtu og Rossagøtuna | 600.000 kr. |

| | |
|---|---:|
| Gøta 4 – Gøta út á Hvítasand | 200.000 kr. |
| Gøta 5 – Gøta kring vatnbrunnin í Havnardali | 1.000.000 kr. |

- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. apríl 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 21. apríl 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 29. apríl 2021:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í sambandi við víðkan av gøtukervinum í Tórshavnar kommunu er ætlanin at raðfesta fylgjandi gøtustrekkir í árinum 2022.

1. Gøta í Hoydølum, frá Sanatoriivegnum til Hoyvíksvegin
2. Gøtur, ið samanbinda verandi gøtukervi í Sortudíki
3. Gøta í Viðarlundini í Gundadali
4. Gøta oman á Sandagerði argjamegin
5. Gøta niðan á Hoyvíksvøll frá Jørundargøtu
6. Gøtuni kring vatnbrunnin í Havnardali
7. Gøtan á Hvítasand, fylgiarbeiði

Sí journal nr. 18/00992-51

Stórur tørvur er á at viðlíkahalda verandi gøtukervi í kommununi og tí er ynskiligt at partur av játtanini til gøturnar fer til hetta í 2022.

Ad. 1 – Gøta í Hoydølum, frá Sanatoriivegnum til Hoyvíksvegin
Ein gøta á áleið 400 metrar, sum samanbindur Sanatoriivegin við Hoyvíksvegin. Henda gøtan er í Boðanesætlanini nevnd sum høvuðsgøta í frílendinum og kemur at geva møguleika fyri enn betur túrum í økinum. Gøtan liggur á landsjørð og má tí gerast í samráð við Umhvørvisstovuna, sum umsitur lendið.
Á fløtuni í Hoydølum varð fyrsti fótbóltsvøllur í Havn og ynski er um at vísa á hetta søguliga stað á leiðini. Ætlanin er at gera hetta við eini minnisplátu við mynd av fyrsta fótbóltsdystinum millum HB og TB, sum var 18. juli 1909.

Ad. 2 – Gøtur, ið samanbinda verandi gøtukervi í Sortudíki
Nógv ymisk gøtustrekki eru gjørd í Sortudíki, Gundadali og á Ternuryggi, men summi gøtustrekki mangla og tí er ikki møguligt at ganga allan vegin frá Ternuryggi og oman til Gundadal ella yvir til Svartafoss gjøgnum tað grøna lendið. Við at gera hesi gøtustrekkini, verða verandi gøtur samanbundnar. Talan er um ymisk gøtustrekki á áleið 590 metrar tilsamans.

Ad. 3 Gøta í Viðarlundini í Gundadali
Verandi gøtukervi í Viðarlundini í Gundadali er væl útbygt við nógvum góðum gøtum og hesar verða eisini nógv brúktar av borgarunum úr øllum býnum.
Við verandi gøtukervi er tó ikki møguligt at ganga ein langan rundtúr inni í viðarlundini.
Við at gera eitt 200 metrar gøtustrekki, kann verandi gøtukervi knýtast saman og møguligt verður at ganga ein langan samanhangandi túr inni í Viðarlundini.
Arbeiðið við gøtuni skal gerast í samráð við Skógrøktina.

Ad. 4 – Gøta oman á Sandagerði Argjamegin

Ynskiligt er at skapa betur samband oman á Sandagerð við at gera eina atkomu oman á sandin argjamegin. Talan er um eina gøtu, sum gongur frá Rættargøtu, gjøgnum stykkið, sum tilhoyrir festinum í Sandagerði og oman á sandin. Loyvi krevst frá umsitarunum av festinum í Sandagerði og frá fríðingarmyndugleikunum at fara í holt við hesa gøtu.

Ad. 5 Gøta niðan á Hoyvíksvøll

Eigarafelagið Jørundar- og Torkilsgøta eftirspyr, at sambandið niðan á Hoyvíksvøll verður betur. Ymiskir møguleikar eru fyri hvussu hetta sambandið kann betrast, og umsitingin ynskir at fara í samskifti við eigarafelagið um at fáa gjørt eina góða gøtu millum Jørundargøtu og Hoyvíksvøll.

Ad. 6 Gøtan kring vatnbrunnin í Havnardali

Fyrireikingar til gøtuni kring vatnbrunnin í Havnardali eru farnar í gongd í 2021 og arbeitt verður víðari við hesi ætlan í 2022.

Ad. 7 Gøtan á Hvítasand, fylgiarbeiði

Gøtan er komin væl áleiðis og verður liðug í vár, og nøkur fylgiarbeiði, onkur átrokandi, eiga at verða gjørd sum avleiðing av gøtuni, ið er gjørd.
Tilfar sum lá í grótbrotinum á Boðanesi varð brúkt til gøtuna, soleiðis at bergið nú er fríttlagt. Neyðugt er at skróta bergveggin, fyri at leyst grót ikki ríður oman. Gøtan frá høvuðsvegnum og oman treingir til at verða sett í stand, jaðarin framvið hampaður og veitin reinsað, soleiðis at vatn verður hildið frá gøtuni.
Ein fløta er nú við økið, har gøtan á Hvítasand byrjar, har gamla grótrúgvan er ruddað og koyrd burtur. Ynskiligt er, at leggja skorið grót frá gamla grótídnaðinum á hesa fløtuna, til borð/stólar at fríðka um og skipa økið til uppihald.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:
- At farið verður undir fyrireikingararbeiðið til gøtu 1-5, fyri síðani at venda aftur í avvarðandi nevndir við eini ætlan og tilboði fyri gerð av gøtunum.
- At játtaðar verða kr. 1.000.000 av L62019 til viðlíkahald av gøtukervinum í kommununi og verða fluttar á konto 6212
- At játtaðar verða 150.000,- kr. av L62019 til gøtu 7, og verða fluttar á L62019 Boðanes-Hoydalsætlanin
  At málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. februar 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 16. februar 2022:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini við teirri viðmerking viðvíkjandi teimum 150.000 kr., at hesar verða fluttar av LK62019 Løgukarmur fyri lendisgøtur yvir á L62019 Boðanes-Hoydalsætlanin. Málið beint í býráðið til tvær viðgerðir – tí talan lutvíst er um eykajáttan.

**Býráðsfundur 24. februar 2022:** Borgarstjórin mælti býráðnum til at taka undir við fíggjarnevndini við teirri broyting, at tær 150.000 kr. verða fluttar av LK62997 Løgukarmur fyri lendisgøtur yvir á L62019 Boðanes-Hoydalsætlanin.

Atkvøtt varð um málið við fyrstu viðgerð, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri, einari blankari og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jóhan Petur Johanesen, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Jákup Dam, Gunvør Balle, Annika Olsen, Birgir Nielsen og Ruth Vang.

Blankt atkvøddi: Elsa Berg

Málið beint víðari til aðru viðgerð.

**Býráðsfundur 24. mars 2022:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri, einari blankari og ongari ímóti við aðru viðgerð.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Elsa Berg, Jákup Dam, Gunvør Balle, Annika Olsen, Birgir Nielsen og Ruth Vang.

Blankt atkvøddi: Annfinn Brekkstein.

## 61/22 Útstykking oman fyri Argjahamar

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 10.05.2021 | 102/21 | 21/01777-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 19.05.2021 | 115/21 | 21/01777-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 16.06.2021 | 162/21 | 21/01777-1 |
| 4 Býráðsfundur | 23.06.2021 | 180/21 | 21/01777-1 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.09.2021 | 143/21 | 21/01777-1 |
| 6 Tekniska nevnd | 13.09.2021 | 52/21 | 21/01777-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 22.09.2021 | 216/21 | 21/01777-1 |
| 8 Býráðsfundur | 30.09.2021 | 224/21 | 21/01777-1 |
| 9 Tekniska nevnd | 07.03.2022 | 22/22 | 21/01777-1 |
| 10 Byggi- og býarskipanarnevndin | 22.03.2022 | 76/22 | 21/01777-1 |
| 11 Fíggjarnevndin | 23.03.2022 | 93/22 | 21/01777-1 |
| 12 Býráðsfundur | 24.03.2022 | 61/22 | 21/01777-1 |

**Upprunin til málið**
Stóri bústaðartørvurin í Tórshavnar kommunu.

**Lýsing av málinum**
Tórshavn eins og aðrir høvuðsstaðir er í teirri støðu, at tey flestu vilja búgva her. Sum høvuðsstaðarkommuna mugu vit ganga á odda til tess at finna loysnir á bústaðarøkinum. Í hesari tilgongd vilja vit skapa eina burðardygga býarmenning, har rúm er fyri øllum, har vit tætta býin og har vit gagnnýta býin skynsamari. Harumframt er tað týdningarmikið, at vit sum kommuna standa á odda fyri at veita fjølbroyttar bústaðir, bæði eigara- og leigubústaðir.

Stórur fólkavøkstur er, umframt at húskini minka alsamt. Kommunuætlanin frá 2020 vísir á, at tørvur verður á íalt 10200 bústøðum í 2032 roknað frá 2018.

Tískil er tað týdningarmikið, at kommunan eisini sjálv stendur á odda fyri at veita borgarum bústaðir, samstundis sum hon samstarvar við virkandi innan privatu vinnuna um partar av hesi uppgávuni.

Bústaðarsløgini eru vanliga býtt upp í sethús, tvíhús/raðhús og íbúðir. Tað eru nógv sum ynskja at búgva í sethúsum, umframt at vit síggja ein størri og størri áhuga fyri íbúðum. Enn manglar kommunan eitt útboð av leigubústøðum, meðan vit hava seinastu árini havt nógvar útstykkingar við íbúðum.

Kommunuætlanin vísir á ymisk lendi til býarvøkstur, har Stóratjørn stendur at verða best egnaða lendið til býarvøkstur og økið Klingurstjørn er næstbesta staðseting. Arbeitt verður við ætlanunum á Stórutjørn, og er ætlanin nú at fara í gongd við eina ætlan oman fyri Argjahamri, sí kortskjal nr. 21/01777-3, Uppskot til útstykking oman fyri Argjahamri.

Viðlagda kortskjal er ein skitsa av hvussu økið kann verða skipað við bústøðum, bæði set- , raðhúsum og íbúðum, umframt at øki verður lagt av til møguliga stovnsbygging. Neyðugt verður at umsitingin tillagar

uppskotið, soleiðis at skipanin av økinum verður nøktandi, umframt at hetta kortskjalið er ikki heilt í samsvar við tað, sum er avtalað við festaran á økinum. Ymisku byggistigini síðani skulu projekterast.

Lendið, matr. nr. 4a, sum ætlanin er at fara undir at skipa til bústaðarbygging og stovnsbygging, er ogn hjá Búnaðarstovuni, har Poul Müller er festari á lendinum. Samlaða økisvíddin, sum er avtalað við festaran at fara undir at skipa sæst á kortskjalinum nr. 21/01777-6, Lendi at keypa frá Búnaðarstovuni til nýggja útstykking, er sambært kortskjalinum uml. 128.000 fermetrar til støddar.
Uppskot til ætlanaravtalu við festaran er gjørd og viðheft, sí skjal nr. 21/01777-4, Uppskot til ætlanaravtalu millum Tórshavnar kommunu og Poul Müller.

Ætlanaravtalan fevnir bæði um lendið til útstykking, umframt lendið til Viðarlund, matr. nr. 4a og matr. nr. 43a, sí kortskjal nr. 21/01777-5, Argjahamri_Viðarlund.

Samanlagt er talan um á leið 163.000 $m^2$, ið Tórshavnar kommuna skal keypa og frábýta frá Búnaðarstovuni til ætlaðu útstykkingar- og frílendisendamál.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Lóg um landsjørð

**Upplýsingar frá umsitingini**
Støða skal takast til, hvat slag av bústøðum økið skal skipast til, hvussu stór grundstykkini skulu vera og hvussu fríøkini í útstykkingini verða skipaði og tryggjaði. Harumframt er týdningarmikið, at útstykkingin í størstan mun tillagar seg lendið og at eitt nú leiðin niðan á Kongavarða verður varðveitt.
Ein umhvørvis árinismeting eigur at verða gjørd av lendinum, áðrenn farið verður undir at skipa tað endaligt, soleiðis at atlit kunnu verða tikin til serlig viðurskiftir í økinum.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
-

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Skjøl**
21/01777-3, Uppskot til útstykking oman fyri Argjahamri
21/01777-4, Uppskot til ætlanaravtalu millum Tórshavnar kommunu og Poul Müller
21/01777-5, Argjahamri_Viðarlund
21/01777-6, Lendi at keypa frá Búnaðarstovuni til nýggja útstykking

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:
- At lendið, sambært kortskjali 21/01777-6, verður lagt av til nýggja útstykking í kommununi, og at umsitingin fer undir at skipa økið neyvari.

- At heimila umsitingini at bjóða projekteringina út.
- At ætlanaravtalan, skjal nr. 21/01777-4, verður samtykt.
- At heimila umsitingini at søkja Búnaðarstovuna um at keypa lendið sambært kortskjali 21/01777-5 og 21/01777-6.
- At málið verður beint aftur í nevnd, tá samlaði lendiskostnaðurin er kendur.
- Og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. mai 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 19. mai 2021:** Samtykt at taka undir við Byggi- og býarskipanarnevndini.

**Ískoyti:**
Tórshavnar kommuna hevur fingið tilsøgn frá Búnaðarstovuni um keyp av lendi til ætlaðu útstykkingina á Argjahamri. Umsóknin hevur verið til ummælis hjá festaranum, sum ikki hevur viðmerkingar til ætlanirnar hjá kommununi. Kommunan skal rinda umleið 15 mió. kr. fyri at ogna sær lendið v.m., og kemur hesin peningur heilt ella lutvíst inn aftur, tá ið grundøkini í útstykkingini verða seld. Mælt verður til at fíggja keypið av tøkum peningi.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og at játta kr. 15 mió. av tøkum peningi til keyp av lendi til nýggja útstykking omanfyri Argjahamar og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 16. juni 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Ískoyti:**
Í tilsøgn dagfest 16. juni 2021 hevur Búnaðarstovan útgreinað samlaða kostnaðin, ið Tórshavnar kommuna skal rinda fyri útvegan av lendi til ætlaðu útstykkingina omanfyri Argjahamar. Samlaðu útreiðslurnar fyri kommununa verða umleið 13 mió. kr., ið mælt verður til at játtað av tøkum peningi.

**Býráðsfundur 23. juni 2021:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Tá Tórshavnar kommuna hevur fingið til vega lendið oman fyri Argjahamar og Klingurstjørn, og lendið sunnan fyri verandi útstykking á Hamrinum, er neyðugt við eini tilgongd at fyrireika økið til byggibúning.

Lendið oman fyri Argjahamar og Klingurstjørn og lendið uttan fyri Argjahamar er soleiðis háttað, at tað er av størsta týdningi, at greiða fyrst fæst á, hvussu infrakervið í økinum verður skipað fyri á optimalan hátt at knýta saman byggilendi. Eisini er neyðugt út frá hesum at gera skipanaruppskot fyri byggingina, grøn øki, parkering o.s.fr. Til hetta krevst ein projektering av vegum, leiðingum og møguligum byggiøkjum í 3D.

Mett verður, at hetta projekteringsarbeiðið til skipanaruppskot í fyrstu syftu kann gerast av uttanhýsis ráðgeva innan fyri eina rammuupphædd á kr. 200.000,-. Málið verður lagt aftur fyri nevnd, tá innleiðandi projekteringsarbeiðið er komið á mál uml. einar 4 vikur eftir at peingurin er játtaður.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin, og býarverkfrøðingurin mæla til, at játtaðar verða kr. 200.000,- av konto 8175, LK81042, Vegaverkætlanir á nýggja verkætlan, "Útstykking oman fyri Argjahamar" undir kt. 6475, Byggibúning bústaðir, og at málið verður beint í býráðið umvegis teknisku nevnd og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. september 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 13. september 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 22. september 2021:** Samtykt at taka undir við byggi- og bárskipanarnevndini og teknisku nevnd við teirri broyting, at peningurin verður játtaður av kto 6475 og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. september 2021:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Prosjekteringsarbeiði til skipanaruppskot er framt og handað umsitingini. Arbeitt verður fram ímóti, at gera útboðstilfar, at bjóða arbeiðið út eftir. Til hetta arbeiðið og onnur arbeiðir í sambandi við fyrireikingar av útstykkingini verður mett, at tørvur er á upp til kr. 2.000.000,- í 2022.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at játtað verður kr. 2.000.000,- á verkætlan L64019 Útstykking oman fyri Argjahamar undir konto 6475 Byggibúning bústaðir, at fremja fyrireikingararbeiði til at seta útstykkingararbeiðið í gongd. Hetta verður fíggjað av keyp og sølu.

**Tekniska nevnd 07. mars 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Tá tað í heyst varð farið undir at skipa útstykkingina oman fyri Argjahamar, tá var hægsta raðfestingin at fáa lagt vegin so skynsamt sum gjørligt í lendið, fyri síðani at planleggja ítøkiligu bygginga á staðnum. Yvirskipaða skipanin av økinum er nú liðug og sæst á hjálagda skjali "*Uppskot_Útstykkingar oman fyri Argjahamar_Støðumynd*" j.nr. 21/01777-30.
Hendan skipanin, í mun til hvørji bústaðarsløg í síðsta enda fara at verða loyvd í økinum, kann broytast í tilgongdini, men er ætlanin at fyrihalda seg í størstan mun til hesa skipanina.

Sum omanfyri greitt frá, so hevur tað alla tíðina verið týdningarmikið at fáa lagt vegin rætt, og er fyrsta strekkið av vegnum nú liðugt projekterað og klárt at bjóða út. Talan er um vegastrekkið frá rundkoyringini á Argjahamri og út til vegin hjá festaranum, sum leiðir allan vegin út í grótbrotið á Glyvursnesi. Hetta strekkið, sum verður boðið út, er uml. 600 m.

Til hetta ítøkiliga vegastrekkið, sum verður ein sambindingarvegur í útstykkingini, knýta so hinir vegirnir seg í, og útfrá teimum verða so áleið 200 bústaðir og barnagarðurin knýttir í.

Ætlanin er, at hetta ítøkiliga vegastrekkið verður fíggjað av komandi bústøðum og barnagarðinum. Hetta er líknandi tilgongd, sum vit kenna frá eitt nú Løgmannabreyt og Karlamagnusarbreyt.

Ætlanin er at fara undir framhaldandi projekteringina av útstykkingini beinanvegin, soleiðis at tá sambindingarvegurin, sum nú fer í útboð, er liðugt bygdur, so er klárt at fara undir írestandi vegir og fyri síðani at bjóða økir til bústaðarbygging út.

Til hesir arbeiðir verður mettur ein fíggjarligur tørvur á kr. 6 mió. har uml. 4 mió. kr. fara til bygging av sambindingarvegnum og 2 mió. kr. fara til framhaldandi planlegging og projektering av útstykkingini.

Ætlanin er at játta peningin av tøkum peningi, sum krevur tvær viðgerðir í býráðnum. Til aðru viðgerð í býráðnum er ætlanin at koma við eini nærri lýsing av málinum, har ein ítøkilig tíðarætlan, kostnaðarætlan og søluætlan fyriliggja.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og býararkitekturin mæla til:

- At heimila umsitingini at bjóða sambindingarvegin út og at gera sáttmála við vinnandi arbeiðstakaran.
- At heimila umsitingini at halda fram við projekteringini av útstykkingini.

- At játta kr. 2.000.000,- á verkætlan L64019 Útstykking oman fyri Argjahamar undir konto 6475 Byggibúning bústaðir, fíggjað av tøkum peningi.
- At játta kr. 4.000.000,- á verkætlan L64019, Útstykking oman fyri Argjahamar undir konto 6475 Byggibúning bústaðir, fíggjað av tøkum peningi.
- Verkætlanin verður eftir ætlan fíggjað við inntøku frá sølu av grundstykkjum til bústaðir og barnagarð innanfyri umleið 1 ár.
  At beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina sum eykajáttan, ið krevur tvær viðgerðir í býráðnum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. mars 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 23. mars 2022:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. mars 2022:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð.

# 62/22 Heildarætlan fyri Karlamagnusarbreyt

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 10.03.2020 | 13/20 | 20/00622-1 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 01.04.2020 | 61/20 | 20/00622-1 |
| 3 Tekniska nevnd | 09.06.2020 | 31/20 | 20/00622-1 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 10.06.2020 | 128/20 | 20/00622-1 |
| 5 Ferðslunevndin | 24.06.2020 | 16/20 | 20/00622-1 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.03.2021 | 42/21 | 20/00622-1 |
| 7 Tekniska nevnd | 08.03.2021 | 18/21 | 20/00622-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 17.03.2021 | 57/21 | 20/00622-1 |
| 9 Býráðsfundur | 25.03.2021 | 89/21 | 20/00622-1 |
| 10 Býráðsfundur | 29.04.2021 | 120/21 | 20/00622-1 |
| 11 Tekniska nevnd | 07.03.2022 | 19/22 | 20/00622-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | 16.03.2022 | 75/22 | 20/00622-1 |
| 13 Býráðsfundur | 24.03.2022 | 62/22 | 20/00622-1 |

**Upprunin til málið:**
Bygging á Karlamagnusarbreyt er komin væl ávegis, og eru flestu økini bygd ella er bygging í gongd. Sum økið við Karlamagnusarbreyt nærkast at verða liðugt, vísir tað seg at nógvar avbjóðingar eru í økinum. Økið er sera tætt bygt, og er týdningarmikið at tær ymisku avbjóðingarnar verða loystar í einari heildarætlan.

Tí er avgjørt at umsitingin fer undir eina tilgongd saman við borgarunum og áhugaðum í økinum fyri at gera eina tillagaða heildarætlan fyri Karlamagnusarbreyt.

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Umsitingin er farin undir eina tilgongd, har endamálið er, at ein tillagað heildarætlan fyri Karlamagnusarbreyt verður gjørd.

Økið við Karlamagnusarbreyt hevur í verandi støðu fleiri avbjóðingar. Avbjóðingarnar kunnu í høvðusheitum deilast upp í trý evni: ógreið parkeringsviðurskifti, ringar umstøður til gongu- og súkkluferðslu og manglandi fríøki til borgararnar.

Heildarætlanin skal bæði vísa á loysnir uppá tær nágreiniligu avbjóðingarnar í økinum, men hon skal eisini koma við einum boði uppá hvussu økið kann fríðkast og Karlamagnusarbreyt kann gerast ein grøn og vøkur býargøta við trivnaði í hásæti.

Umsitingin hevur í eina tíð arbeitt uppá at greina tær veruligu avbjóðingarnar í økinum og hevur eitt boð uppá møguleikar fyri at loysa hesar avbjóðingarnar.
Í hesum sambandi verður farið undir eina tilgongd saman við borgarunum í økinum og teimum sum hava sína dagligu gongd í økinum. Tey eru boðin inn til verkstovur, har tey fáa møguleikan at vísa á teirra fatan av hvørjar avbjóðingar og hvørjir møguleikar eru fyri loysnum.

Aftaná at verkstovurnar hava verið, samlar umsitingin heildarætlanina fyri Karlamagnusarbreyt, við støði í loysnum sum hava verið viðgjørdar á verkstovunum við borgarar í økinum.
Heildarætlanin verður í framtíðini grundarlag fyri menning av økinum við Karlamagnusarbreyt.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
20/00040 Skipan av økinum kring Hoyvíksvøll

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
20/00622-5 Viðmerkingar frá borgarum
20/00040-1 Skipan av økinum kring Hoyvískvøll
20/00622-7 Parkeringstørvur
20/00622-8 Kostnaðaryvirlit – ikki endaligt

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Kunnað verður um málið.

**Tekniska nevnd 10. mars 2020:** Kunnað varð um málið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 01. apríl 2020:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Orsakað av koronasmittu, vórðu allar borgaraverkstovurnar avlýstar og ístaðin varð skipað fyri einari talgildari borgaraluttøku, har borgarar fingu møguleikar at siga teirra meining um Karlamagnusarbeyt og koma við ynskjum til betringar. Talgilda luttøkan lá opin í 3 vikur, og komu svar frá 233 borgarum.
70 frá íbúgvum á Karlamagnusarbreyt, 127 frá íbúgvum í búgva í grannalagnum og 36 frá fólki aðrastaðni í kommununi.

Nógvar viðmerkingar vóru afturvendandi. Allar viðmerkingarnar eru skrásettar og flokkaðar (sí skjal 'viðmerkingar frá borgarum'). Út frá hesum og vitan, sum kommunan longu hevur um øki, eru serliga fýra evnir, ið ganga aftur.
Hesi evnini eru við til at skapa grundarlagið í uppskoti til endurskoðan av Karlamagnusarbreyt 20/00622-7 Plantekning 05.06.20

- **Parkering**

Tá alt er bygt liðugt á Karlamagnusarbreyt er tørvur á uml. 600 p-plássum. Verandi øki, ið eru avsett til parkeringspláss rúma uml. 580 pláss (sí skjal 20/00622-7 parkeringstørvur. Parallell- og lodrættparkering er teknað inn á øll øki har, sum pláss er fyri at venda einum bili. Millum bygningarnar, har parkering ikki rúmast, er grøn fríøki teknað inn. Í uppskotinum hava øll parkeringspláss grønar eindir, so sum gróðurseting við innkoyringarnar og summi hava grasarmering.
Sum nú er, eru øki til rusk ikki skipað á økinum. Ruskinnsavningin hevur gjørt vart við, at ruskbilurin hevur avbjóðingar við at sleppa til felags ruskøkini. Tískil eru felags ruskstøðir teknaðar inn á tvey tey fyrstu p-plássini á 12 parkerings økjum javnt býtt niðaneftir Karlamagnusarbreyt. Hugskotið er, at allar ruskstøðirnar skulu vera eins og vera eitt estetiskt íkast til økið.

- **Gøtu og gonguleiðir**

Gonguteigar eru gjørdir millum allar bygningarnar og fram við allari Karlamagnusarbreyt. Harafturat eru snargøtur ætlaðar fyri at binda ymsu økini saman, skapa trygd frá bilum og fyri at skapa styttri leiðir til t.d. bussin.

- **Vegurin Karlamagnusarbreyt**

Allur vegurin skal skipast av nýggjum. Ætlanin er at skipa vegin við einvegis ferðslu, soleiðis at tað einans verður loyvt at koyra niðaneftir. Ferðsluforðingar, sum eru gróðursettar á vegnum, verða gjørdar fyri at raðfesta trygdina hjá fólki, ið ikki eru í bili. Neyðugt verður við parkering fram við vegnum í støðum. Og av tí at ferðslan er einvegis verður hetta ikki ein trupulleiki, tí vegurin er nóg breiður.

- **Fríðkan og umskapan av økinum í mun til trivna**

Fyri at skapa litir og ein øðrvísi dám í økinum, er ætlanin at gróðurseta við innkoyringina millum allar bygningarnar, á vegunum sum ferðsluforðingar og í skráum við Bertrugøtu, Maritugøtu og millum Ingibjargargøtu/Torkilsgøtu.
Harafturat verður tað gróðursett millum øll øki har, sum tað hóskar.
Uppskot til skipan av Hoyvíksvølli er gjørt, og sent til hoyringar hjá avvarðandi feløgum og felagsskapum. Økið við Hoyvíksvøll er m.a. skipað við inngongd til vøllin, einari sititrappu til áskoðarar, einum felagshúsi/skýli og parkeringsøki (sí skjal 20/00040 plantekning - Skipan av økinum kring Hoyvíksvøll).
Ynskiligt er at skipa økið framman fyri Hoyvíkar Kirkju sum eitt alment torg, sum borgarar kunnu brúka til uppihald og felagsátøk.

**Skjøl:**
20/00622-5 viðmerkingar frá borgarum
20/00622-7 parkeringstørvur
20/00622-7 Plantekning 05.06.20
20/00040-2 plantekning – skipan av økinum kring Hoyvíkvøll

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla teknisku nevnd og býarskipanarnevndini til:

1. at umrøða uppskot til heildarætlanina
2. at koyra uppskotið til heildarætlan út til almenna hoyring
3. at tillagaða heildarætlanin skal leggjast fyri aftur til politiska støðutakan, tá hon er tillagað í mun til innkomnar viðmerkingar.

**Tekniska nevnd 09. juni 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. juni 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ferðslunevndin 24. juni 2020:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Heildarætlanin varð framløgd á borgarafundi á skúlanum við Løgmannabreyt í okt. 2020. Nógv fólk var til borgarafundin, og nógvar viðkomandi viðmerkingar vóru til ætlanina.
Heitt varð á íbúgvararnar í økinum um at skipa seg í eigarafeløg fyri tey 6 økini, sum Karlamagnusarbreyt er skipað eftir, soleiðis at samskifti millum kommunu og borgararnar í økinum er umboðandi áhugan í økinum. Skriv er eisini sent út til umboð fyri økini, um at royna at skipa seg í eigarafelag, ella at velja umboð fyri hvørt øki, at hava samskifti við kommununa um ymisku felags viðurskiftini.
Á borgarafundinum varð serliga gjørt vart við manglandi parkeringsplássini í økinum. Tikið varð ikki undir við loysnini at gera parkering og gjøgnumkoyring við Hoyvíkar skúla. Heldur varð heitt á Býráðið um at taka nøkur stykkir innaftur, soleiðis at parkeringstørvurin minkar, og at parkeringin kann skipast á innafturtiknu stykkjunum. Gjørt varð eisini vart við tørvin á felagsøkjum og fríðkan í økinum, at gera tryggari skúlaleiðir. Tikið varð ikki undir við at einsrætta Karlamagnusarbreyt, víst varð á trupulleikarnar við hesi loysn.
Borgarar í økinum hava síðani heitt á kommununa um at fyrireika økið, so at løðistøðir til el-bilar lættliga kunnu fremjast, tá ið eigarafeløgini ynskja tað.
Somuleiðis hava borgarar víst á at ruskinnsavningin er óskipað, og somuleiðis hevur ruskinnsavningin gjørt vart við, at tørvur er á at fáa skynsama loysn til bingjur í økinum, til burturkast, glas og papp.

Aftaná fundin varð farið undir átøk at betra um skúlaleiðir hjá børnum og at fríðka um økið.
- Gøta javnfjar millum Karlamagnusarbreyt og Bertugøtu er framd.
- Gróðurseting við Myllutjørn er framd.
- Gróðurseting við parkeringsøki er framd

Harumframt eru fleiri reinsiverk gjørd, at betra um kloakkskipanina í økinum.

Ferðsluserfrøðingar gjørdu í desember ferðslukanningar og gjørdu uppskot til hvørjar ferðsluloysnir hóska best til økið. *Sí skjal J. Nr. 20/00622-24 Ferðsluplanlegging útgáva 22.01.21.pdf*

Umsitingin hevur tillagað heildarætlanina, við støði í viðmerkingum á borgarafundinum, sí skjal *20/00622-30 KMB samlað* og *20/00622-30 Framløga politiska viðgerð 2021* og mælir til hesi átøk:

- Aftaná borgarafundin hevur Býráðið keypt 2 stykkir aftur, sum parkering kann skipast á. Á hetta økið fáast uml 85 parkeringspláss, og eigur hetta at vera sett í verk beinanveg. Møguligt er at fáa fleiri parkeringspláss á økið, umframt at økið kann innrættast til eitt felagsøki, men hetta krevur at økið verður raðfest sum ein verkætlan.
- Innkoyringin til Skúlan á Løgmannabreyt verður umskipað, soleiðis at sýnið verður betri, og parkeringin verður eisini umskipað.
- Vegurin verður 30 km/t vegur, og verður skipaður, soleiðis at gongubreyt er á báðum síðum, gøtuljós verða sett í gongubreytarkantin, súkklur og bilar deilast um vegbanan, 2 minus 1, og við vegamót verða 'rumlur' við chaussesteinum ella líknandi, so mint verður á at halda lága ferð, umframt at plantað og fríðkað verður á økinum.
- Vegurin verður ikki einsrættaður, men innkoyring bannað frá vegamótinum Skúlin á Løgmannabreyt omaneftir. Hetta fyri at fáa ovaru økini í Hoyvík at koyra omaneftir Løgmannabreyt heldur enn gjøgnum Karlamagnusarbreyt. (hetta er eitt ynski frá borgarum í økinum).
- Dragirør verða løgd til øll parkeringsøki, so nøktandi ljós kann tryggjast í økinum.
- Spæli- og trivnaðarøki verða gjørd.
- Farleiðir og gøtur verða gjørdar at bøta um skúlaleiðirnar.

- Fleiri øki, serliga tey, ið ikki kunnu rúma parkering, verða løgd við grasarmering heldur enn asfalt, fyri at fríðka um.
- Uppskot er gjørt til standardleist, at skipa ruskøki við øll parkeringsøki, sum eigarar eiga í felag. Vatn og frárenningar skulu leggjast til hesi øki, ið eisini kunnu fyrireikast til postkassar og framtíðar talvur til el løðistøðir.
- Støða skal takast til, um hendan loysnin skal góðkennast av eigarafeløgunum, hvussu hetta kann skipast og hvør skal gjalda fyri felags skipanina.
- Ynskir Tórshavnar kommuna at gjalda fyri hesa loysnina fyri eigarafeløgini, um tey taka undir við teimum.
- Dragirør verða løgd í tey økini sum ikki eru asfalterað, soleiðis at billøðistøðir lættliga kunnu setast, tá ið eigarafeløgini ynskja tað.

Parkeringin:
Við hesum uppskotinum fáast 503 parkeringspláss afturat teimum 91, sum hoyra til Skúlan við Løgmannabreyt.
Sambært givnum byggiloyvum higartil, er tørvur á 464 parkeringsplássum.
Tá ið alt økið er fult útbygt, verður tørvur á 525 parkeringsplássum at nøkta krøv sambært byggisamtyktini. Hesin tørvur kann røkkast, um afturkeyptu matriklarnir verða innrættaðir við einum parkeringshúsi ella við einum parkeringsdekki.

Fleiri av omanfyri nevndu átøkunum kunnu metast sum Skjótt Syftir Seiðir, og kunnu setast í gongd skjótt.

Størri átøk ella Tyngri Tøk eru eisini neyðug í sambandi við liðugtgerð av Karlamagnusarbreyt, og skulu loysast og prosjekterast sum serstakar verkætlanir.

Av hesum kunnu nevnast:
- Torg til Hoyvíkar kirkju.
- Parkeringshús/borgarahús/felagshús á afturkeyptu stykkjunum.
- Trivnaðarøki við Atlagøtu.
- Farleið gjøgnum grøna geiran millum fótbóltsvøllin og Atlagøtu.

Av omanfyrinevndu átøkunum verður mælt til beinanvegin at fara undir tey átøkini, sum eru serliga átrokandi og kunnu lýsast sum Skjótt Syftir Seiðir.

Hesi eru:
- Umskipan av innkoyring við Skúlan við Løgmannabreyt, og skipan av parkering og fríðkan á økinum.
- Inn- og útkoyring frá Atlagøtu til Bónus
- Skipa parkering á afturkeyptu stykkjunum, planta og fríðka
- Gongubreytir frá Atlagøtu til Skúlan við Løgmannabreyt, (vegur 2 og 3)
- Dragirør og fyrireikingar til framtíðarloysnir í sambandi við asfaltering.

Heildarætlanin er ikki prosjekterað, og kostnaðarmeting er ikki gjørd av arbeiðinum. Mælt verður til at 8 mió. verða settar av til arbeiðið í 2021.

Skjøl:
20/00622-24 Ferðsluplanlegging útgáva 22.01.21.pdf
20/00622-30 KMB Samlað
20/00622-30 framløga politiska viðgerð 2021

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til, at
1) tikið verður undir við heildarætlanini fyri Karlamagnusarbreyt,

2) seta átøkini nevnd sum “Skjótt Syftir Seiðir” í verk,
3) játta kr. 8 mió. til verkætlanina, skipað og fíggjað soleiðis:
    a) Øll verkætlanin verður skipað undir konto 6475, L64015, Karlamagnusarbreyt, asfaltering, parkering o.a.
    b) Kr. 3.000.000 verða fluttar av konto 6275, L62043, Karlamagnusarbreyt, ferðslutrygd, gøtur, spælipláss, á konto 6475, L64015, Karlamagnusarbreyt, asfaltering, parkering o.a.
    c) Kr. 900.000 verða fluttar av konto 8175, L00002, framfluttur løgukarmur
    d) Kr. 4.150.000 verða fluttar av konto 8175, L00001, løgukarmur fyri árið
4) Beina málið í býráðið umvegis teknisku nevnd og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. mars 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 08. mars 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 17. mars 2021:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og teknisku nevnd og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 25. mars 2021:** Samtykt við fyrstu viðgerð við tíggju atkvøðum fyri, tveimum atkvøðum ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Elsa Berg, Jákup Dam og Birgir Nielsen.

Ímóti atkvøddu: Ruth Vang og Annika Olsen.

Blankt atkvøddi: Gunvør Balle.

**Býráðsfundur 29. apríl 2021:** Samtykt við aðru viðgerð við 11 atkvøðum fyri, ongari ímóti og tveimum blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Jákup Dam, Gunvør Balle, Kristian M. Skála og Birgir Nielsen.

Blankt atkvøddu: Elsa Berg og Ruth Vang.

**Ískoyti:**
Arbeitt hevur verið sambært býráðssamtykt í 2021. Við árslok 2021 eru kr. 874.382 eftir á játtanini til arbeiðið á kr. 9.950.000 og við útistandandi arbeiðum er játtanin uppi pr. februar 2022. Arbeitt hevur verið við at røkka átøkunum «Skjótt syftir seiðir» og hevur arbeiðið verið skipað við tveimum verkætlanarleiðarum: einum fyri økið niðan fyri Atlagøtu og einum omanfyri.

Í sambandi við arbeiðini oman fyri Atlagøtu er gjørdur sáttmáli við J og K Contractors at gera:
- Nýggja innkomu til skúlan við Løgmannabreyt
- Nýtt parkeringsøki millum verandi parkeringsøkið við skúlan við Løgmannabreyt
- Umskipan av parkeringsøkinum við skúlan við Løgmannabreyt
- Gongubreytir fram við vegnum millum Rólantsgøtu og Atlagøtu sambært heildarætlanini
- Skipa gøtuljós sambært heildarætlanini á sama strekki
- Skipa leiðingar o.l. til framtíðarloysnir inni á túnum og parkeringsøkjum millum bygningarnar

Sáttmálin fyri hesi arbeiðir er á uml. 5,25 mió. kr. v/mvg. Í 2021 er arbeitt fyri uml. 3 mió. kr. og resta tí arbeiðir fyri uml. 2,25 mió. at blíva gjørd her. Hetta umfatar liðuggerð av øllum punktum omanfyri. Um hesi arbeiðir ikki verða gjørd liðug, kann ferðsla í økinum ikki henda á tryggum grundarlagi, umframt at hetta við vissu vil viðføra sera stóra ónøgd millum borgarar í økinum. Eisini skal roknast við, at endurgjaldskrav kann koma frá arbeiðstakaranum fyri brotnan sáttmála. Tí er arbeiðið ikki steðgað enn, vegna sera lágt virksemi orsakað kavan í januar og februar. Men verður játtanin ikki økt, verður arbeiðið steðgað.

Umframt hesi arbeiðir, eru økini millum bygningarnar blivin liðugtgjørd undir arbeiðstøku av RJ Brockie, so hvørt, sum tey hava verið klár frá byggiharranna síðu.

Hetta hevur inniborið:

- Eftirlit og møguliga umvæling av avvandingarskipanum
- Fínplanering
- Uppsetan av gøtuljósum
- Uppsetan av kantsteinum at tryggja brunaleiðir

Í sambandi við arbeiðini niðan fyri Atlagøtu, hevur RJ Brockie staðið fyri at:

- Skipa parkering á afturkeyptu stykkjunum, planta og fríðka
- Liðugtgera økini millum bygningarnar, so hvørt sum økini hava verið klár frá byggiharranna síðu, herundir:
    - Eftirlit og møguliga umvæling av avvandingarskipanum
    - Fínplanering
    - Uppsetan av gøtuljósum
    - Uppsetan av kantsteinum at tryggja brunaleiðir

RJ Brockie hevur framt hesi arbeiðir upp á rokning. Í 2021 eru brúktar 5,47 mió. kr. til hesi arbeiðir. Verkætlanarleiðarin upplýsir, at arbeiðir fyri uml. 5,5 mió. kr. resta í fyri at hesi arbeiðir verða liðug. Henda arbeiðstøkan er steðgað.

Viðmerkjast skal, at nýtslan av játtanini í stóran mun er nýtt til at liðuggera økini millum bygningarnar, sum annars ikki eru partur av játtanini frá 25. mars 2021. Til hetta arbeiðið eru kr. 2.400.000 játtaðar í februar 2020. Men hetta er als ikki nøktandi í mun til tey økir, sum eru blivin liðugtgjørd.

Samanlagt resta tí uml. 7,75 mió. kr. í fyri at gera arbeiðini liðug, umframt 650 tkr. til at asfaltera Karlamagnusarbreyt millum Atlagøtu og Rólantsgøtu, tá arbeiðini eru liðug.

Umsitingin metir, at tað er neyðugt at umraðfesta innan íløgukarmin, fyri at fáa til vega hesar upphæddir, fyri at arbeiðini ikki steðga upp við teimum avleiðingum, sum tað kemur at hava við sær.

Skjal:
20/00622-60 220223_Frágreiðing av KMB Status.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at játtaðar verða kr. 8.400.000 til liðuggerð av umrøddu arbeiðum. Mælt verður til at kr. 3.000.000 verða fluttar av løgukarminum LK81998 Parkering, undir konto 8175 Vegir (Íløgur) og kr. 5.400.000 av verkætlan L61024 undir konto 6175 Umsiting og røkt fastari ogn (íløgur) til verkætlanina L64015 Karlamagnusarbreyt, asfaltering, parkering o.a., undir konto 6475 Byggibúning bústaðir (íløgur), og at málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 07. mars 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 16. mars 2022:** Samtykt at játtaðar verða kr. 8.400.000 til liðuggerð av umrøddu arbeiðum. Mælt verður til at kr. 8.400.000 verða fluttar av konto 8175 Vegir (íløgur), kr. 3.000.000 av LK81998 Parkering og kr. 5.400.000 av LK81037 Innkomuvegur.

Upphædin skal flytast á nýggja verkætlanarkonto á 8175 Vegir.

**Býráðsfundur 24. mars 2022:** Einmælt samtykt.

# 63/22 Broyting av almennu byggisamtyktini fyri part av matr. nr. 138a, Stórubrekka og 138fe, Dalurin Langi.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.03.2022 | 73/22 | 22/00349-1 |
| 2 Býráðsfundur | 24.03.2022 | 63/22 | 22/00349-1 |

**Upprunin til málið**
Á fundi í byggi- og býarskipanarnevndini hin 13. september 2021 varð samtykt at broyta almennu byggisamtyktina fyri part av matrikkul 138a frá A3 til D3 umframt at gera eina serstaka byggisamtykt fyri økið.

Somuleiðis er ynskiligt at broyta matr. nr. 138fe frá A3 til D1 soleiðis, at økið verður til ein samanhangandi grønur geiri frá sunnara enda av Dalinum langa og heilt norður til Stórubrekku. Sí kortskjal *áðrenn broyting*.

**Lýsing av málinum**
Býráðið hevur samtykt at byggja nýtt røktarheim við 64 búplássum og 16 atknýttum røktaríbúðum í Stórubrekku.

Á Stórubrekku eru umleið 24.000 $m^2$ av lendi, sum byggjast kann á, sí stripla̵ðar linjur á kortskjalið *Eftir broyting við byggiøki*. Tá verkætlanin er komin longri verður serstøk byggisamtykt gjørd, ið skipar økið neyvari, leggur byggilinjur o.t.

Økið, sum verður nevnt Stórabrekka, liggur á eini høvd oman fyri vinnuøkið við Vegin Langa í 100 m hædd við stórslignum útsýni móti norðuri, eystri og suðri. Økið er óslætt heyggjalendi og liggur somuleiðis út til Dalin Langa, sum er eitt rekreativt øki við gongu/súkklubreyt og uppihaldsøki við Myllutjørn.

Økið, sum er ogn hjá Tórshavnar kommunu, er fevnt av ásetingini fyri A3 øki í 3. grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, sum er lagt til blandaða bústaða- og miðstaðarbygging. Eitt nýtt røktarheim rúmast ikki innanfyri hesa áseting, og er neyðugt at broyta almennu byggisamtyktina til D3 øki, ið eru øki sum verða løgd av til stórar almennar stovnar til umsiting, skúlaskap, heilsurøkt og tílíkt.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri D3 øki í almennu byggisamtyktini eru m.a.:
- Umráðispartarnir D3 verða kannaðir stórum almennum stovnum fyri umsiting, skúlaskap, heilsurøkt og tílíkt.
- Byggistigið má innan fyri eitt náttúrliga avmarkað øki í D2 og D3 ikki fara upp um 0,25 og nýtslustigið ikki fara upp um 0,5.
- Útstykking innan fyri umráðispartarnar D2 og D3 verður einans loyvd eftir serstakari byggisamtykt.

Ásetingar fyri D1 øki í almennu byggisamtyktini eru m.a.:
- Umráðispartarnir D1 verða í síni heild lagdir til almenning, náttúrufriðingar- og mentunarlig endamál og tílíkt (...)
- Bygging í D1 kann bert loyvast sambært serstakari byggisamtykt, sum er í samsvar við stk. 1.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Tá uppskot til skipan av økinum fyriliggur, er ætlanin at gera eina serstaka byggisamtykt, ið fevnir yvir økið. Í serstøku byggisamtyktini er ætlanin at loyva byggin innan fyri stiplaða økið, sí kortskjal *Eftir broyting við byggiøki*

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

17/03196 Røktarheim

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
22/00349-3 Áðrenn broyting
22/00349-3 Eftir broyting
22/00349-3 Eftir broyting við byggiøki

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☒

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekurin mæla til, at
- broyta almennu byggisamtyktina fyri matr. 138a og 138fe sambært tillagaða kortskjali *Eftir broyting*
- farið verður undir at skipa økið við einum røktarheimi og røktaríbúðum
- farið verður undir at gera eina serstaka byggisamtykt fyri økið
- beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. mars 2022:** Samtykt at taka undir vð tilmælinum.

**Býráðsfundur 24. mars 2022:** Einmælt samtykt**.**

# 64/22 Fimleikahøll til skúlan í Kaldbak

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Kaldbaksnevndin | 26.02.2014 | 8/14 | 14/00417-16 |
| 2 Mentamálanevndin | 07.04.2015 | 61/15 | 14/00417-16 |
| 3 Mentamálanevndin | 03.06.2015 | 151/15 | 14/00417-16 |
| 4 Mentamálanevndin | 02.03.2016 | 57/16 | 14/00417-16 |
| 5 Kaldbaksnevndin | 27.04.2016 | 5/16 | 14/00417-16 |
| 6 Fíggjarnevndin | 09.03.2016 | 100/16 | 14/00417-16 |
| 7 Kaldbaksnevndin | 24.10.2016 | 8/16 | 14/00417-16 |
| 8 Mentamálanevndin | 05.10.2016 | 248/16 | 14/00417-16 |
| 9 Fíggjarnevndin | 19.10.2016 | 312/16 | 14/00417-16 |
| 10 Kaldbaksnevndin | 29.03.2017 | 2/17 | 14/00417-16 |
| 11 Kaldbaksnevndin | 25.10.2017 | 8/17 | 14/00417-16 |
| 12 Kaldbaksnevndin | 04.04.2018 | 2/18 | 14/00417-16 |
| 13 Kaldbaksnevndin | 04.09.2018 | 6/18 | 14/00417-16 |
| 14 Mentamálanevndin | 22.10.2019 | 281/19 | 14/00417-16 |
| 15 Fíggjarnevndin | 23.10.2019 | 273/19 | 14/00417-16 |
| 16 Býráðsfundur | 30.10.2019 | 248/19 | 14/00417-16 |
| 17 Kaldbaksnevndin | 19.11.2019 | 8/19 | 14/00417-16 |
| 18 Mentamálanevndin | 15.01.2020 | 13/20 | 14/00417-16 |
| 19 Kaldbaksnevndin | 13.02.2020 | 2/20 | 14/00417-16 |
| 20 Mentamálanevndin | 12.05.2021 | 115/21 | 14/00417-16 |
| 21 Fíggjarnevndin | 19.05.2021 | 121/21 | 14/00417-16 |
| 22 Kaldbaksnevndin | 28.09.2021 | 5/21 | 14/00417-16 |
| 23 Mentamálanevndin | 15.12.2021 | 293/21 | 14/00417-16 |
| 24 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.02.2022 | 49/22 | 14/00417-16 |
| 25 Mentamálanevndin | 09.02.2022 | 49/22 | 14/00417-16 |
| 26 Kaldbaksnevndin | 02.03.2022 | 2/22 | 14/00417-16 |
| 27 Fíggjarnevndin | 16.02.2022 | 37/22 | 14/00417-16 |
| 28 Mentamálanevndin | 09.03.2022 | 91/22 | 14/00417-16 |
| 29 Fíggjarnevndin | 16.03.2022 | 76/22 | 14/00417-16 |
| 30 Býráðsfundur | 24.03.2022 | 64/22 | 14/00417-16 |

**Málslýsing:**

**Fimleikahøll til skúlan í Kaldbak**

**Kaldbaksnevndin 19. mai 2010:** Nevndin ynskir at fáa eina fimleikahøll til skúlan, sum eisini kann brúkast til ítrótt, ítriv og sum borgarahús.

**Kaldbaksnevndin 24. november 2010:** Borgarstjórin beinir málið í mentamálanevndina.

**Kaldbaksnevndin 22. februar 2012:** Ynski er framhaldandi um at fáa eina politiska viðgerð av málinum, við tí fyri eyga at fáa málið raðfest á eini langtíðaríløguætlan.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin vísa á, at eingin peningur er avsettur á íløguætlanini.

**Mentamálanevndin 14. mars 2012:** Samtykt at heita á umsitingina um at kanna møguligan tørv á fimleikahøll/felags hølum í bygdum kommununnar.

**Kaldbaksnevndin 29. mai 2012:** Borgarstjórin beinir málið í mentamálanevndina til víðari viðgerð.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur fingið áheitan um at kanna møguligan tørv á fimleikahøll/felagshúsum í bygdum kommununnar. Bygdirnar Kaldbak, Nólsoy og Velbastað eru ymiskt fyri í mun til innandura ítróttaumstøður og almenn felags- ella bygdahús, sum ikki eru átrúnaðarlig samkomuhús. Harumframt eru kommunalir skúlar og dagstovnar.

Í nógvum bygdum verða felagshús nýtt til størri samkomur so sum brúdleyp, ervi, føðingardagar, bygdastevnur o.a.. Hesi felagshús eru oftast skipað av einum felag, tað veri seg bygdafelag, ítróttafelag, dansifelag osfr., sum eigur og rekur húsið, aloftast við sjálvbodnari megi. Í Havn eru nøkur kommunal býlingshús, sum í ávísan mun hava somu funktiónir.

Á Velbastað er felagshús, men eingin fimleikahøll. Í Nólsoy er felagshús og ein lítil fimleikahøll í skúlanum. Harumframt stendur ein grund til svimjihyl. Í Kaldbak er eingin fimleikahøll og einki felagshús.

Umsitingin skilur áheitanina soleiðís, at ynskt verður tilfar til víðari støðutakan um ætlan at byggja ella betra um felagsumstøður til innandura ítrótt og fjøltáttað felags tiltøk og virksemi í nevndu bygdum.

Til tess skal gerast ein tørvsgreining. Harumframt er neyðugt við uppskotum til, hvussu hetta best kann loysast í ymsu bygdunum í mun til funktiónir, og hvussu hetta í skitsum kundi tikið seg út, har talan er um at byggja nýtt. Gerast skal meting um íløgutørv og eftirfylgjandi rakstrarkostnað. Eisini er neyðugt at fáa lýsing av, hvussu verandi felagshús og karmar annars eru skipaði í dag – privat og kommunalt, og uppskot til, hvussu hetta eigur at verða skipað í framtíðini eisini við atliti at, hvussu hetta er skipað aðrastaðni í kommununi.

Sum tað áður er gjørt vart við, so er eingin játtan sett av á íløguætlanini til hetta endamál. Mett verður neyðugt at fáa uttanhýsis ráðgeving at standa fyri omanfyri lýstu tørvsgreining. Mett verður, at hóskandi upphædd er kr. 300.000. Skal tørvsgreiningin fremjast eftir hesum leisti, er neyðugt at flyta játtan frá øðrum verkætlanum. Uppskot er at flyta játtan frá ætlanini at byggja svimjifelagnum felagshøli L57009, tí mett verður, at hetta kann takast við í ætlanina at byggja nýggja svimjihøll L57015.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 300.000 til felagshús í bygdum kommununnar av íløgukontu 5775 ítróttaanlegg, L57009 svimjifelagið hølir.

**Mentamálanevndin 5. september 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 12. september 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

**Kaldbaksnevndin 12. september 2012:** Borgarstjórin kunnaði um, at málið er viðgjørt í mentamálanevndini og fíggjarnevndini, har tað verður mælt býráðnum til at játta kr. 300.000 til at gera tørvsgreining viðvíkjandi felagshúsum í bygdum kommununnar.

Staðbundnu limirnir hildu ikki, at tørvur var á tørvsgreining, men at peningurin heldur skuldi verið brúktur til at gera høllina í Kaldbak.

**Býráðið 13. september 2012:** Einmælt samtykt.

**Býráðið 1. november 2012:** Jan Christiansen ynskti at fáa soljóðandi broytingaruppskot *ført í protokol: Jan Christiansen mælir til at samtykkja at taka undir við býráðnum 13. september 2012, men at játtanin verður brúkt til gerð av fimleikarhøll í Kaldbak.*

*Síðan varð atkvøtt um tilmæli frá Heðin Mortensen, um beina málið aftur í mentamálanevndina, ið varð samtykt við 9 atkvøðum fyri og 4 ímóti.*

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Marin Katrina Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Jákup Símun Simonsen, Elin Lindenskov, Levi Mørk, Maria Hammer Olsen og Anfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Bogi Andreasen, Inga Dahl, Jan Christiansen og Sjúrður Olsen.

**Kaldbaksnevndin 3. desember 2012:** Borgarstjórin kunnaði um støðuna í málinum**.**

Ískoyti:
Staðbundnu limirnir spyrja hvussu gongur við arbeiðinum.

**Kaldbaksnevndin: 20. februar 2013:** Borgarstjórin kunnaði um at málið liggur í mentamálanevndini. Rykt verður eftir málinum viðv. fimleikahøll í Kaldbak.

**Mentamálanevndin 27. februar 2013:** Málið varð umrøtt og útsett. Semja varð um at viðgera málið saman við framtíðar íløguætlanini.

**Kaldbaksnevndin 27. november 2013:** Nevndin heitir á mentamálanevndina um at taka málið uppaftur soleiðis at gongd kann koma á málið.

**Ískoyti:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin vísa á, at eingin peningur er avsettur á íløguætlanini. Vísandi til býráðsamtyktina 1. november 2012 eigur støða at takast til, hvørt arbeiði skal setast í gongd fyri nevndu játtan.

**Mentamálanevndin 8. januar 2014:** Samtykt at gera tørvslýsing viðvíkjandi trivnaðar/-virksemishúsum í nevndu bygdun fyri játtaðu upphæddina.

**Kaldbaksnevndin 26. februar 2014:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Gunnar Djurhuus, vinnu- og økissamskipari, kemur á fundin at greiða frá tørvskanning.

**Mentamálanevndin 07. april 2015:** Gunnar Djurhuus, vinnu- og økissamskipari, kunnaði um tørvskanningina.

**Ískoyti:**
Jógvan Arge biður um at fáa málið á skrá.

**Mentamálanevndin 03. juni 2015:** Málið varð umrøtt og verður sett á skrá ein av komandi fundum.

**Ískoyti:**
Til tess at gera eina fimleikahøll í Kaldbak er neyðug við meiri lendi. Talan er um lendi í bólki B í byggisamtyktini fyri Kaldbak, og kann nýtslustigið ikki fara upp um 0,30. Verandi lendi hjá skúlanum er ov tepurt, og er tí neyðugt at fáa meiri lendi til vega til at byggja á og til parkeringspláss. Mest upplagt er at fáa lendi til vega vestanfyri Kaldbaks skúla framvið Krossgøtu og í øðrum lagi norðanfyri skúlan. Talan er um lendi í bólki D í byggisamtyktini, har nýtslustigið ikki má fara uppum 0,30. Leysliga mett verður ein komandi fimleikahøll umleið 400 $m^2$, alt eftir hvussu bygt verður og møgulig sambygging við skúlan.
Tí verður mett neyðugt at útvega umleið 1500 $m^2$ av lendi. Talan er um landsjørð og skal tí samráðast við Búnaðarstovuna um málið.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at samtykkja at heimila umsitingini at fara undir samráðingar við Búnaðarstovuna um at ogna sær umleið 1500 $m^2$ lendi til fimleikahøll og venda aftur við einum avtaluuppskoti. Málið verður beint í fíggjarnevndina.
Mentamálanevndin 02. marts 2016: Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 09. marts 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini.

**Kaldbaksnevndin 27. april 2016:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti**
Umsitingin hevur havt samráðingar við Búnaðarstovuna um lendi í bygdini. 29. september 2016 fekk Tórshavnar kommuna skriv frá Búnaðarstovuni við fyribils tilsøgn um lendi til ynskta endamálið.

Víddin sum partarnir eru komnir ásamt um eru 1700 $m^2$. Hetta var mett sum mest upplagda støddin í mun til økið, lendið vm.

Samlaði kostnaðurin fyri lendið verður kr. 215.915.

Á projektkonto L57018 eru kr. 300.000 tøkar til endamálið.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at taka av tilboðnum á kr. 215.915 sum lýst í fyribils tilsøgnini frá Búnaðarstovuni dagfest 29. september 2016. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Eyka ískoyti:**
Eftir at fyrra tilmælið var skrivað og tilsøgn komin frá Búnaðarstovuni, hevur bóndin/festarin mótmælt ætlanini vestanfyri og mælir til lendið norðanfyri í staðin og um tað ikki verður gjørt fer hann at kæra málið til landbúnaðarstevnu. Bóndin sigur at lendið vestanfyri er góður maskinbøur og tískil ein missur fyri sláttur.

Umsitingin er í holt við at finna fram til staðseting og stødd á einum stykkið norðanfyri og kann til ein fund í heyst fund helst verða komin á mál ella áleiðis við samráðingunum um tað.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálnevndini til at halda fast við at keypa lendið vestanfyri og í øðrum lagi at umsitingin fær til vega uppskot til loysn norðanfyri skúlan.

**Mentamálanevndin 05. oktober 2016:** Ein meiriluti Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Sigrún Mohr, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Vegna brákomnar nýggjar upplýsingar í málinum, tekur ein minniluti, Jógvan Arge, støðu á seinni fundi

Tróndur Sigurðsson var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 19. oktober 2016:** Samtykt at heimila umsitingini at samráðast um at keypa lendið vestanfyri.

**Kaldbaksnevndin 24. oktober 2016:** Málið varð umrøtt.

**Ískoyti:**
Umboð frá umsitingini koma inn at greiða frá málinum.

**Kaldbaksnevndin 29. mars 2017:** Borgarstjórin mælir til at taka ein fund við bóndan og kaldbaksnevndina á einum eykafundi.

**Kaldbaksnevndin 25. oktober 2017:** Økissamskiparin og onnur hava havt fund við bóndan, men hann vil ikki selja. Arbeitt verður víðari við somu loysn og øðrum alternativum.

**Kaldbaksnevndin 04. apríl 2018:** Borgarstjórin heldur at arbeiðast skal við at ognartaka økið innan fyri skúlan.

**Kaldbaksnevndin 04. september 2018:** Umboð frá løgdeildini og mentamáladeildini greiddu frá málinum og seta seg í samband við festaran skjótast gjørligt og kanna eftir um eitt e.v.t. makaskifti.

**Ískoyti:**
Búnaðarstovan hevur givið kommununi tilsøgn um keyp av lendi vestan fyri skúlan. Talan verður um at keypa uml. 1.000 $m^2$. Mettur keypsprísur íroknað frábýtingar-útreiðslur, sakargjald og tinglýsing er uml. 135 tkr.
Festarin missir gott dyrkilendi og leggur upp til, at hann fær eitt endurgjald, sum hann kann brúka til at velta annað lendi.
Búnaðarstovan hevur saman við festara gjørt eina veltiætlan av lendi, sum umfatar umvælingar í bønum á matr. nr. 22a, Kaldbak. Talan er um bøin oman fyri koyrivegin oman fyri kirkjuna og nýggja kirkjugarðin.

Mettur kostnaður uml. 44 tkr.

Samlaður kostnaður fyri keyp og endurgjald verður tá uml. kr. 180 tkr.

<u>Fígging</u>
Í máli 14/02822 Útiøki hjá skúlum í Tórshavnar kommunu samtykti mentamálanevndin í ár at játta 305 tkr. til útiøkið hjá skúlanum og í fjør 50 tkr. Av hesi upphædd eru uml. 322 tkr. ikki nýttar enn. Samstundis er komið eitt gott spælipláss í bygdini skamt frá skúlanum. Tí metir umsitingin, at spæliplássverkætlanin tolir, at 180 tkr. verða umraðfestar til útvegan av lendinum til fimleikahøll. Skúlaleiðarin í Kaldbaks skúla tekur undir við málinum.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja, at møgulig útvegan av lendi v.m. kann rindast av kontu 4140 Ætlanir á skúlaøkinum. Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 22. oktober 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Jákup Dam var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 23. oktober 2019:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. oktober 2019:** Einmælt samtykt.

**Kaldbaksnevndin 19. november 2019:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Nú 180 tkr. eru játtaðar til keyp av lendi vestan fyri Kaldbaks skúla til fimleikahøll til skúlan, verður biðið um heimild at seta arbeiðsbólk at gera byggiskrá fyri fimleikahøll á uml. 400 $m^2$. Ætlanin er at seta arbeiðsbólkin í vár, og at byggiskráin so verður liðug í heyst.

Skotið verður upp, at arbeiðsbólkurin verður mannaður við umboði fyri Býarskipanardeildina, umboði fyri Mentamáladeildina, umboði fyri Kaldbaksnevndina og skúlaleiðaranum í Kaldbaks skúla.

Í løguætlanini er roknað við, at til fimleikahøll til Kaldbaks skúla verða játtaðar 7 mió kr.  í 2021 og 3 mió kr. verða játtaðar í 2022, haraftrat eru 180 tkr. játtaðar til lendið.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at seta arbeiðsbólk at gera byggiskrá til fimleikahøll til Kaldbaks skúla og at senda málið í kaldbaksnevndina til ummælis.

**Mentamálanevndin 15. januar 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Kaldbaksnevndin 13. februar 2020:** Staðbundna nevndin tekur støðu til hvør skal í arbeiðsbólkin og venda aftur við hesum.

**Ískoyti:**
Býarskipanardeidin hevur boðað frá, at vegna raðfestingar er best um partur av byggiskránni verður gjørdur av uttanhýsis ráðgeva. Mett verður at umsitingin kann gera part av byggiskránni saman við fyrirreikingarbólkinum, meðan tann tekniski parturin má gerast í samstarvi við fólki við tekniskari bakgrund.

Mett verður hóskandi at fáa hjálp frá uttanhýsis ráðgeva. Mett verður hóskandi at seta av upp til 150 tkr. til uppgávuna. 400 tkr. eru tøkar á projektkontu L57018 Fimleikahøll til skúlan í Kaldbak.
Á løgukarminum konta 5775 fyri 2021 eru avsettar 1.000 tkr. til Fimleikahøll í Kaldbak.

Viðv. størri lendi
Annfinn Brekkstein, formaður í mentamálanevndini ynskir at fáa víðkað um lendið til verkætlanina, soleiðis at tað ber til frá byrjan av at taka hædd fyri møguligari framtíðar kommunalari bygging í økinum. Formaðurin mælir til at víðka økið við umleið 1500 m2 lutvíst vestureftir og lutvíst norðureftir frá verandi lendi.

Meting hjá umsitingini
Sum heild metir umsitingin at tað er skilagott at fáa víðkað um møguleikarnar fyri framtíðar kommunalari bygging í økinum, og soleiðis í betri mun kunna ráðleggja eina skynsama heild.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja:

a). at gera avtalu við uttanhýsis ráðgeva um gerð av byggiskrá.
b). at fara í samráðingar við Búnaðarstovuna og festara um møguleikar fyri keypi av 1500 m² afturat.

Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 12. mai 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 19. mai 2021:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini.

**Kaldbaksnevndin 28. september 2021:** 5. mió.kr. eru settar av á uppskotinum til fíggjarætlanina í næsta ár. Arbeiðið fer í gongd í næsta ár. Tá byggiskráin er liðug, verður hon løgd fyri kaldbaksnevndina aftur.

**Ískoyti** :
Formaðurin setir málið á skrá.

Ráðgevin hevur gjørt vegleiðandi uppskot til bygning við hølisyvirliti, talan er um uml. 500 m2 stóran bygning við høll uml. 230 m2, umklæðingarrúmum við brúsum, serveringskøki og uppihaldsøki, goymslu v.m., sí tekning og hølisyvirlit. Ynskið er at bjóða byggiarbeiðið út í innbodnari lisitatión sum heildararbeiðstøka, krøv annars sambært útbjóðingarskrivi.

Umboð fyri staðbundnu Kaldbaksnevndina hava fingið uppskotið til bygning framlagt. Tikið varð í stórum undir við uppskotinum, men kundu yngst sær, at høllin var eitt sindur størri soleiðis, at t.d. tveir badmintonvøllir kundu verið. Støða kann takast til hetta í sambandi við útbjóðingartilgongdina.

Á íløgujátattanini 2022 eru kr. 5 mió tøkar til endamálið umframt framflutt lítil játtan frá inniverandi ári, sum lutvíst er brúkt til ymsar fyrireikingarkostnaðir. Tá tilboð fyriliggur, ber til at játta restfígging og útvega neyðugt lendi.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at samtykkja at bjóða byggingina út í innbodnari lisitatión sum heildarbeiðstøku at leggja aftur fyri nevnd.

**Mentamálanevndin 15. desember 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Í tilgongdini um at byggja høll í Kaldbak varð mett, at høllin fór at verða uml 400 $m^2$ til støddar og neyðugt var at fáa til vega 1000 $m^2$ av lendi til byggingina.

Nú byggiskrá er skrivað, vísir tað seg, at bygningurin er uml. 500 $m^2$, við høll á uml. 230 $m^2$, umklæðingarrúmum við brúsum, serveringskøki og uppihaldsøki, goymslu v.m., tískil eru 1000 $m^2$, sum tilsøgn er fingin um frá Búnaðarstovuni, ov lítið.

Í sambandi við staðsetingina, so er hædd tikin fyri, at høllin er trekt nakað frá vegnum, og somuleiðis hevur verið hugt eftir møguleikum fyri parkering og atkomuøki framman fyri høllina.

Økið, sum tørvur er á, er nakað størri enn fyrst væntað, og tískil er neyðugt at ogna sær meirøki á 1500 $m^2$, soleiðis at samlaða økið verður tilsamans 2500 $m^2$ til bygning, parkering og atkomu. Sí viðløgdu tekning.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, trivnaðarstjórin, leiðarin á bygningsdeildini og býararkitekturin mæla til at heimila umsitingini at fara í samráðingar við festaran og Búnaðarstovuna um keyp av írestandi lendi á 1.500 $m^2$, sambært viðløgdu tekning, og at beina málið í býráðið umvegis mentamálanevndina og fíggjarnevndina, málið fer til kunningar í kaldbaksnevndini.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. februar 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Mentamálanevndin 09. februar 2022:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

Kristianna Winther Poulsen var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 16. februar 2022:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og mentamálanevndini.

**Kaldbaksnevndin 02. mars 2022:** Leiðarin á bygningsdeildini kunnaði um málið.

**Ískoyti**:
Umsitingin hevur verið í samráðingum við festa og Búnaðarstovu um keyp av meira lendi.

Semja er nú fingin við festaran og verður bíðað eftir endaligari tilsøgn frá Búnaðarstovuni. Semjan er gjørd við støðí í undanfarnu semju við festara og Búnaðarstovuna. Áðrenn undirskriving skal henda tilsøgn fyriliggja.

Talan er um semju, ið kostar kommununi upp til 350 tkr. (sí fylgiskjal við útgreining).

Á projektkontu L57018 Fimleikahøll/borgarahús í Kaldbak eru tøkar 301.665 kr. og á løgukarminum 5575, LK57029 Fimleikahøll í Kaldbak eru tøkar 1.000 tkr.

Útboð av verkætlanini í heildararbeiðstøku verður væntandi her í mars 2022 og tí er hóskandi at fáa endaligu lendisviðurskiftini avgreidd.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin, deildarleiðarin á Stjórnarskrivstovuni og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at samtykkja:

a). at flyta 1.000 tkr. av løgukontu 5575, LK57029 Fimleikahøll í Kaldbak á projekkontu L57018 Fimleikahøll í Kaldbak

b). at samtykkja at tilmæla fíggjarnevndini at keypa umleið 1490 m2 av jørð í Kaldbak frá Búnaðarstovuni og at lata endurgjald fyri ein samlaðan kostna á upp til 350 tkr, at fíggja av projektkontu L57029 Fimleikahøll í Kaldbak. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 09. mars 2022**: Nevndin samtykti:
a). flyta 5.000 tkr. av løgukontu 5575, LK57018 Fimleikahøll í Kaldbak á projekkontu L57018 Fimleikahøll í Kaldbak (fíggjarárið 2022)

b). at tilmæla fíggjarnevndini at keypa umleið 1490 m2 av jørð í Kaldbak frá Búnaðarstovuni og at lata endurgjald fyri ein samlaðan kostna á upp til 350 tkr, at fíggja av projektkontu L57018 Fimleikahøll í Kaldbak. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 16. mars 2022:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. mars 2022:** Einmælt samtykt**.**

# 65/22 Umsókn um keyp av kommunalari ogn og marknaumskipan á matr.nr. 1457a.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.02.2022 | 33/22 | 21/04997-6 |
| 2 Tekniska nevnd | 07.02.2022 | 7/22 | 21/04997-6 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.03.2022 | 62/22 | 21/04997-6 |
| 4 Fíggjarnevndin | 16.03.2022 | 77/22 | 21/04997-6 |
| 5 Býráðsfundur | 24.03.2022 | 65/22 | 21/04997-6 |

**Upprunin til málið**
Eigarin av matr.nr. 1457a Sundsvegur 9, Tórshavn, ynskir at markið móti Sundsvegnum verður rættað upp, so markið er ein bein linja. Áðrenn markið kann rættast upp, er neyðugt hjá umsøkjaranum at keypa part av kommunalari ogn og lata part av eginogn.

**Lýsing av málinum**
Eigarin á matr.nr. 1457a, Sundsvegur 9, søkir Tórshavnar kommunu um keyp av áleið 209 fermetrum av kommunalari ogn, vegøki, litra ek og ynskir í somu syftu at selja kommununi áleið 75 fermetrar.

Umsitingin hevur móttikið tvær umsóknir um keyp av kommunalari ogn, har søkt verður partvís um sama øki. Ein umsókn er komin inn um, at keypa kommunala ogn og leggja afturat matr.nr. 1458c, Sundsvegur 11, søkir um keyp av 57 fermetrum, víst verður til skjal *»Kort_Umsókn hjá matr.nr. 1458c«*.

Umsitingin hevur eitt mál inni um staðseting av transformarastøð í sambandi við komandi íbúðarbyggingina á matr.nr.1401c, Tórshavn. Eitt uppskot til staðseting er sama økið sum her verður søkt um. Víst verður til skjal *»Uppskot um transformarastøð við Sundsvegin«*.

**Lógir, ásetingar o.a.**

*Kommunustýrislógin*
Tað er ásett í § 44, stk. 1 í »*Løgtingslóg um kommunustýri, sum seinast er broytt við løgtingslóg nr. 57 frá 30.apríl 2018*«, eisini kallað Kommunustýrislógin, at føst ogn hjá kommununi ikki má seljast, uttan so, at ognin frammanundan hevur verði boðini út alment.

Økið liggur í umráðispartinum A1 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavn, har tað m.a. er ásett:

- **§ 4, stk. 1** Í tey øki sum hoyra til privatar og almennar vegir, kunnu, sjálvt um tey bert eru løgd av og ikki gjørd til veg, verða lagdir leiðingar og kaðalar og sett tílíkt, sum eftir ætlan byggivaldsins er neyðugt ella hent. Eigarar av ikki gjørdum vegi hava skyldu at geva atgongd til hendan í tann mun, sum neyðugt er til eftirlit og ábøtur á hesum útbúnaði. Avtala skal tó altíð, áðrenn arbeiði verður byrjað, vera til skjals fyri skaða, ið skuldi gjørst av hesi orsøk.

- **§ 4, stk. 2** Verður hildið neyðugt at flyta leiðingar, kaðalar, standarar o.a., tí at bygging fer fram, skal hann, sum byggir, endurgjalda kommunu ella avvarandi stovni útreiðslurnar av hesum eftir rokning. Sama er við øllum eyka vegarbeiði ið gerast neyðug av byggingini og sum byggivaldið fær í lag.

- Um almennir stovnar so sum kommunan ella SEV selja økir við hesum útbúnaði, sum nevnt er í 1. skal seljarin geva keyparnum upplýsingar um tær her nevndu endurgjaldsskyldur ella gera avtalu um, hvør skal gjalda.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Er ynski um breiðkan ella dagføring av vegi og Tórshavnar kommuna ongi vegøki hevur til taks, kann gerast neyðugt at ognartaka jørð. Tað er týdningarmikið, at vegøki fram við trafikeraðum vegum ikki verður selt ella frámatrikulerað, tí hesi øki kunnu verða neyðug, tá vegir skulu dagførast.

Komandi íbúðarvirksemi á Sundsvegnum og fólkavøksturin í Tórshavnar Kommunu, setur trýst á Sundsvegin. Ein dagføring av Sundsvegnum fer at gerast neyðug, tá ein teknisk verkætlan fyriliggur og fíggjarligi karmurin er til tess.

Vegøkir hjá Tórshavnar kommunu hava til endamáls at húsa ferðslu og leiðingum. Sundsvegurin húsar nógvum leiðingum og væntast kann, at tørvurin á økjum til leiðingar gerst størri næstu árini, til m.a. fjarhitaleiðingar.

Vegøkið, søkt verður um, verður m.a. nýtt til tele kaðlar og kaðalstøð.

Umsitingin metir tað ikki vera ráðiligt at lata/selja part av litra ek, tá ið økið hevur til endamál at húsa ferðslu. Víst verður á, at tørvur fer at verða á vegøki til dagføring av Sundsvegnum og at søla av vegnum tí kann hava umsitingar- og fíggjarligar avleiðingar.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
- *J.nr. 21/05101*- Umsókn um keyp av lendi at leggja afturat matr.nr. 1458c, Tórshavn*.*
- J.nr. 21/04665-1 Uppskot til transformarastøð við Sundsvegin

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
J.nr. 21/04997-7 Kort_Umsókn hjá matr.nr. 1457a
J.nr. 21/04997-7 Kort_Umsókn hjá matr.nr. 1458c
J.nr. 21/04997-7 ynskt mark_1457a
J.nr. 21/04697-14 Uppskot um transformarastøð við Sundsvegin.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | x | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, leiðarin á byggimálsdeildini og býarverkfrøðingurin mæla til at svara umsøkjaranum, at kommunan ikki kann taka støðu til málið, fyrr enn onnur viðurskifti á staðnum eru avtalað, harundir m.a. dagføring av Sundsvegnum og staðseting av leiðingum v.m.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. februar 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 07. februar 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Formaðurin hevur biðið um at fáa málið á skrá.

Sum áður nevnt, hevur umsitingin eitt mál inni um staðseting av transformarastøð í sambandi við komandi íbúðarbyggingina á matr.nr.1401c, Tórshavn. Tað nýggjasta í hesum máli er, at staðseting nr. 2 verður mett sum besta staðseting. Staðseting nr. 2 er á sama øki, sum søkt verður um í hesum máli.

Víst verður til skjal »*Uppskot um transformarastøð við Sundsvegin*«.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. mars 2022:** Samtykt at ganga umsóknini á møti og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.
Nevndin viðmerkir, at avgerðin skal ikki hava avleiðingar fyri eini dagføring av Sundsvegnum.

**Fíggjarnevndin 16. mars 2022:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. mars 2022:** Einmælt samtykt

## 66/22 Umsókn um byggiloyvi til sambýli á matr. nr. 4cl og 4bs, Argir

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.02.2022 | 41/22 | 21/04393-9 |
| 2 Fíggjarnevndin | 16.02.2022 | 46/22 | 21/04393-9 |
| 3 Fíggjarnevndin | 23.02.2022 | 64/22 | 21/04393-9 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.03.2022 | 69/22 | 21/04393-9 |
| 5 Tekniska nevnd | 07.03.2022 | 21/22 | 21/04393-9 |
| 6 Býráðsfundur | 24.03.2022 | 66/22 | 21/04393-9 |

**Upprunin til málið**
Søkt verður um at byggja sambýli á Argjum við Reynstún.

**Lýsing av málinum**
Í sambýlinum í Reynstúni koma at búgva fólk við menningar- og rørslutarni. Bygningurin er í einari hædd og býttur í tvær búeindir við eini felags eind ímillum.
Hvør búeind hevur 9 íbúðir og íalt eru 18 búeindir.

Atkoma til sambýlið verður frá Glyvursvegnum. Koyrast kann ikki við bili ímillum sambýlið og bústaðarøkið annars á Reynstúni. Bert ein gongugøta bindur sambýlið til bústaðarøkið.

Tórshavnar kommuna eigur økið.

Avtala millum Tórshavnar kommunu og Almannamálaráðið viðv. yvirtøku av byggiøki til sambýli, er ávegis, men ikki endaliga avgreitt.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið liggur í A3 í 3. grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu

**Upplýsingar frá umsitingini**
Kommunan eigur økið

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Mál nr.  21/00849 loyvi er givið til graviroyndir á staðnum.
Mál nr.18/00416 Eigarafelag Havnardalur abc mótmælir bygging á hesum økinum og grundgevingar.
Mál nr. 19/00569 Málið hevur havt ein málsgongd fyri árum síðan. Tað var um broyting av byggisamtyktini, men mett var tá, at tað var ikki neyðugt.
Í tí málinum stendur, at kunnandi fundur skuldi verða fyri grannunum.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Hevur ikki nú verið á øðrum deildum til viðmerkingar.

**Skjøl**
Umsókn og tekningar.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x) ???**

| **Býráðsfundur**<br>24. mars 2022 | Blað nr.: 315 |
|---|---|
| | Formansins merki: |

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/læ̈ttar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggimálsdeildini mæla til at ganga umsóknini á møti við teimum treytum, sum umsitingin setur.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. februar 2022:** Ein meiriluti, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein og Kári Johansen, samtykti at fara í samráðingar við Almannaráðið um tað er møguligt at gera makaskifti og beina málið í fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Ruth Vang og Jákup Dam, tekur undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 16. februar 2022:** Málið útsett.

**Fíggjarnevndin 23. februar 2022:** Ein minniluti, Heðin Mortensen og Kári Johansen, tekur undir við meirilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini um at samráðast um makaskifti.

Ein minniluti, Annika Olsen og Elsa Berg, tekur undir við minnilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Fundur hevur verið við Almannaráðið, men av tí at projekteringsarbeiðið er liðugt og arbeiðið boðið út, so var byggiharrin ikki serliga áhugaður í at gera makaskifti. Avtalað varð at bíða til tilboðini komu inn, fyri at vita um tey liggja innan fyri kostnaðarmetingina. Tilboðini eru komin inn og liggja tey undir kostnaðarmetingini.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. mars 2022:** Samtykt at beina málið í býráðið.

**Tekniska nevnd 07. mars 2022:** Samtykt at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. mars 2022:** Atkvøtt varð um uppskot frá borgarstjóranum at taka undir við tilmælinum frá tekniska stjóra og leiðaranum á byggimálsdeildini um at ganga umsóknini um byggiloyvi á møti við teimum treytum, sum umsitingin setur.

Uppskotið varð einmælt samtykt.

# 67/22 Fyrispurningur um at byggja íbúðir á matr. nr. 1467e, SMÆRUGØTA, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 10.01.2022 | 17/22 | 21/01446-16 |
| 2 Fíggjarnevndin | 19.01.2022 | 12/22 | 21/01446-16 |
| 3 Fíggjarnevndin | 16.03.2022 | 78/22 | 21/01446-16 |
| 4 Býráðsfundur | 24.03.2022 | 67/22 | 21/01446-16 |

**Upprunin til málið**
Fyrispurningur er komin frá eigaranum um at byggja íbúðarhús.

**Lýsing av málinum**
Byggimálið snýr seg um ein íbúðarbygning í Smærugøtu.
Grundøkið er partur av góðkendari útstykkingarætlan frá 1989-90. í sambandi við hesa útstykkingarætlan varð kloakk løgd til hetta grundøkið.
Væntandi kann nakað meir ferðsla koma fyri í Smærugøtu ísv. hesa bygging.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið liggur í A3 í 3. grundumráði í Almennu Byggisamtyktini hjá Tórshavnar Kommunu.
Har stendur í ásetingum:
Økið verður lagt til blandaða bústaða- og miðstaðabygging, har loyvt er at hava handlar, smáhandverk og minni virkir, skrivstovur, stovnar, samkomuhús, heilsubótarhøli og tílíkt.
Byggistig kann í mesta lagið vera 0,3
Nýtslustigið kann í mesta lagið vera 0,6
Hæddin kann í mesta lagið vera 6 m til hægsta punkt við útvegg og 9 m til møn.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Í ætlaðu byggingini er niðara hædd 156 $m^2$ og ovara hædd 156 $m^2$.
Byggistigið og nýtslustigið eru ávikavist 0,3 og 0,6, sum í báðum førum er tað mest loyvda.
Hæddin við útvegg er 5,79 m og til møn 7,39 m.

Av tí, at vit meta grannar verða ávirkaðir og hava ein beinleiðis og týðandi áhuga í málinum, hevur málið verið til partshoyring hjá grannum.

Granni 1 vísir á, at ferðslan er stór frammanundan, serliga ísv. barnagarðin, og barna-garðurin manglar parkeringspláss
Og nú fer ferðslan at økjast ísv. ætlaðu byggingina.
Hann metir ikki, at tað er pláss til tílíka bygging her. (Hoyringsskriv er viðlagt)

Granni 2 og 3 vísa á, at her verður ov nógv ferðsla, og ferðslan er nógv frammanundan. Teir hava trupulleikar av parkeraðum bilum, bæði til barnagarðin og til skrivstovur í húsinum hjá Skipara- og Navigatørfelagnum. (stytt til S&N).
S&N sigur at vegurin inn til teirra hús er privat ogn hjá teimum og teir góðtaka ikki atkomu til fleiri hús frá teirra vegi. (Felagshoyringsskriv viðlagt)

Byggimyndugleikin vísir á, at ein góðkend útstykking við trimum grundstykkjum er gjørd í Smærugøtu oman fyri vegin (góðkend 4. sept. 1989)
Í samband við hetta er ein deklaratión, har tað er staðfest, at vegurin inn til S&N (fyrr inn til Sámal Jacobsen) ikki kann stongjast fyri almennari ferðslu uttan við loyvi frá Tórshavnar Kommunu.

Seinni er so eitt 4. stykki lagt afturat, niðan fyri vegin, og har eru hús bygd.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Ongi onnur mál

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Hevur ikki verið hjá øðrum deildum

**Skjøl**
21/01446-18 Tekningar
21/01446-14 Hoyringsskriv frá Smærugøtu 7
21/01446-15 Hoyringsskriv frá Smærugøtu 9A og 9C
21/01446-17 útstykkingarætlan og deklaratión

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☒**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggimálsdeildini mæla til at ganga umsóknini á møti, við treytum sum umsitingin setur, vísandi til at økið liggur í umráðispartinum A3 í almennu byggisamtyktini, ið er "lagt til blandaða bústaða- og miðstaðabygging" og vísandi til at har ikki er nøkur góðkend útstykkingarætlan.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. januar 2022:** Nevndin samtykti, ikki at ganga umsóknini á møti vísandi til at parkeringsviðurskiftini á økinum eru vánalig. Eisini samtykt at fara í samráðingar við umsøkjaran um at finna annað stykki.

**Ískoyti:** Býráðið samtykt tann 23. juni 2021 í máli 21/02232 at keypa ognina matr. nr. 1467e fyri 2,2 mió. kr. Eftir hesa samtykt hava verið samráðingar við eigaran av ognini um at keypa ognina ella gera eitt makaskifti við aðra ogn hjá kommununi, men hesar samráðingar bóru ikki á mál. Víst varð á møguleikan at makaskifta við annað grundøki í nýggjari, kommunalari útstykking á Argjahamri ella í Hoyvíkshaganum, men eigarin hevur ikki verið áhugaður í at gera slíkt makaskifti, eins og hann heldur ikki hevur verið áhugaður í at selja kommununi ognina.

Vísandi til, at samráðingar sostatt hava verið við eigaran av ognini, verður fíggjarnevndin vísandi til samtyktina í fyriliggjandi máli biðin um at taka støðu til, um samráðingarnar skulu takast upp aftur við atliti til at gera enn eina roynd at fáa makaskifti í lag, ella um takast skal til eftirtektar, at eigarin ikki er áhugaður í at selja kommununi ognina.

**Tilmæli:** Kommunustjórin og deildarleiðarin á Stjórnarskrivstovuni mæla fíggjarnevndini til at taka støðu til, um samráðingarnar skulu takast upp aftur við atliti til at gera makaskifti við annað stykki hjá kommununi soleiðis, at kommunan afturfyri yvirtekur matr. nr. 1467e.

**Fíggjarnevndin 19. januar 2022:** Víst verður til áður gjørda samtykt um at keypa ognina aftur.

**Ískoyti**:
Umsitingin hevur aftur samskift við eigaran av matr. nr. 1467e, Tórshavn, um ognina og møguleikarnar at gera eitt makaskifti við aðra ogn, sum eigarin kann byggja á. Ítøkiliga byggiætlanin á matr. nr. 1467e snýr seg um 4 íbúðir, og eigarin sigur seg nú vera sinnaðan at gera eitt makaskifti við kommununa við eina ogn, ið hann kann byggja eins nógv á, sum ætlanin var at byggja á matr. nr. 1467e. Umsitingin hevur víst á møguleikan at makaskifta við eina ogn í ætlaðu útstykkingini omanfyri Argjahamar á Argjum, sum er tann fyrsta kommunala útstykkingin, ið ætlanin er at fara í gongd við. Eigarin sigur seg vera sinnaðan at fáa eitt stykkið har móti at kommunan fær matr. nr. 1467e at nýta til parkering í staðin. Eitt slíkt makaskifti kann ikki gjøgnumførast fyrrenn útstykkingin á Argum er komin longur, men hesum sigur eigarin av matr. nr. 1467e seg kunna bíða eftir. Eitt slíkt makaskifti krevur góðkenning frá býráðnum og harumframt frá kommunala eftirlitinum hjá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum, og ein møgulig tilsøgn frá býráðnum er tískil treytað av slíkari góðkenning.

**Tilmæli**:
Kommunustjórin og tekniski stjórin mæla fíggjarnevndini til at taka støðu til, um hon tekur undir við at gera makaskifti soleiðis, at Tórshavnar kommuna ognar sær matr. nr. 1467e, Tórshavn, og verandi eigari fær tilsvarandi ogn at byggja á í ætlaðu útstykkingini omanfyri Argjahamar á Argjum. Verður tikið undir við einum slíkum makaskifti, verður málið beint í býráðið, og tá ið útstykkingin omanfyri Argjahamar er veruleiki, verður søkt kommunala eftirlitið hjá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum um at góðkenna makaskiftið.

**Fíggjarnevndin 16. mars 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. mars 2022:** Einmælt samtykt.

# 68/22 Orkupolitikkur

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 05.10.2017 | 46/17 | 17/03154-1 |
| 2 Býráðsfundur | 26.10.2017 | 252/17 | 17/03154-1 |
| 3 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 07.06.2018 | 37/18 | 17/03154-1 |
| 4 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 01.04.2019 | 14/19 | 17/03154-1 |
| 5 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 07.10.2019 | 44/19 | 17/03154-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 23.10.2019 | 281/19 | 17/03154-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 27.11.2019 | 333/19 | 17/03154-1 |
| 8 Býráðsfundur | 28.11.2019 | 287/19 | 17/03154-1 |
| 9 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 30.11.2020 | 48/20 | 17/03154-1 |
| 10 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 12.02.2021 | 11/21 | 17/03154-1 |
| 11 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 30.11.2021 | 47/21 | 17/03154-1 |
| 12 Býráðsfundur | 16.12.2021 | 329/21 | 17/03154-1 |
| 13 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 08.03.2022 | 15/22 | 17/03154-1 |
| 14 Fíggjarnevndin | 16.03.2022 | 79/22 | 17/03154-1 |
| 15 Býráðsfundur | 24.03.2022 | 68/22 | 17/03154-1 |

**Málslýsing:**

**Uppskot til leist**
Í umhvørvispolitikkinum ‘Grøna leiðin’ hjá Tórshavnar kommunu eru mál ásett fyri útlát, orkunýtslu og varandi orkukeldur.

Umráðandi er at ítøkiliggera hesi mál, t.v.s. hvussu kommunan minkar um nýtsluna av fossilari orku, leggur um til varandi orku og hvørji orkusparandi átøk, ið kommunan eigur at fremja.

Ætlanin er tí at seta ein arbeiðsbólk og ein stýrisbólk til at útgreina hetta arbeiðið. Arbeiðsbólkurin ger uppskot til arbeiðssetning og tíðarætlan, sum tekur støði í teimum málum, sum eru sett í umhvørvispolitikkinum, og hvørji átøk kommunan skal seta í verk fyri at røkka tess málum innan orkuøkið.

Arbeiðsbólkurin skal viðgera einstøku málini og gera ítøkilig uppskot til átøk/tiltøk fyri hvørt einstakt mál innan orku. Hetta verður gjørt í einum breiðum samstarvi millum deildir í teknisku fyrisiting. Arbeiðsbólkurin verður mannaður við á leið 4-5 umboðum úr fyrisitingini, herímillum umboð frá húsaumsitingini, teknisku deild, býarskipanardeildini og byggi- og umhvørvisdeildini. Starvsfólk á byggi- og umhvørvisdeildini samskipar arbeiðið og er skrivari hjá bólkinum.

Aktørar og intressentar, sum eru í samfelagnum innan orku, verða eisini ein partur av arbeiðinum, og verða hesir tiknir uppá ráð og innkallaðir til fund, tá arbeiðsbólkurin hevur tørv á hesum.

Arbeiðsbólkurin hevur fundarvirksemið á leið 2-3 ferðir um mánaðin. Ávegis í arbeiðinum verða fundir við stýrisbólkin, á leið 6. hvørja viku. Stýrisbólkurin verður mannaður við trimum umboðum fyri politisku skipanina, deildarleiðara á byggi- og umhvørvisdeildini og tekniska stjóra.

Yviskipaður leistur:
1. Arbeiðs- og stýrisbólkur verður settur.

2. Arbeiðsbólkur orðar arbeiðssetning fyri orkupolitikk, ið er grundaður á mál sett í umhvørvispolitikkinum.
3. Útgreinað núverandi orkunýtslu: hagtøl, status anno 2016/2017, grønur roknskapur v.m.
4. Arbeiðsbólkur ger uppskot til raðfesting av átaksøkjum og íløgum innan orkuøkið - skjótt syftir seiðir, tað tunga takið.
5. Hitaætlan og útbygging av fjarhitakervinum í Tórshavnar kommunu – víðari leistur
6. Uppskot til orkupolitikk við átøkum verður viðgjørt í politisku nevndunum.
7. Átøk/tiltøk skulu setast í verk - ábyrgdarøki og íløgur verða heimilað.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini mæla til, at nevndin samtykkir:
1. uppskot til leist at gera orkupolitikk fyri Tórshavnar kommunu, sum útgreinar hvørji átøk skulu setast í verk fyri at røkka teimum málum, sum eru sett fyri orkuøkið í umhvørvispolitikkinum.
2. at beina málið í býráðið, sum tilnevnir 3 politisk umboð sambært §36 í kommunustýrislógini at sita í stýrisbólkinum, t.e. forkvinnan í náttúru- og umhvørvisnevndini, forkvinnan í byggi- og býarskipanarnevndini og eitt umboð úr fíggjarnevndini.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 05. oktober 2017:** Ein meiriluti, Turið Horn, Gunvør Balle og Bergun Kass, samtykti at taka undir við tilmælinum og at formaðurin í teknisku nevnd eisini verður í stýrisbólkinum.

Ein minniluti, Halla Samuelsen, tekur undir við tilmælinum, men mælir til at ein frá minnilutanum í náttúru- og umhvørvisnevndini eisini verður í stýrisbólkinum.

**Býráðsfundur 26. oktober 2017:** Einmælt samtykt og at velja Hallu Samuelsen, Turið Horn og Jákup Dam í stýrisbólkin.

**Ískoyti:**
Arbeiðið at gera orkupolitikk fyri Tórshavnar kommunu byrjaði í januar 2018. Arbeiðsbólkurin hevur higartil havt sjey arbeiðsfundir, og tríggir fundir hava verið við stýrisbólkin.

Arbeiðið hjá arbeiðsbólkinum hevur higartil í størstan mun verið at gera eina støðulýsing av orkunýtsluni og $CO_2$-útlátinum hjá kommununi (2016 og 2017), ið verður útgreinað fyri hesi økir:
- bygningar
- vatnverk
- gøtuljós
- pumpuskipanir
- bilar/akfør/maskinur
- bussleiðin
- Brennistøðin
- Tórshavnar havn

Nógv arbeiði liggur aftanfyri at fáa hagtøl til vega fyri orkunýtsluna hjá Tórshavnar kommunu. Eitt nú hevur praktikantur á teknisku deild havt nógv arbeiði við at fáa hagtøl til vega fyri bilar/akfør/maskinur og pumpuskipanir. Í verandi løtu verður ein frágreiðing skrivað um orkunýtsluna og $CO_2$-útlátið hjá Tórshavnar kommunu.

Skipað varð eisini fyri einum temadegi um orku tann 20. apríl. Luttakarar á degnum vóru arbeiðsbólkurin og stýrisbólkurin fyri orku í Tórshavnar kommunu, umboð frá SEV og umboð frá Fjarhitafelagnum. Endamálið við degnum var at fáa eina lýsing av orkuøkinum, har verandi støða og framtíðarætlanir hjá øllum pørtum varð væl lýst.

Á degnum vóru áhugaverdar og upplýsandi framløgur frá øllum pørtum og mett varð, at temadagurin eydnaðist væl. Ætlanin er, at partarnir framyvir javnan møtast til arbeiðsfundir at umrøða ymiskar orkuspurningar og ætlanir á økinum.

Næsta stig í arbeiðinum hjá arbeiðsbólkinum er at útgreinað potentialið fyri orkusparing innan ymisku økini í kommununi og at gera meting og raðfesting av ymiskum orkuátøkum og -verkætlanum, herundir íløgu- og rakstarkostnaður.

Somuleiðis liggur eitt umfatandi arbeiði fyri framman at menna kommunalu heimasíðuna viðvíkjandi kunning mótvegis borgaranum um orkunýtslu og orkusparing.

Yvirskipaða tíðarætlanin fyri orkupolitikkin er, at arbeiðið skal verða liðugt í februar/mars 2019.

Arbeiðsbólkurin hevur umrøtt, at neyðugt er við meiri arbeiðsorku at gera ymiskt arbeiði í sambandi við gerð av orkupolitikkinum. Tískil ynskir arbeiðsbólkurin, at lýst verður eftir fólki til verkætlanarsett starv í ½ ár at einans arbeiða við ymiskum, ið hevur við gerð av orkupolitikkinum og orkuøkinum annars í Tórshavnar kommunu.

Hetta varð eisini umrøtt á fundi við stýrisbólkin tann 17. mai, og tók stýrisbólkurin undir við uppskotinum hjá arbeiðsbólkinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og virkandi leiðarin á umhvørvisdeildini mæla til, at nevndin tekur undir við, at kr. 250.000 verða játtaðar av konto 6610 til verkætlanarsett starv í ½ ár, har viðkomandi skal arbeiða við orkuspurningum og gerð av orkupolitikkinum hjá Tórshavnar kommunu.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 07. juni 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Í sambandi við arbeiðið at gera ein orkupolitikk fyri Tórshavnar kommunu, hevur fólk verið í verkætlanarsettum starvi á umhvørvisdeildini síðan 1. november 2018. Verklætlanarstarvið varð tá ásett til 6 mánaðir. Í hesi tíðini er nógv arbeiði gjørt – arbeiðsbólkurin hevur fingið góð hagtøl um orkunýtslu v.m., sum avgerðir og tilmæli kunnu byggjast á. Somuleiðis er nógv neyðug kunning fingin til vega um ymiskt innan orkuøkið í síni heild.

Tó metir arbeiðsbólkurin, at enn er týdningarmikið arbeiði at útgreina, áðrenn arbeiðsbólkurin kann koma á mál við sínum tilmælum í sambandi við ein orkupolitikk fyri Tórshavnar kommunu.

Tí ynskir arbeiðsbólkurin, at verkætlanarstarvið verður longt við tveimum mánaðum, t.v.s. fram til 30. juni 2019.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á umhvørvisdeildini mæla til, at verkætlanarstarvið í sambandi við gerð av orkupolitikki hjá Tórshavnar kommunu verður longt við tveimum mánaðum, t.v.s. fram til 30. juni 2019, og at peningur til løn í 2 mðr. verður játtaður av konto 6610.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 01. apríl 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
Arbeiðsbólkurin fyri orkupolitkk hevur síðan byrjanina av 2018 gjørt drúgt greiningararbeiðið viðvíkjandi orkunýtslu og $CO_2$-útláti hjá Tórshavnmar kommunu. Hetta greinaingararbeiðið er komið á mál, og hevur arbeiðsbólkurin gjørt nøkur høvuðstilmæli, sum ein almennur orkupolitikkur hjá Tórshavnar kommunu eigur at byggja á.

Arbeiðsbólkurin hevur havt nógvar innanhýsis fundir og eisini fundir við ymsikar interessentar, m.a. SEV, Orka, Fjarhitafelagið, Tórshavnar Havn.

Ávegis í arbeiðinum hava somuleiðis verið 6 fundir við stýrisbólkin fyri orkupolitikk, har kunna hevur verið um tilgongdina og úrslit hjá arbeiðsbólkinum.

Í høvuðsheitum hevur arbeiðsbólkurin útgreinað orkunýtsluna hjá Tórshavnar kommunu fyri árini 2016 (sum er støðisár í umhvørvispolitkkkinum), 2017 og 2018. Arbeiðsbólkurin hevur gjørt orkufrágreiðingar og tilhoyrandi CO2-rokniskap fyri hesi trý árini.

Arbeiðsbólkurin hevur síðan útgreinað potentialið fyri orkusparing innan ymisku økini í kommununi, t.e. bygningar, vatnverk, pumpuskipanir, akfør/maskinur, gøtuljós, bussleiðin v.fl. Út frá hesum hevur arbeiðsbólkurin gjørt eina meting og raðfesting av ymiskum orkuátøkum og -verkætlanum, herundir eisini íløgu- og rakstrarkostnað.

Arbeiðsbólkurin hevur lagt dent á, hvussu kommunan kann gerast ein grøn kommuna og spara $CO_2$, har vit fáa mest fyri íløguna í mun til sparing í orkuútreiðslum og minking í $CO_2$. Somuleiðis er dentur lagdur á átøk, sum hava høgt signalvirði mótvegis borgaranum.

Arbeiðsbólkurin hevur serliga lagt dent á, hvussu Tórshavnar kommuna kann skerja útlátið av vakstrarhúsgassi hjá Tórshavnar kommunu við 50% í 2025 í mun til 2016, sum er mál í umhvørvispolitikkinum.

Arbeiðsbólkurin hevur gjørt ítøkilig uppskot tilhvørjar orkuverkætlanir og orkuátøk kommunan eigur at seta í verk. Í høvuðsheitum eru tilmælini frá arbeiðsbólkinum fyri tey komandi 6 árini (2020-2025):

1. at ein miðvís orkuumlegging verður framd í bygningum hjá kommununi, tvs. skifta frá olju til fjarhita, jarðhita ella hitapumpu.
2. at øll gøtuljós verða skift til LED
3. at leið 70-80 bilar hjá kommununi verða el-bilar í hesum tíðarskeiðinum.
4. at bussleiðin verður elektrifiserað.

Við hesum verkætlanum og átøkum innan orkuøkið ber til at røkka fleiri av orkumálunum í umhvørvispolitikkinum, m.a. at Tórshavnar kommuna skal skerja útlátið av vakstrarhúsgassi við 50% í 2025 í mun til 2016.

Arbeiðsbólkurin hevur fyri hvørt orkuátak gjørt eina tilhoyrandi kostnaðarmeting, sum vísur, at við eini játtan á 13,5 mió. kr. árliga til orkuátøk komandi 6 árini (2020-2025), so ber til at røkka málinum í umhvørvispolitikkinum.

Víst verður til viðheftu framløgu, sum greiðir nærri frá hesum tilmælunum, hvør $CO_2$- sparingin er, og hvør íløgukostnaðurin er fyri hvørt økið.

Fyri at síggja orð í verki, tvs. um Tórshavnar kommuna skal gerast ein grøn kommuna og liva upp til egin mál í umhvørvispolitikkinum, so er neyðugt at penningur verður játtaður á fíggjarætlanini til verkætlaninr og átøk innan orku, áðrenn Tórshavnar kommuna fer út við einum almennum orkupolitikki, sum byggir á tilmælini hjá arbeiðsbólkinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á umhvørvisdeildini mæla til, at nevndin samtykkir at seta í verk orkupolitikkin, soleiðis at arbeiðið kann byrja eftir summarfrítíðina og at játta 5,0 mió. í 2020 og restina javnt yvir komandi 6 árini.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 07. oktober 2019:** Samtykt at heita á fíggjarnevndina at útvega fígging, soleiðis at orkupolitikkurin kann setast í verk.

**Fíggjarnevndin 23. oktober 2019:** Samtykt at taka málið upp í sambandi við fíggjarætlanararbeiðið fyri 2020.

**Fíggjarnevndin 27. november 2019:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við tilmælinum hja tekniska stjóra og leiðaranum á umhvørvisdeildini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 28. november 2019:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri, ongari ímóti og tveimum blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

Blankt atkvøddu: Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson.

**Ískoyti:**
Í seinasta ískoyti og framløgu varð nevnt, at fortreytin fyri at fáa eina grønari kommunu við 50% lægri $CO_2$-útláti í 2025 er, at kommunan játtar 13,5 mió. kr. um árið, umframt tað sum er játtað á rakstri og íløgu, íalt 15 mió. kr. hvørt ár í 6 ár 2020-2025, ella í alt 90 mió. kr.

Í 2020 vórðu játtaðar 5,0 mió. kr., harav 1,5 mió. kr. til viðlíkahald og orkuátøk í bygningum, tað vil siga, at 3,5 mió. kr. vóru beinleiðis til orkupolitikkin.

Í uppskotinum til fíggjarætlan 2021 lækkar upphæddin til 4,0 mió. kr., harav 1,5 mió. kr. fara til viðlíkahald og orkuátøk í bygningum, tað vil siga, at 2,5 mió. kr. fara beinleiðis til orkupolitikkin.

Uppskotið til almenna orkupolitikkin (tekstur), ið byggir á upprunaligu ætlanina, at minka $CO_2$-útlátið 50%, er næstan klárt. Tó er áramálið nú bert 4 ár fram til 2025, og tí má árliga upphæddin til íløgur verða samsvarandi størri, uml. 22 mió. kr. um árið í 4 ár 2022-2025, um málið skal røkkast.

Ætlanin er at seta í verk gerð av faldara, við uppseting, tekningum og prenti og at fíggja hetta av rakstri, kontu 6610.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini mæla til, at arbeiðið at gera faldara, ið byggir á upprunaligu ætlanina í Orkupolitikkinum og Grønu leiðini, verður sett í verk og fíggjað av rakstri, konto 6610.

Eisini verður mælt til, at nevndin tekur støðu til, um málið at lækka $CO_2$-útlátið við 50% í 2025 skal leingjast, vísandi til at neyðugur peningur ikki er settur av í 2020 og 2021.
**Náttúru- og umhvørvisnevndin 30. november 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at leingja málið at lækka $CO_2$-útlátið við 50% til 2027.

**Ískoyti:**
Elsa Berg, nevndarlimur, hevur biðið um at fáa málið lagt fyri náttúru- og umhvørvisnevndina aftur. Hon vísir á, at á fyrsta fundi í náttúru- og umhvørvisnevndini fekk nevndin eina frágreiðing frá umsitingini um umhvørvis- og orku politikkin hjá Tórshavnar kommunu. Har varð staðfest, at vit fara beint øvugtan veg í mun til okkara útlátsmál, í og við at útlátið enn er í øking og at neyðugt er við sterkari átøkum og meira fígging.

Elsa Berg ynskir at nevndin viðger støðuna, og hvat skal til av átøkum og pengum, fyri at vit røkka málinum.

Hetta varð lýst, tá málið bleiv samtykt, men má dagførast.

Kunnað verður um málið og framløga.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 12. februar 2021:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Sambært orkupolitikkinum hjá Tórshavnar kommuna skal $CO_2$ útlátið hjá kommununi minka við 50% í 2027 í mun til 2016, og hetta skal gerast við at leggja dent á 3 høvuðsmál:

1. GRØN UPPHITING: ALLAR OLJUFÝRINGAR HJÁ TÓRSHAVNAR KOMMUNU ERU BURTUR Í 2027
2. LED GØTULJÓS: ØLL GØTULJÓS SKULU VERA SKIFT TIL LED Í 2027
3. EL-AKFØR: ALLIR PERSÓN- OG VØRUBILAR HJÁ TK VERÐA ELRIKNIR Í 2027

Á leið 90 mió. kr. skulu fram til 2027 brúkast á orkuøkinum, um hesi mál skulu røkkast.

Umsitingin hevur gjørt uppskot til eina ætlan fyri 2022, fyri hvørt av teimum trimum orkumálum, sum skal tryggja, at ferð kemur á grøna orkuskiftið í kommunala geiranum. Harumframt verður uppskot lagt fram um, hvussu umsitingin kann skipa seg í arbeiðsbólk og arbeiða víðari við mannagongdum og ársfrágreiðingum fram til 2027.

Útgangsstøði er tikið í eini samlaðari játtan á 8. mió. kr. til orkuátøk í 2022. Tað letur seg ikki gera at røkka orkumálunum við umrøddu játtanini, men kann hon vera fyrsta stig til at raðfesta orkuøkið hægri komandi árini.

*ORKUMÁL 1 – GRØN UPPHITING: ALLAR OLJUFÝRINGAR HJÁ TÓRSHAVNAR KOMMUNU ERU BURTUR Í 2027*
Upphiting og streymnýtsla í bygningum umboða meira enn helmingin av samlaða $CO_2$-útlátinum av virkseminum hjá Tórshavnar kommunu.

Sambært orkupolitikkinum skulu á leið 17 oljufýringar hjá TK skiftast til grøna orku á hvørjum ári frá 2021. Í 2021 vóru 8 oljufýringar skiftar út við fjarhita ella hitapumpu, og kommunan setir ikki nýggjar oljufýringar upp.

Fjarhitaskipanin hjá kommununi er undir útbygging. Hon kann nýta orku frá alskyns orkukeldum, og kann hon samvirka við aðrar partar av orkuinfrakervinum t.d. taka ímóti avlopsorku frá vindmegi og aðrari elframleiðslu, sum verður alsamt meiri týðandi í framtíðar grøna orkuinfrakervinum. Fjarhitanetið verður nýtt til at binda orkuframleiðslu og nýtsluna saman í kommununi og at gagnnýta orku, sum annars fer til spillis. Tí mælir umsitingin til at raðfesta íbinding í fjarhitanetið í 2022.

Eisini eru størri verkætlanir, ið umsitingin metir eiga at verða raðfestar komandi árini.
**Umsitingin ætlar at brúka 3,9 mió. kr. til at knýta 7 almennar bygningar í fjarhitaskipanina umframt 1,5 mió. til eitt orkuátak sambært fylgiskjali 1.**

*ORKUMÁL 2 – LED GØTULJÓS: ØLL GØTULJÓS SKULU VERA SKIFT TIL LED Í 2027*
Gøtuljós umboða áleið 8% av samlaða $CO_2$-útlátinum hjá kommununi. Um gøtuljós nýta LED-ljós, minkar hesin parturin av el-nýtsluni á leið ein triðing, umframt at útreiðslan av hesari íløguni av tí sama verður spard aftur eftir fáum árum.

Sambært orkupolitikkinum skulu á leið 1.100 gøtuljós skiftast til LED hvørt ár. Tórshavnar kommuna eigur uml. 9.000 gøtuljós, av hesum eru áleið 2.600 skift til LED.

Higartil eru 710 gøtuljós skift í 2021.

**Umsitingin ætlar at brúka 1,6 mió. kr. til at skifta 570 gøtuljós til LED í 2022 sambært fylgiskjali 1, umframt at skifta gøtuljós fyri ta íløguupphædd frá 2021, sum ikki verður brúkt í ár, væntandi á leið kr. 500.000,-.**

*ORKUMÁL 3 - EL-AKFØR: ALLIR PERSÓN- OG VØRUBILAR HJÁ TK VERA ELRIKNIR Í 2027*
Bilar og maskinur umboða 11% av samlaða $CO_2$-útlátinum hjá Tórshavnar kommunu. Sambært orkupolitikkinum skulu á leið 15 bilar skiftast til el hvørt ár frá 2021.

Í 2020 vóru 9 elbilar í kommununi. Í dag eru 13. Harafturat eru 2 elbilar skiftir út við nýggjar elbilar. Uml. 22 bilar skulu eftir ætlan skiftast í 2022. Aloftast stendst ein eykaútreiðsla av at skifta til el-bil heldur enn til ein bil riknan við steinolju, m.a. til løðistøðir o.a.

**Umsitingin ætlar at brúka 1 mió. til eykaútreiðslur av at skifta 10 akfør til el í 2022 sambært fylgiskjal 1.**

*Ætlan 2022-2027*
At gera mannagongdir, útlátsrokningar- og framskrivingar krevur nógva tíð og orku. Um kommunan verður betri til at skapa virði burturúr dáta um orkunýtslu- og framleiðslu kunnu vit seta í verk loysnir, sum tryggja at arbeiðið ber á mál.

Tórshavnar kommuna arbeiðir við at skráseta orkudáta í Energykey, sum er ein skipan til at samla dáta og hava eftirlit við orkuøkinum í kommununi. Tá skipanin er klár, kann hon m.a. brúkast til at gera støðulýsingar og ætlanir fyri, hvussu kommunan fær sum mest burturúr sínum orkuíløgum, og geva innlit í, hvar tað er mest átroðkandi at minka um $CO_2$-útlátið og orkunýtsluna.

**Umsitingin ætlar at raðfesta at fáa Energykey klárt í fyrru helvt av 2022, so skipanin kann brúkast til at gera eina støðulýsing umframt eina ætlan fyri 2023-2027.**

Áðrenn Energykey verður klárt, verður neyðugt at dagføra útlátstølini fyri 2019, 2020 og 2021. Harumframt krevst eyka arbeiði at fáa øll dátu skrásett í Energykey, soleiðis at skipanin fevnir um alt orkuøkið og ikki, sum støðan er nú, bert bygningar. Umsitingin hevur í hesum sambandi umrøtt, at neyðugt er við meiri arbeiðsorku. Tískil ynskir arbeiðsbólkurin, at eitt fólk verður sett í eitt verkætlanarsett starv til útiloðkandi at arbeiða við at dagføra útlátstølini og skráseta í Energykey.

Fyri at koma á mál við orkupolitikkinum er eisini neyðugt at menna samstarvið millum deildirnar. Fyrst og fremst eru tað bygningsdeildin, verkstaðið, vatn- og gøtuljósdeildin og umhvørvisdeildin sum eru beinleiðis knýtt at teimum 3 orkumálunum umvegis dagliga virksemið. Neyðugt verður at møtast regluliga fyri at fylgja støðuni, umframt at gera ætlan fyri 2023-2027.

Tekniski stjórin og leiðarin á umhvørvisdeildini leggja hervið uppskot fram um ætlanina fyri tey trý orkumálini í 2022:
- 3,9 mió. til at knýta 7 bygningar í fjarhitaskipanina
- 1,5 mió. til orkuátak
- 1,6. mió. til at skifta 570 gøtuljós til LED
- 1 mió. til at skifta 10 akfør til el

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á umhvørvisdeildini mæla til, at umsitingin arbeiðir víðari við omanfyri nevndu ætlan m.a. at fáa Energykey klárt í fyrru helvt av 2022, so skipanin kann brúkast til at gera eina støðulýsing og ætlan fyri 2023-2027.

Mælt verður til at nýta kr. 200.000 av konto nr. 6610 hjá umhvørvisdeildini frá játtanini fyri 2021 til verkætlanarsett starv í uml. 4 mánaðir til at arbeiða við skráseting í Energykey og at dagføra útlátstølini.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 30. november 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum umframt at nýta aðrar kr. 100.000 til samskifti. Eisini verður heitt á umsitingina um at arbeiða víðari við orkuskifti í bygningum og koma aftur í nevnd við nýggjum tilmæli.

**Ískoyti:**
Elsa Berg biður um at fáa málið at skrá til komandi býráðsfund.

**Býráðsfundur 16. desember 2021:** Fyrst varð atkvøtt um uppskotið frá Bjørg Dam um at beina málið í náttúru- og umhvøvisnendina, ið varð samtykt við 9 atkvøðum, 4 ímóti og ongari blankari.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Birita Baldvinsdóttir Iversen, Bjørg Dam,Birgir Nielsen og Ruth Vang.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Jákup Dam, Gunvør Balle og Annika Olsen.

**Ískoyti:**
Fjarhitaskipanin hjá kommununi er undir útbygging, og politiskt ynski er at binda fleiri kommunalar bygningar í hesa skipan. Bygningarnir í uppskoti til íbinding í 2022 eru hesir:

- Eldrasambýlið oman Hoydalar
- Tilhaldið í Tórsgøtu
- Fimi-HB-B36
- Tannlæknastovan
- Móttøkuhúsið (Listasavnið)
- Liðahúsini
- Gundadalshøllin
- Brúni skúli

Viðmerkjast skal, at Gundadalshøllin verður ikki íbundin, fyrr enn avgerð er tikin, um høllin skal umbyggjast, útbyggjast ella byggjast av nýggjum. Tryggjað verður, at klárt er at binda í høvuðsleiðina hjá fjarhitanetinum, tá avgerð er tikin hesum viðvíkjandi.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á Umhvørvisdeildini mæla til, at fyrisitingin fær heimild til:

At flyta 1 mió. av stovnsnummar 6177, Orkuátøk, LK61705, Orkupolitikkur, til nýggja verkætlan "Fjarhitaskipan til kommunalar bygningar" undir stovnsnummar 6177 til at gera prosjekt, kostnaðar- og tíðarmeting til útboð av at íbinda nevndu bygningar í fjarhitanetið, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 08. mars 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 16. mars 2022:** Samtykt at taka undir við náttúru- og umhvørvisnevndini við tí ískoyti, at heimild eisini verður givin til at seta arbeiðið í gongd at binda hvønn bygning sær í fjarhitanetið. Málið beint í býráðið.

**Býráðsfundur 24. mars 2022:** Einmælt samtykt.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>24. mars 2022 | Blað nr.: 327<br>Formansins merki: |

# 69/22 Bussleiðin - undangóðkenning / prækvalifikation av bjóðarum til komandi útbjóðing og gerð av útboðstilfari til rakstur av komandi bussleið

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 22.06.2021 | 40/21 | 21/02467-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 23.06.2021 | 180/21 | 21/02467-1 |
| 3 Býráðsfundur | 23.06.2021 | 192/21 | 21/02467-1 |
| 4 Tekniska nevnd | 13.09.2021 | 50/21 | 21/02467-1 |
| 5 Tekniska nevnd | 10.01.2022 | 1/22 | 21/02467-1 |
| 6 Tekniska nevnd | 07.03.2022 | 15/22 | 21/02467-1 |
| 7 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 08.03.2022 | 17/22 | 21/02467-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 16.03.2022 | 80/22 | 21/02467-1 |
| 9 Býráðsfundur | 24.03.2022 | 69/22 | 21/02467-1 |

**Upprunin til málið**
Sáttmála skeiðið við Sp/f Gundur´s bussar er skjótt komið at enda, og skal øll koyringin hjá Bussleiðin bjóðast út av nýggjum.

**Lýsing av málinum**
Í sambandi við at Bussleiðin skal bjóðast út av nýggjum, kann kommunan rokna við, at tað eru nógv, sum eru áhugaði at bjóða uppá komandi útbjóðing. Í seinastu útbjóðingini vóru bjóðarar, sum ikki høvdu royndir innan busskoyring/kolletiva ferðslu og ikki fíggjarliga orku/kapital til at lyfta tað stóru uppgávuna, sum bussleiðin er. Tað er neyðugt við undangóðkenning/prækvalifikation av bjóðarunum, sum hevur til endamáls at fáa best egnaðu fyritøkur at bjóða uppá komandi bussleið. Eisini er tað ein fyrimunur við einari undangóðkenning, tá tað kann roknast við nógvum bjóðarum, fyri at fyribyrgja, at nógvir bjóðarar/fyritøkur brúka orku, tíð og pening at gera eitt tilboð, sum vísur seg ikki at lúka ásettu krøvini í útboðstilfarinum.

Útbjóðingartilfarið verður gjørt eftir sama leisti, sum til seinasta útbjóðið og tekur støðu í tí víðkaðu ferðaætlanini, sum bussleiðin hevur koyrt eftir síðani 2019. Ferðaætlanin varð gjørd við støði í frágreiðing, sum fyritøkan Cowi gjørdi fyri kommununa 2018/19. Ferðaætlanin varð tá víðkað við fleiri effektivum koyritímum. Koyrt var longri bæði leygardag og sunnudag og tá var eisini farið undir vikuskiftiskoyring til Kollafjarðar, Kaldbak, Velbastað og Kirkjubø.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**
Umsitingin framleggur tíðarætlan fyri undangóðkenning/prækvalifikatión og útbjóðingini av Bussleiðini

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
J. nr. 17/00267 Støðutakan um leingjan av sáttmálanum við Sp/f Gundurs Bussar

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
Bussleiðin_Undangóðkenning_2021

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/læ ttar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☒**

Tá undangóðkenningin av bjóðarunum er komið uppá pláss verða bæði málini, undangóðkenning og útbjóðingartilfar borið aftur í teknisku nevnd til víðari støðutakan.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at samtykkja at fara undir undangóðkenning av bjóðarum uppá Bussleiðina og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 22. juni 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 23. juni 2021:** Samtykt at taka undir við Teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. juni 2021:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Tá umsóknarfreistin var farin 9. august, var bara ein umsókn komin. Tá seinasta útbjóðingin var av Bussleiðini, sum varð í 2010, vóru fimm umsóknir, av teimum vóru bara tveir, sum vóru undangóðkendir.
Íkomna støðan ger, at tað ikki ber til at fara undir eina útboðstilgongd við fleiri undangóðkendum og innbodnum veitarum.
Mett verður, at ein leingjan av freistini til undangóðkenning ella ein nýggj og broytt tilgongd til undangóðkenning kann viðføra seinkingar í mun til avgreiðslu av einum nýggjum sáttmála um Bussleiðina. Hetta kann aftur viðføra, at sáttmálin við verandi veitara aftur má leingjast.
Tó ber til at fara undir eina tilgongd við opnari samráðing við einasta undangóðkenda veitara innanfyri verandi tíðarætlan og fíggjarkarm. Umsitingin metir, at slík samráðing kann við fyrimuni fremjast við serkønari ráðgeving, fyri at tryggja at komandi sáttmálin er nøktandi fyri kommununa í øllum sáttmálaskeiðnum. Mett verður, at henda ráðgeving kann verða veitt innan fyri ein karm á kr. 300.000, og verður hetta fíggjað innanfyri verandi játtan.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til:

- at heimila umsitingini at fara undir opnar samráðingar við viðkomandi og undangóðkenda umsøkjara.
  at heimila umsitingini at heinta inn uttanhýsis ráðgeving í sambandi við fyrireikingarnar og útinnanina av opnu samráðingunum við undangóðkenda veitaran, hetta innan fyri verandi játtan.

**Tekniska nevnd 13. september 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**

Umsitingin hevur havt fundir við umboð fyri Sp/f Gundurs Bussar um skipan av nýggjum sáttmála og um broyting av núverandi framlongda sáttmálanum.
Fundirnir hava verið um:

- Verandi ferðaætlan, farleiðir, komandi leiðir og framtíðar útbygging runt í býnum.

- Útgerð í bussum (interiør, kt-tøkni til trygd og kunning) o.a. Stødd av bussum í mun til leiðir. Skulu bussarnir verða drivnir av diesel, gass, ella vetni.

- Viðurskifti rundan um Bussleiðina: skýlir, steðgipláss, endastøðir, verkstaður og bungur/trupulleikar við ferðsluni.

- Fíggjarlig viðurskifti:
  - núverandi fíggjarkarmar,
  - komandi fíggjarkarmar,
  - prísvøkstur/prístalsregulering,
  - møguligar broytingar í sáttmálaskeiðinum,
  - komandi sáttmálalongd, skal sáttmálin verða stuttur/fleksibul – dýrur, ella langur sáttmáli, sum er støðugur, tryggur og bíligur.

Fíggjarætlanin fyri 2022 er samtykt við eini skerjing av Bussleiðini áleið 2 mió. kr. í mun til 2021. Komandi sáttmáli fyri Bussleiðina skal sostatt verða hesa upphæddina bíligari í rakstur enn higartil.
Umsitingin hevur gjøgnumgingið núverandi ferðaætlan og kannað, hvørjar broytingar og sparingar kunnu gerast fyri at røkka sparingunum í fíggjarætlanini. Tað verða ikki gjørdar kollveltandi broytingar innanfyri núverandi ferðaætlan og farleiðir, men smærri tillagingar og broytingar verða gjørdar.

Sum heild hevur verið hugt eftir hvar sparingar kunnu gerast, uttan tað ávirkar tær farleiðir, har flest fólk ferðast. Størstu sparingarnar verða á leið 4, sum ikki kemur at koyra eftir kl. 18.00 gerandisdagar og í vikuskiftinum. Broytingar verða gjørdar á leið 3, sum kemur at koyra ein part av tí farleiðini, sum leið 4 koyrir nú. Hendan broyting á farleiðini hjá leið 3 verður um kvøldið og í vikuskiftinum. Fyrsti túrurin hjá leið 6 úr Steinatúni kl. 06.43 til Velbastað/Kirkjubø verður ikki við í komandi ferðaætlanini, tí hesin túrurin verður næstan einki brúktur. Leygardagskoyring til bygdirnar Kollafjørður, Kaldbak, Velbastað og Kirkjubø fer frá 4 niður í 3 túrar. Eisini verða sparingar gjørdar á øllum farleiðunum, sum koyra sunnudag. Í núverandi ferðaætlan koyra bussarnir sunnukvøld til kl. 21.00 í Havn, men eftir tí nýggju ferðaætlanini gevast bussarnir at koyra kl. 19.00. Undirtøkan hevur ikki verið stór fyri sunnudagskoyringini til bygdirnar, hendan koyringin verður ikki koyrd í komandi ferðaætlan.

Sum nakað nýtt byrjar leið 4 fyrsta túrin í Hoyvík og koyrir beinleiðis umvegis Undir Brúnni, Villingadalsvegin út á Glasir/ Skúlan á Fløtum. Leið 1 koyrir eisini ein morguntúr úr Hoyvík. Tey, sum arbeiða á Landssjúkrahúsinum, kunnu soleiðis verða til arbeiðis áðrenn kl. 07.00. Tann nógva ferðslan, sum nú er, ger, at leið 4 ikki klárar at yvirhalda núverandi ferðaætlan í tysingartíðini. Tí kann koma fyri, at túrar detta heilt burtur. Ein loysn er, at leggja leið 4 og leið 5 saman. Samanlagda farleiðin verður eitt sindur longur, men skuldi loyst trupulleikan, sum í seinastuni hevur verið á leið 4 og tænastan verður ikki verri, har sum leið 5 koyrir nú.

Ein onnur broyting er, at effektivir koyritímar verða fluttir frá leið 2 til leið 3. Leið 2 koyrir frá Norðasta Horni umvegis Landssjúkrahúsið yvir í eysturbýin niðan á Háls og so aftur út á sama veg. Leið 3 koyrir frá AB-vøllinum fram við Glasir, gjøgnum miðbýin niðan í Hvítanes, Hoyvík og út aftur somu farleið. Tað vísir seg, at tað er ikki ferðafólkagrundarlag fyri, at tað verður koyrt 4 ferðir um tíman á farleiðini hjá leið 2. Farið verður frá 4 ferðir til 3 ferðir um tíman, samstundis fer leið 3 frá at koyra 2 ferðir til at koyra 3 ferðir um tíman.

Sum nú er, hevur Sp/f Gundurs Bussar ein framlongdan sáttmála við kommununa um Bussleiðina fram til 1. januar 2023. Uppskot til komandi ferðaætlan við tillagingum og broytingum hava verið grundarlagið undir samráðingunum við umboð fyri S/pf Gundurs Bussar um komandi sáttmála av Bussleiðini.

Tilboð er komið frá Sp/f Gundurs Bussar uppá komandi ferðaætlan frá 1. januar 2023, til og við 31. desember 2031, men við tí treyt at møguleiki er at framleingja sáttmálan við eitt ár í senn, upp til tvey ár.

Umframt samráðingar um broytingar í longda sáttmálanum til tess at røkka sparingum fyri 2022, hava opnu samráðingarnar við Sp/f Gundurs Bussar um sáttmála fyri tíðar skeiðið eftir 1. januar 2023 borið á mál við einum uppskoti til sáttmála, sum hevur sama bul sum galdandi sáttmálin. Høvuðstættirnir í nýggja sáttmálanum eru tó hesir:

1. Tilboðið er bygt á komandi ferðaætlan (við broytingunum í mun til verandi ferðaætlan, sum lýst omanfyri),
2. Prísurin er pr. effektiva koyritíma og koyring pr. ár.
3. Sáttmálin er galdandi frá 1. januar 2023 til 31. desember 2031 við møguleika at fyri leingjan við eitt ár í senn, upp til tvey ár.
4. Tilboðið umfatar keyp av 16 nýggjum dieselbussum.
    a. Hesir bussar eru til leið 1, 2, 3, 4 og 5, umframt 3 eykabussar.
    b. Ein 6 ára gamal bussur, kemur framhaldandi at koyra til Kollafjarðar og ein eldri bussur koyrir skúlaleiðina í Kollafirði. Hesir verða skiftir út eftir tørvi við nýggjar bussar í sáttmálaskeiðinum.
    c. Partarnir skulu í sáttmálaskeiðinum leypandi endurmeta, hvørt el, gass ella vetnisbussar skulu koma í staðin fyri dieselbussar.
5. TK kann í sáttmálaskeiðinum uppseta ferðafólkateljarar í bussunum og loyvir sáttmálin at effektiva koyrda tímatalið minkar ella økist 10% uttan at taksturin broytist.
6. Sum ein partur av tilboðnum varð avtalað, at sáttmálin, sum varð gjørdur fyri 2022, verður koyrdur fyri sama gjald, sum sáttmálin frá 2023 og úteftir. Hetta er galdandi frá tí, tá sáttmálin er endaliga undirskrivaður av báðum pørtum og verður sáttmálin, tá galdandi frá fyrsta í eftirfylgjandi mánaða.
7. Sáttmálin verður prístalsviðgjørdur við støði í dagfestingini nevnd í pkt. 6.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at samtykkja ein nýggjan 9-ára sáttmála við Sp/f Gundur Bussar og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 10. januar 2022:** Útsett.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur bílagt kanning frá fyritøkuni AFRY um at lýsa møguleikarnar at umleggja bussleiðina til grønari orku. Kannast skulu el, biogass og vetni sum alternativar orkukeldur til bussleiðina. Fyritøkan hevur latið umsitingini ávegis frágreiðing, sum, hóast endaligar niðurstøður ikki eru gjørdar, kunnu vísa ávísar ábendingar um, hvussu kommunan mest skynsamt kann implementera grønari orkukeldur í sambandi við útbjóðing av nýggjum sáttmála. Tað eru fyrimunir og vansar við øllum teim kannaðu orkukeldunum: vetni, biogass og el í mun til dieselbussar:

- El:
    - Fyrimunir:
        - 1/3 $CO_2$ fótavtrykk
        - Bíligari orkukelda
        - Sama ella bíligari viðlíkahald
    - Vansar:
        - Bussarnir kosta 2 ferðir so nógv sum diesel bussar
        - El bussar klára ikki heilar dagsrutur upp á eina løðing (ikki galdandi fyri leið 4). Tí krevjast skundløðistøðir og/ella eykabussar
        - Avbjóðingar kunnu koma í mun til hita og avfukting í kabinuni
        - Infrakervið til skundløðistøðir er ikki upprættað og kemur at kosta uml. 2,5 mió. kr. fyri hvørja leið. Tað er ikki avgreitt, hvussu hesin kostnaður kann býtast millum veitaran av busstænastuni, SEV og TK.
        - Umsitingin væntar ikki, at skundløðistøðir kunnu verða klárar til fyrstu helvt av 2023, tá nýggi sáttmálin skal setast í gildi.
- Biogass:

- Fyrimunir:
  - $CO_2$ neutralt
  - Føroysk framleiðsla
  - Viðlíkahaldið er samanberligt við dieselbussar
  - Dagsleiðir kunnu røkkast við einari áfylling
- Vansar:
  - Bussarnir eru nakað dýrari enn dieselbussar
  - Útlát av Sox og Nox bitlum
  - Bert ein veitari í Føroyum
  - Veitingartrygd kann gerast ein avbjóðing
  - Kostnaðurin á orkukelduni er hægri enn á diesel
  - Útbyggingar skulu gerast á biogassverkinum, sum ikki verða klárar fyrstu tvey árini

- Vetni (er ikki partur av ávegis frágreiðingini, men verður tikin við í endaligu frágreiðingina):
  - Fyrimunir:
    - $CO_2$ fótavtrykk er 0
    - Yvirskotsorka frá vindmyllum
    - Dagsleiðir kunnu røkkast upp á eina áfylling.
    - Skjótar áfyllingar
    - Fleiri orkuveitarar
  - Vansar:
    - Dýrari bussar
    - Kostnaður av orku er óvissur
    - Ongar áfyllingarstøðir eru klárar, men eru væntandi
- Diesel:
  - Fyrimunir:
    - Bíligir bussar
    - Kend tøkni/rakstur
    - Fáir og smáir váðar
    - Allar dagsleiðir kunnu røkkast við eini áfylling.
    - Skjótar áfyllingar
    - Infrakervi er virkandi
  - Vansar:
    - Høgt $CO_2$ fótavtrykk
    - Útlát av SOx og Nox bitlum
    - Orkuprísur fylgir heimsmarknaðinum – kann verða ein váði.

Gundurs Bussar hava boðið kommununi at gera sáttmála um bussleiðina frá 1. januar 2023 eftir einum av tveimum modellum:

<u>Tilboð 1:</u>
1. Tilboðið er bygt á komandi ferðaætlan (við broytingunum í mun til verandi ferðaætlan, sum lýst omanfyri),
2. Prísurin er pr. effektiva koyritíma og koyring pr. ár.
3. Sáttmálin er galdandi frá 1. januar 2023 til 31. desember 2031 við møguleika fyri leingjan við eitt ár í senn, upp til tvey ár.
4. Tilboðið umfatar keyp av 16 nýggjum dieselbussum.
   a. Hesir bussar eru til leið 1, 2, 3, 4 og 5, umframt 3 eykabussar.
   b. Ein 6 ára gamal bussur, kemur framhaldandi at koyra til Kollafjarðar og ein eldri bussur koyrir skúlaleiðina í Kollafirði. Hesir verða skiftir út eftir tørvi við nýggjar bussar í sáttmálaskeiðinum.
   c. Partarnir skulu í sáttmálaskeiðinum leypandi endurmeta, hvørt el, gass ella vetnisbussar skulu koma í staðin fyri dieselbussar.
5. TK kann í sáttmálaskeiðinum uppseta ferðafólkateljarar í bussunum og loyvir sáttmálin at effektiva koyrda tímatalið minkar ella økist 10% uttan at taksturin broytist.

6. Sum ein partur av tilboðnum varð avtalað, at sáttmálin, sum varð gjørdur fyri 2022, verður koyrdur fyri sama gjald, sum sáttmálin frá 2023 og úteftir. Hetta er galdandi frá tí, tá sáttmálin er endaliga undirskrivaður av báðum pørtum og verður sáttmálin tá galdandi frá fyrsta í eftirfylgjandi mánaða.
7. Sáttmálin verður prístalsviðgjørdur við støði í dagfestingini nevnd í pkt. 6.

Tilboð 2:
1. Tilboðið er bygt á komandi ferðaætlan (við broytingunum í mun til verandi ferðaætlan, sum lýst omanfyri),
2. Prísurin er pr. effektiva koyritíma og koyring pr. ár.
3. Sáttmálin er galdandi frá 1. januar 2023 til 31. desember 2031 við møguleika at fyri leingjan við eitt ár í senn, upp til tvey ár.
4. Tilboðið umfatar keyp av 15 nýggjum dieselbussum og tveimum el-bussum til náttarløðing.
    a. Dieselbussar eru til leið 1, 2, 3 og 5, umframt 3 eykabussar
    b. El-bussar eru til leið 4. Um Elbussarnir av tøkniligum áum ikki kunnu koyra, kunnu diesel bussar setast inn í staðin.
    c. Ein 6 ára gamal bussur, kemur framhaldandi at koyra til Kollafjarðar og ein eldri bussur koyrir skúlaleiðina í Kollafirði. Hesir verða skiftir út eftir tørvi við nýggjar bussar í sáttmálaskeiðinum.
    d. Partarnir skulu í sáttmálaskeiðinum leypandi endurmeta, hvørt el, gass ella vetnisbussar skulu koma í staðin fyri dieselbussar.
5. TK kann í sáttmálaskeiðinum uppseta ferðafólkateljarar í bussunum og loyvir sáttmálin at effektiva koyrda tímatalið minkar ella økist 10%, uttan at taksturin broytist.
6. Sum ein partur av tilboðnum varð avtalað, at sáttmálin, sum varð gjørdur fyri 2022, verður koyrdur fyri sama gjald, sum sáttmálin frá 2023 og úteftir. Hetta er galdandi frá tí, tá sáttmálin er endaliga undirskrivaður av báðum pørtum og verður sáttmálin tá galdandi frá fyrsta í eftirfylgjandi mánaða.
7. Sáttmálin verður prístalsviðgjørdur við støði í dagfestingini nevnd í pkt. 6.

Tilboð 1 verður samlað uml. 2 mió. kr. bíligari pr. ár (2021 prísir) enn verandi longdi sáttmálin. Tilboð 2 verður fyri sama samlaða kostnað sum bussleiðin í verandi longda sáttmála. Sáttmálarnir eru roknaðir eftir tímakostnaði fyri effektivt koyrdar tímar. Tí vil hesin kostnaðurin fyri tilboð 2 gerast uml. 1,9% hægri enn fyri verandi koyring og 7,1% hægri enn fyri tilboð 1. Tilboð 1 er til 5,6% lægri tímakostnað enn verandi koyring.

Fyri 2022 merkir tilboð 1, at av tí at játtanin til bussleiðina í fíggjarætlanini fyri 2022 er skerd við kr. 2.515.000 í mun til 2021, at tað koma at mangla uml. 1.2 mió. kr. fyri at varðveita ætlaðu tænastuna. Fyri tilboð 2 er tilsvarandi støða tann, at tað mangla uml. 2.5 mió. kr. fyri at varðveita ætlaðu tænastuna.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at gera nýggjan 9-ára sáttmála við Sp/f. Gundur Bussar við støði í tilboð 2 og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

Av tí at samlaði kostnaðurin fyri tilboð 2 viðførir, at bussleiðin ikki kann rekast fyri ta i fíggjarætlanini fyri 2022 játtaðu upphædd verður somuleiðis mælt til, at hesin munurin verður fíggjaður við eykajáttan, og at málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina, sum skal taka avgerð um, hvaðani fíggingin til hesa eykajáttan skal koma.

**Tekniska nevnd 07. mars 2022:** Ein meiriluti, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen og Bjørg Dam, samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í náttúru- og umhvørvisnevndina til kunningar.

Ein minniluti, Jákup Dam og Ruth Vang, atkvøður blankt.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 08. mars 2022:** Kunnað varð um málið.
Annfinn Brekkstein luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**

Í samband við kunning í Náttúru- og umhvørvisnevndini 8. mars 2022 kom fram, at Afry hevur verið í samband við tveir leiðandi framleiðarar av el-bussum við fyrispurningi um el-bussar kunnu røkka eina dagsrutu, sum tær eru skipaðar í ætlaðu komandi ferðaætlan. Hesir vildu ikki veita trygd fyri, at teirra bussar kunnu røkja nakra dagsrutu, einans við náttarløðing. Her er talan um bussar, sum eru samanberligir við teir bussar, sum ætlanin er, at Gundurs Bussar skulu keypa, um sáttmáli verður gjørdur eftir tilboð 2. Í uppskotinum til henda sáttmála verður kortini tryggjað veitaranum, at um el-bussur ikki kann røkja heila dagsrutu, so verður loyvt honum at seta dieselbuss inn í staðin, í tann mun el-bussurin ikki fær røkt leiðina. Umsitingin vil, hóast framleiðarar ikki kunnu veita trygd fyri at bussarnir kunnu røkja eina heila dagsrutu, mæla til, at royndir verða gjørdar við el-bussum, og hetta kann best gerast við at lata el-bussar røkja leið 4.

**Fíggjarnevndin 16. mars 2022:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson og Annika Olsen, tekur undir við teknisku nevnd. Viðv. meirkostnaðinum á mettar 2,5 mió. kr., verður umbøn um eykajáttan at leggja fyri aftur, tá neyvari upphædd og tíðarætlan eru kend.

Ein minniluti, Elsa Berg, tekur ikki undir við tilmælinum. Sparingar í túratalinum eiga ikki at verða framdar, umframt at dieselbussar ikki eiga at verða keyptir.

**Býráðsfundur 24. mars 2022:** Fyrst varð atkvøtt um soljóðandi broytingaruppskot frá Elsu Berg:

Tikið verður undir við punkt 2-7 undantikið at punkt 4d verður broytt til:
Royndirnar við elbussunum verða eftirmettar eftir 1 ár, og tá skal avgerð takast um at skifta hinar bussarnar um til el í seinasta lagi í 2025.

Broytingaruppskotið fall við seks atkvøðum fyri sjey ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Jákup Dam, Gunvør Balle, Annika Olsen, Birgir Nielsen og Ruth Vang.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk og Bjørg Dam,

Síðani varð atkvøtt um broytingaruppskot frá borgarstjóranum at taka undir við tilmælinum frá meirilutanum í fíggjarnevndini, og at býráðið samtykkir, at umleggingin av allari Bussleiðini til grøna orku er framd í seinasta lagi 2027. Síðstnevnda er ikki partur av sáttmálanum við Gundurs bussar.

Broytingaruppskotið varð samtykt við tíggju atkvøðum fyri, tveimum ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Bergur Robert Danm Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Annika Olsen, Birgir Nielsen og Ruth Vang.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg og Jákup Dam.

Blankt atkvøddi: Gunvør Balle.

# 70/22 Áheitan um yvirtøku av vegi matr. nr. 781n, Mariugøta 5 , Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 07.03.2022 | 16/22 | 21/02538-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 16.03.2022 | 81/22 | 21/02538-2 |
| 3 Býráðsfundur | 24.03.2022 | 70/22 | 21/02538-2 |

**Upprunin til málið**
Eigarin av vegnum matr. nr. 781n, Tórshavn, ynskir, at kommunan yvirtekur privata vegastrekkið av Mariugøtu, stødd 165 m².

**Lýsing av málinum**
Mariugøta er partvís kommunalur og privatur vegur. Talan er um ein gamlan veg, har tann privati parturin av vegnum ongantíð er liðugt gjørdur. Níggju sethúsadressur eru á Mariugøtu, harav seks við atgongd til kommunala partin av vegnum og tríggjar hava atgongd til privata partin av Mariugøtu.

Eigarin av innastu ognini á Mariugøtu er í ferð við at sundurbýta sín matrikul til eitt nýtt grundstykki og heitur eisini á kommununa um at yvirtaka privata partin av vegnum matr. nr. 781n, Tórshavn, fyri at tryggja vegatgongd til tað nýggja grundstykkið.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**
Fólk frá umsitingini hava verið á staðnum og hugt at vegnum. Niðurstøðan er, at vegurin er ikki í góðkendum standi.

Umsitingin mælir tó til at yvirtaka privata partin av vegnum, og at leggja matr. nr. 781n, Tórshavn saman við vegnum litra cr, Tórshavn. Hesin partur av Mariugøtu verður tó ikki dagførdur, fyrr enn neyðug fíggjarlig orka er avsett til dagføring av vegnum.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
Kort j.nr. 21/02538-5

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**
Fíggjarligu útreiðslurnar í sambandi við marknaumskipanina av matr. nr. 781n, Tórshavn, eru áleið 5.000 til 10.000 kr.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at kommunan yvirtekur vegin matr. nr. 781n, Tórshavn og at kostnaður í sambandi við marknaumskipan verður fíggjaður av konto 8110 Vegir, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 07. mars 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 16. mars 2022:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. mars 2022:** Einmælt samtykt.

| Býráðsfundur<br>24. mars 2022 | Blað nr.: 336 |
|---|---|
| | Formansins merki: |

# 71/22 Parkeringsviðurskifti vid fótbóltsvøllin í Vika á Argjum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 07.02.2022 | 6/22 | 22/00319-2 |
| 2 Mentamálanevndin | 09.02.2022 | 40/22 | 22/00319-2 |
| 3 Mentamálanevndin | 09.03.2022 | 82/22 | 22/00319-2 |
| 4 Fíggjarnevndin | 16.03.2022 | 82/22 | 22/00319-2 |
| 5 Býráðsfundur | 24.03.2022 | 71/22 | 22/00319-2 |

**Upprunin til málið**
Áheitan frá borgarum á Argjum viðv. Parkeringsviðurskiftunum við fótbóltsvøllin í Vika á Argjum.

**Lýsing av málinum**
Nú AB er flutt upp í bestu deildina í fótbólti og aftur fer at spæla sínar heimadystir á fótbóltsvøllinum í Vika á Argjum, er neyðugt at skipa parkeringsviðurskiftini á økinum enn betri.

Umsitingin hevur gjørt eitt dispositiónsuppskot um, hvussu eitt parkeringsøki niðan fyri AB-vøllin kann gerast. Her kann roknast við, at í øllum førum 60 persónbilar kunnu fáa pláss. Hetta viðførir, at uml. 360 m av vegastrekki, har bilar áður hava parkerað fram við jaðaranum, nú kann blíva leyshildið.

**Lógir, ásetingar o.a.**
-**Upplýsingar frá umsitingini**
**-**
**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
-
**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Mentamáladeildin/Ítróttaanlegg taka undir við ætlanini at skipa økið betri – til gagn fyri bæði ítróttavirksemi og økið annars. Spurningurin um fígging verður at taka upp í mentamálanevndini.

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☒

**Tilmæli:**
Mentamáladeildin varðar av økinum, og fíggjarligar avleiðingar mugu takast upp saman við teimum, men ein samlað kostnaðarmeting kemur at liggja um 270.000 kr. Fyri alt arbeiðið.

Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at heimila umsitingini at arbeiða víðari við uppskotinum í tøttum samstarvi við mentamáladeildina.

Mælt verður eisini til at beina málið í mentamálanevndina at finna fígging.

**Tekniska nevnd 07. februar 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Mentamálanevndin 09. februar 2022:** Útsett.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 270.000 til parkeringsloysnina av løgukarmi 5775 Fótbóltsvøllir (LK57039) á projektkontu L57039 Fótbóltsvøllir, Argir/Hoyvík. Málið at beina í býráði um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 09. mars 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 16. mars 2022:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. mars 2022:** Einmælt samtykt.

## 72/22 Skipan av Stórutjørn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 03.10.2018 | 206/18 | 18/03468-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 10.10.2018 | 285/18 | 18/03468-1 |
| 3 Býráðsfundur | 25.10.2018 | 250/18 | 18/03468-1 |
| 4 Býráðsfundur | 29.11.2018 | 276/18 | 18/03468-1 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 11.09.2019 | 150/19 | 18/03468-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 18.09.2019 | 244/19 | 18/03468-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 23.10.2019 | 280/19 | 18/03468-1 |
| 8 Byggi- og býarskipanarnevndin | 06.11.2019 | 181/19 | 18/03468-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 30.10.2019 | 292/19 | 18/03468-1 |
| 10 Býráðsfundur | 30.10.2019 | 259/19 | 18/03468-1 |
| 11 Fíggjarnevndin | 13.11.2019 | 315/19 | 18/03468-1 |
| 12 Býráðsfundur | 28.11.2019 | 276/19 | 18/03468-1 |
| 13 Býráðsfundur | 12.12.2019 | 309/19 | 18/03468-1 |
| 14 Byggi- og býarskipanarnevndin | 18.05.2020 | 110/20 | 18/03468-1 |
| 15 Býráðsfundur | 28.05.2020 | 106/20 | 18/03468-1 |
| 16 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.02.2021 | 15/21 | 18/03468-1 |
| 17 Fíggjarnevndin | 17.02.2021 | 26/21 | 18/03468-1 |
| 18 Býráðsfundur | 25.02.2021 | 61/21 | 18/03468-1 |
| 19 Býráðsfundur | 25.03.2021 | 99/21 | 18/03468-1 |
| 20 Byggi- og býarskipanarnevndin | 10.01.2022 | 4/22 | 18/03468-1 |
| 21 Fíggjarnevndin | 19.01.2022 | 16/22 | 18/03468-1 |
| 22 Býráðsfundur | 27.01.2022 | 15/22 | 18/03468-1 |
| 23 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.03.2022 | 74/22 | 18/03468-1 |
| 24 Tekniska nevnd | 07.03.2022 | 23/22 | 18/03468-1 |
| 25 Fíggjarnevndin | 16.03.2022 | 83/22 | 18/03468-1 |
| 26 Fíggjarnevndin | 23.03.2022 | 92/22 | 18/03468-1 |
| 27 Býráðsfundur | 24.03.2022 | 72/22 | 18/03468-1 |

**Upprunin til málið:**
Tórshavnar kommuna er í menning, og stóri fólkavøksturin merkist serliga í høvuðsstaðarøkinum. Tørvur er á at víðka um býin, og í hesum sambandi verður farið undir arbeiðið at skipa Stórutjørn, matr. nr. 135ed og 1æf, Hoyvík – økið norðanfyri Klingruna og vestanfyri býlingin Inni á Gøtu, sum er uml. 525 ha til støddar, sí skjal *Stóratjørn*.

Geografiskt liggur økið væl fyri, millum bústaðarøkið í Hoyvík, vinnuøkið á Hjalla og nýggja innkomuvegin, sum verður gjørdur í sambandi við Eysturoyartunnilin.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Í kommunuætlanini hjá Tórshavnar kommunu er Stóratjørn eitt av teimum økjunum, ið mett veður at hóska seg væl til býarvøkstur. Í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu liggur økið í A3 øki, sum er ætlað blandaðari bústaða- og miðstaðabygging, D2 øki, ætlað ítrótti og øðrum, sum kann virka saman við ítróttinum og D1 øki, sum er økið nýggi kirkjugarðurin í Hoyvík liggur í.

Sum ein liður í at útvega nýtt byggilendi í kommununi, tað verði seg til bústaðir, vinnu, ítrótt, mentan o.a., er ætlanin í fyrsta umfari at bjóða arbeiðið at skipa økið við Stórutjørn út til uttanhýsis ráðgeva.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri A3 øki eru m.a.:
- *Økið verður lagt til blandaða bústaða- og miðstaðabygging, har loyvt er at hava handlar, smáhandverk og minni virkir, skrivstovur, stovnar, samkomuhús, heilsubótarhøli og tílíkt.*
- *Útstykkingar kunnu bert gerast sambært serstakari byggisamtykt.*
- *Í serstakari byggisamtykt kann víkjast frá tal av hæddum og verða loyvt at byggja hægri og fyriskipað at húsini verða sett í veglinju ella byggilinju, (víkja frá ásettu byggi- og nýtslustigunum og minstu grundstykkjavídd).*

Ásetingar fyri D1 øki:
- *Umráðispartarnir D1 verða í síni heild lagdir til almenning, náttúrufriðingar- og mentunarlig endamál og tílíkt. Økið fram við Hoydalsá kann einans verða skipað og bygt sambært serstakari byggisamtykt fyri økið.*
- *Bygging í D1 kann bert loyvast sambært serstakari byggisamtykt, sum er í samsvar við stk. 1.*

Ásetingar fyri D2 øki eru m.a.:
- *Umráðisparturin verður kannaður ítrótti og øðrum, sum eftir eini heildarætlan fyri alt økið ella ein part av økinum kann virka saman við ítróttinum.*
- *Útstykking innan fyri umráðispartarnar D2 og D3 verður einans loyvd eftir serstakari byggisamtykt.*

**Upplýsingar frá umsitingini**
Í 2007 varð ætlan um at skipa eina serstaka byggisamtykt fyri Stórutjørn. Økið varð lagt av til vinnuøki, bústaðarbygging, ítróttar- og frítíðarvirksemi og almenn fríøki, sí kortskjal *Serstøk byggisamtykt – kort.*

Bygging og skipan eftir serstøku byggisamtyktini fyri Stórutjørn varð tó aldrin til veruleika og ongar ætlanir eru at skipa økið eftir serstøku byggisamtyktini, sum eftir hondini er vorðin ótíðarhóskandi. Tí verður arbeitt við uppskoti um at avtaka serstøku byggisamtyktina fyri Stórutjørn, so arbeitt kann verða við víðari menning og býarvøkstri í økinum.

Í 2015 varð samtykt at geva SEV rættin til optión at keypa eitt uml. 20.000-30.000 $m^2$ stórt byggilendi við Stórutjørn, partur av matr. nr. 135ed, Hoyvík. Hendan optiónin var galdandi í 1 ár, og av tí at Tórshavnar kommuna ikki hevur hoyrt meira frá umsøkjaranum, er avtalan ikki galdandi meir.

Magn stendur á bíðilista hjá kommununi um so er, at kommunan ger eina útstykking til vinnustykkir. Men Magn hevur einans ynski um eitt grundstykki, sum skal liggja við innkomuvegin, og hevur man í síni tíð tikið atlit til hetta ynski í Stórutjørn verkætlanini, har man vildi avseta eitt øki til eina bensinstøð í Hoyvíkshaganum. Har fyriliggur tó ikki ein føst avtala, so um kommunan ikki avsetur eitt øki til bensinstøð í Hoyvíkshaganum, so er einki grundstykki tøkt at tilluta Magn. Somuleiðis er tað ein avbjóðing, at ein einstakur keypari verður valdur at keypa eitt grundstykki við bestu plasering út til møguligan innkomuveg.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
*Serstøk byggisamtkyt Stóratjørn – broyting av byggisamtykt,* journal nr. 2006-1204.

*Selmar Nielsen: Umsókn vegna SEV um rættin til optión at keypa byggilendi við Stórutjørn partur av matr. nr. 135ed, Hoyvík,* journal nr. 15/02686.
*Avtøka av serstøku byggisamtyktini fyri Stórutjørn,* journal nr. 17/03802.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Ongin

**Umhvørvisárin**
Í sambandi við at serstøk byggisamtykt varð gjørd fyri Stórutjørn í 2008, gjørdi Føroya Náttúrugripasavn, eftir áheitan frá Tórshavnar kommunu, árinskanning av bygging í økinum, sí skjal *árinskanning 1-34.pdf*.

Árinskanningin vísti m.a. at:

- 47 plantusløg vóru skrásett í økinum, ongar av hesum plantum vóru sjáldsamar.
- 13 fuglasløg eiga í økinum. Fýra teirra eru á føroyska reyðlistanum og fevnd av Bonn-sáttmálanum (grágás, spógvi, lógv og vípa).
- Talið av sordýrum er skiftandi úr einum stað í annað. Funnu klukkurnar eru millum vanligu klukkurnar í Føroyum.

Í niðurstøðuni av árinskanningini verður mælt til, at lyngurin í økinum verður vardur bæði í sambandi við grøn øki á byggiøkinum og á økinum uttanum. Somuleiðis verður mælt til at geva fuglinum frið til at byggja á økjunum nærindis (t.d. við at virksemi sum spreinging, ið órógvar fuglin, ikki verður framt, tá ið fuglurin reiðrast).

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
*Stóratjørn,* journal nr. 18/03468-2.
*Stóratjørn – byggisamtykt,* journal nr. 18/03468-2.
*Innkomuvegur,* journal nr. 18/03468-2.
*SEV optión,* journal nr. 18/03468-2.
*Árinskanning 1-34.pdf.* journal nr. 18/03468-4.
*Serstøk byggisamtykt – kort,* journal 18/03468-5.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at játta kr. 200.000 av konto L62032 Gøta kring Havnina og fiskastykki, til at gera avtalu við uttanhýsis ráðgeva um at skipa økið við Stórutjørn og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 03. oktober 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 10. oktober 2018:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og játta kr. 200.000 av konto L62032 á konto 7315 kommunuætlanin, og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 25. oktober 2018:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð.

**Býráðsfundur 29. november 2018:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

**Ískoyti:**
Síðani málið varð samtykt á býráðsfundi 29. november 2018, hevur umsitingin arbeitt við at framleiða tilfar, ið skal nýtast í sambandi við at skipan av økinum skal bjóðast út sum almenn hugskotskapping.

Í kappingartilfarinum verður ført fram, at ynski er at skipa økið til blandaða búðstaða- og miðstaðabygging, stórhøll og lætta vinnu. Atlit skulu takast til verandi lendið, flora og fauna og søguna í økinum, sum gamlir torvheiðar.

Lagt verður upp til at bústaðarbyggingin, sum verður í økinum, er blandað, og at dentur verður lagdur á trivnaðin í økinum, bæði tá hugsað verður um støddarlutfallið, og í skipanini av útiøkjunum.

Í sambandi við kommunuætlanina, eru nøkur økir vald út, sum hóska seg til býarvøkstur, harímillum er Stóratjørn eitt av teimum best egnaðu, sí øki 1, skjal *Vakstrarøkir í Hoyvík*. Øki 1, 2 og 3 liggja uppat hvørjum øðrum, og tí eru tey viðgjørd sum eitt øki, tá tað viðvíkur kloakk og vegum.
Økini 1, 2 og 3 kunnu viðgerast undir einum, tá tey liggja upp at hvørjum øðrum. Økini liggja í Hoyvíkshaganum og liggja norðan fyri verandi býlingar og ringveg.

**Viðmerkingar frá teknisku deild:**
Tekniska deild hevði hesar viðmerkingarnar til hesi økini:

Talan er um øki, ið skulu gerast heilt av nýggjum, hvat viðvíkur kloakk og vegagerð.

Ongin kloakk er í økinum sum kann brúkast, og tí er neyðugt at gera eina nýggja kloakkleiðing, sum skal leggjast oman til Hvítanes.

Viðvíkjandi vegíbinding, er økið væl egnað og lætt at fara undir, tá vegurin Klingran gongur tætt framvið og kemur Ytri Ringvegurin eisini at liggja í økinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til
- at økið verður boðið út sum ein arkitektakapping til skipan av økinum.
- At játtaðar verða 600.000 kr. av konto L62032 til kappingarvinnarar og til uttanhýsis ráðgeving í sambandi við kappingina.
  At málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. september 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at boðið verður út millum føroyskar fyritøkur.

**Fíggjarnevndin 18. september 2019:** Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 23. oktober 2019:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Í viðgerðini av fyribils kappingarskránni til hugskotskappingina, er umsitingin gjørd varug við, at neyðugt verður við størri játtan enn upprunaliga mett fyri at seta kappingina í verk.

Dómsnevndin dømir um innkomnu uppskotini, og um talan verður um tvær ella tríggjar virðislønir, umframt møguligt keyp av góðum hugskotum. Harafturat skal dómsnevndin lønast og hava ferðaútreiðslur goldnar.

Mett er, at neyðugt verður at játta 1,0 mió. til endamálið.

Tekniski stjóri og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til:

1. at játta kr. 1.000.000,00 av konto 6275, L00001, Løgukarmur fyri árið, til nýggja verkætlan “Stóratjørn” undir konto 6275
2. at heimila umsitingini at bjóða ætlanina út í kapping
3. at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 30. oktober 2019:** Útsett.

**Býráðsfundur 30. oktober 2019:** Tikið av skrá**.**

**Nýtt tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til:

1. at ætlanin verður boðin út til almenna undangóðkenning, soleiðis at kommunan kann velja nakrar ráðgevar til at arbeiða víðari við at gera uppskot til skipan av økinum.
2. at játta kr. 1.000.000,00 til nýggja verkætlan “Stóratjørn” undir konto 6275.
3. at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 06. november 2019:** Samtykt at ætlanin verður boðin út til almenna undangóðkenning, soleiðis at kommunan kann velja nakrar ráðgevar til at arbeiða víðari við at gera uppskot til skipan av økinum, og at heita á figgjarnevndina at finna fígging.

**Fíggjarnevndin 13. november 2019:** Samtykt at taka undir við Byggi- og býarskipanarnevndini við teirri broyting, at játtanin á kr. 1.000.000 skal játtast av konto 20910 «aðrar útreiðslur» og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. november 2019:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 12. desember 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Hugskotskappingin “skipan av Stórutjørn” er liðug.
Innkomnu uppskotini og dómsnevndarúrskurður verður kunngjørdur á fundinum.
Úrslitið verður almannakunngjørt 18.05.2020.

Skjal nr. 18/03468-39, dómsnevndarúrskurður, verður lagt í málið aftaná almennakunngerðingina.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla byggi- og býarskipanarnevndini til at staðfesta dómsnevndarúrskurðin, og at arbeiða víðari við skipan av Stórutjørn í tráð við ætlanina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 18. mai 2020:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Helena Dam á Neystabø, tekur ikki undir við tilmælinum vísandi til at tilfarið kom á fundinum og at vit ikki hava fingið høvi til at nærlisið tilfarið, áðrenn endalig støða skal takast.

**Býráðsfundur 28. mai 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**

Vitandi um, at kommunan hevur tørv á størri byggilendi, er tað avgerandi fyri býarmenningina, at planleggingin av kommununi er framtíðartryggjað og í tráð við tær ætlanir og avbjóðingar, sum kommunan stendur upp ímóti.

Í vár varð arkitektakapping skipað um skipan av Stórutjørn, sum sambært Kommunuætlanini er fremst raðfest til býarvakstrarøki í kommununi. Tvær fyritøkur vunnu rættin at verða knýtt at prosjekteringsarbeiðinum sum ráðgevi at gera forprosjekt til fremstu raðfestingina av ætlanini.

Fyri at kunna fara inn á økið við teimum framtíðarætlanum, sum fyriliggja, er tað tí av stórum týdningi at endaliga skipanin av Stórutjørn verður raðfest.

Umsitingin ynskir at fara í samstarv við vinnandi fyritøkurnar fyri at nágreina skipanina av økinum, og gera raðfestingar, soleiðis at farast kann undir partar av útstykkingini.

Stóratjørn er ogn hjá landinum, og fyri at kommunan kann fara undir at vaksa um býin verður neyðugt at fara í samráðingar við landið og Búnaðarstovuna um keypið av lendinum.
Kappingin fevndi um økið matr. nr. 135ed og matr. nr. 1æf. Víddin á matriklunum er:

- matr. 135ed er 108175 $m^2$ til støddar (kortvídd)
- matr. 1æf er 117.184 $m^2$ til støddar (kortvídd)

Talan er sostatt um eitt stórt øki, sum ætlanin er at yvirtaka í stigum, soleiðis at Stóratjørn verkætlanin kann gerast veruleiki í stigum.

Somuleiðis er at upplýsa, at arbeitt verður við avtaluni millum Landsverk og kommununa um innkomuvegin, sum endaliga kemur at hava stóra ávirkan á virkið í Stórutjørn.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:

- at játta 2 mió. kr. av konto 6475, Byggibúning bústaðir, L64011, Útstykking Stórabrekka, á konto 6275, Fríðkan av kommununi (íløgur), L62039, Stóratjørn til framhaldandi skipan av økinum.
- at heimila umsitingini at fara undir samráðingar við landið og Búnaðarstovuna um keyp av lendinum í stigum.
- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. februar 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2021:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið sum eykajáttan, ið skal viðgerast tvær ferðir.

**Býráðsfundur 25. februar 2021:** Fyrst varð atkvøtt um broytingaruppskot frá Elsu Berg um at broyta játtan 2 mió. kr. til ikki at taka av konto 6475 men av tøkum peningi.

Broytingaruppskotið fall við fimm atkvøðum fyri, átta ímót og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Jákup Dam, Gunvør Balle, Annika Olsen og Ruth Vang.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam og Birgir Nielsen.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við átta atkvøðum fyri, ongari ímóti og fimm blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam og Birgir Nielsen.

Blankt atkvøddu: Elsa Berg, Jákup Dam, Gunvør Balle, Annika Olsen og Ruth Vang.

Uppskotið beint víðari til aðru viðgerð.

**Býráðsfundur 25. mars 2021:** Samtykt við aðru viðgerð við átta atkvøðum fyri, tveimum ímóti og trimum blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam og Birgir Nielsen.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen og Gunvør Balle.

Blankt atkvøddu: Elsa Berg, Jákup Dam og Ruth Vang.

**Ískoyti:**
Umsitingin hjá Tórshavnar kommunu hevur seinastu tíðina samskift við teir báðar vinnararnar av kappingini um ráðgevarasáttmála í.s.v. gerð av heildarætlan fyri Stórutjørn, sí viðhefta uppskot til ráðgevarasáttmála *Stóratjørn__Ráðgevarasátmáli_FYRIBILS_2021.12.07*. Smb. sáttmálanum skulu ráðgevarnir gera eina yvirskipaða heildarætlan fyri økið, ið skal lýsa fortreytirnar fyri bygging, eitt uppbýti av økjum sum tilsamans skapar ein fjøltáttaðan býarpart. Ætlanin skal vísa eina skipan ella staðseting av vegaføring, parkering, bussleið, bústaðar-, stovns-, vinnu- og ítróttarbýlingum.

Harumframt eru frágreiðingar viðv. hugsjón og virðum, fortreytum, burðardygd, økisbýti, náttúru, tilhaldi, býlingum, vegakervi, gøtukervi, høvuðsleiðingum, endurnýtslu og byggibúning.

Sambært tíðarætlanini tekur arbeiðið at gera heildarætlanina tríggjar mánaðir og ráðgevingin kostar 2.000.000,- kr. u.mvg.

Á býráðsfundinum 25. mars 2021 varð samtykt at játta 2.000.000,- kr. til framhaldandi skipanina av økinum. Av hesum eru 1.970.000,- kr. eftir. Soleiðis íresta 530.000,- kr. til ráðgevarnar, umframt 100.000,- kr. til aðrar útreiðslur í smb. við gerð av heildarætlanini.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:
- At taka undir við uppskotinum til ráðgevarasáttmála í.s.v. gerð av heildarætlan fyri Stórutjørn.
- At játta 630.000,- kr. av konto 6275, LK62999, Fríðkan av býnum (løgukarmur fyri árið 2022), á konto 6275, Fríðkan av býnum, L62039, Stóratjørn, til samsýning til ráðgevarnar.
- At beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. januar 2022:** Samtykt at játta kr 330.000 av kt. 6275, LK62999, Fríðkan av býnum, á konto 6275, Fríðkan av býnum, L62039, Stóratjørn. Nevndin ynskir, at hædd verður tikin til veðurviðuskiftini og handilsviðurskiftini í tilgongdini, umframt at nevndin ynskir at verða kunnað leypandi.

**Fíggjarnevndin 19. januar 2022:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. januar 2022:** Atkvøtt varð um tilmælið frá fíggjarnevndini við tí broytingaruppskoti frá Elsu Berg, at náttúruviðurskifti verður lagt afturat orðingini hjá Byggi- og býarskipanarnevndini, ið varð einmælt samtykt**.**

**Ískoyti:**
25. mars 2021 samtykti býráðið at heimila umsitingini at fara í samráðingar við Búnaðarstovuna um keyp av lendinum til menning av Stórutjørn-verkætlanini.

Seinasta árið hevur verið arbeitt við innkomuvegnum, og er arbeiðið við vegnum nú komið so væl áleiðis, at arbeiðsvegurin eftir ætlan verður boðin út fyrsta dagin.

Í samb. við at menna økið, verður mett, at tað er av stórum týdningi, at lendið, sum liggur eystan fyri innkomuvegin, verður lagt afturat Stjórutjørn verkætlanini, soleiðis at alt økið kann síggjast sum ein heild í samb. við skipan av økinum.

Stóratjørn og lendið norð til innkomuvegin er ogn hjá landinum, og fyri at kommunan kann fara undir at vaksa um býin, verður neyðugt at fara í samráðingar við festaran og Búnaðarstovuna um keypið av lendinum. Sigast skal, at bæði festarin og Búnaðarstovan er kunnaði um ætlanirnar.

Talan er sostatt um eitt stórt øki, sum ætlanin er at menna til framtíðar bý. Heilt ítøkiliga er støddin um 960.000 fermetrar, og av tí at lendið er so stórt, og býarmenningin ikki kemur at verða framd í einum, so er ætlanin at gera eina avtalu við Búnaðarstovuna um at yvirtaka lendið í stigum, soleiðis at Stóratjørn verkætlanin og ein møgulig vinnuútstykking kann gerast veruleiki, uttan at tørvur er á at ogna sær alt økið í einum.

Sí skjal, "Arealnýtsla", sum sýnir økið, sum ætlanin er at gera eina avtalu við landið, Búnaðarstovuna og festaran um.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjórin, leiðarin á Stjórnardeildini, býarverkfrøðingurin og býararkitekturin mæla til:

- at heimila umsitingini at fara undir samráðingar og gera avtalu við landið, Búnaðarstovuna og festaran um keyp av lendinum í stigum.
- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina og teknisku nevnd.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. mars 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 07. mars 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Samlaða lendisvíddin, ið skal nýtast til innkomuvegin, vinnuútstykking og framtíðar sethúsa- og aðrar útstykkingar í Hoyvíkshaganum er umleið 1 mió. fermetrar. Talan er um partar av matr. nr. 135ed, 1æf, 139a og 135a allir í Hoyvík. Partur av hesum lendi liggur í Hoyvíkshaganum norðara parti (matr. nr. 139a og matr. nr. 1æf), og situr festari við hesum festinum, meðan partur av lendinum er partur av Hoyvíkshaganum sunnara parti (matr. nr. 139ed og 135a), sum eingin festari situr við, men sum festarin í Hoyvíkshaganum norðara parti brúkar sum bit v.m.
Til innkomuvegin og framtíðar vinnuútstykking er neyðugt at ogna sær uml. 341.000 fermetrar burtur av matr. nr. 135ed, 1æf og 139a. Sí kortskjal "*Keyp av lendi Hoyvíkshagin_Norðari partur*". Samstundis skal avtala gerast við Búnaðarstovuna og festaran, sum tryggjar Hoyvíksgarðinum nøktandi viðurskifti og víðkanarmøguleikar í framtíðini, og hetta ber millum annað í sær, at byggisamtyktin skal endurskoðast og broytast, so eingin býarvøkstur fer fram uttanfyri komandi innkomuvegin. Innkomuvegurin verður sostatt mark millum býin og landbúnaðarvirksemið í Hoyvíkshaganum. Miðjað verður ímóti at gera avtalu við festaran um at leggja avlopstilfar inn á økið, ið festarin situr við, so hetta kann bøta um møguleikarnar fyri landbúnaðarviksemi á festinum.

Kostnaðurin fyri lendi í Hoyvíkshaganum er 89 kr./m², og afturat hesum skal rindast fyri avloysing av biti (70 oyru/m²), frábýtingarútreiðslur, tinglýsingarkostnaður og sakargjald til Búnaðarstovuna. Saman við

útreiðslunum til skipan og projektering av vinnuútstykkingini í økinum og atknýttum vegum, er samlaði fíggjartørvurin mettur til umleið 34 mió. kr.

Viðv. útstykkingum burtur av matr. nr. 139ed og matr. nr. 1æf (írestandi partinum av hesum matr.) er ætlanin at keypa lendi frá Búnaðarstovuni í stigum og rinda so hvørt, sum tørvur verður á lendi at útstykkja. Ilt er at siga í løtuni, hvussu stórari vídd, tørvur verður á, tí økið er ikki endaliga skipað enn. Ætlanin er tískil í fyrsta umfari at fáa heimild til at gera avtalu við Búnaðarstovuna um at keypa lendi burtur av matr. nr. 1æf og allan matr. nr. 139ed til framtíðar býarmenning, og at rindað verður fyri lendið so hvørt, sum tørvur er á tí í mun til býarvøksturin.

**Tilmæli**:
Kommunustjórin, tekniski stjóri, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til
- at játta kr. 34.023.170,00 til keyp av lendi og aðrar útreiðslur í hesum sambandi til innkomuvegin og framtíðar útstykkingar á matr. nr. 135ed, 1æf og 139a, Hoyvík. Peningurin verður játtaður av játtanini til innkomuvegin við 7.880.792,50 kr. av konto 8175 Vegir (løgur), L L81037, Innkomuvegur, og 26.142.377,50 kr. av konto 6975, Byggibúning ídnaðarøki, ið verður afturgoldin Tórshavnar kommunu í sambandi við sølu av vinnustykkjum í útstykkingini.
- at heimila umsitingini at gera avtalu við Búnaðarstovuna um at keypa lendi í stigum til framtíðar útstykkingar burtur av matr. nr. 1æf og 139ed. So hvørt, sum tørvur er á fígging, verður málið lagt fyri aftur avvarðandi nevndir til støðutakan.
- at heimila umsitingini at samráðast við og gera avtalu við festaran um avlopstilfar og um at framtíðartryggja møguleikarnar at reka landbúnaðarvirksemi á festinum. Avtalan verður at liggja fyri aftur og góðkenna av avvarðandi nevndum.
- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina sum eykajáttan, ið krevur tvær viðgerðir.

**Fíggjarnevndin 16. mars 2022:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:** Í mun til ískoytið til fíggjarnevndarfundin 16. mars 2022 eru smærri tillagingar gjørdar í lendisnýtsluni v.m. í sambandi við, at málið verður lagt fyri aftur fíggjarnevnd og býráð til støðutakan.

Samlaða lendisvíddin, ið skal nýtast til innkomuvegin, vinnuútstykking og framtíðar sethúsa- og aðrar útstykkingar í Hoyvíkshaganum er umleið 1 mió. fermetrar. Talan er um partar av matr. nr. 135ed, 1æf, 139a og 135a allir í Hoyvík. Partur av hesum lendi liggur í Hoyvíkshaganum norðara parti (matr. nr. 139a og matr. nr. 1æf), og situr festari við hesum festinum, meðan partur av lendinum er partur av Hoyvíkshaganum sunnara parti (matr. nr. 139ed og 135a), sum eingin festari situr við, men sum festarin í Hoyvíkshaganum norðara parti brúkar sum bit v.m.

Til innkomuvegin, íbindingarvegir og framtíðar vinnuútstykking skal kommunan ogna sær uml. 319.000 fermetrar burtur av matr. nr. 135ed, 1æf, 139a og 135a, Hoyvík. Sí kortskjal "*Keyp av lendi Hoyvíkshagin_Norðari partur - greinað*".

Samstundis skal avtala gerast við Búnaðarstovuna og festaran, sum tryggjar festaranum á Vatnaskørðum nøktandi viðurskifti og víðkanarmøguleikar í framtíðini, og hetta ber millum annað í sær, at byggisamtyktin skal endurskoðast og broytast, so eingin býarvøkstur fer fram uttanfyri komandi innkomuvegin. Innkomuvegurin verður sostatt mark millum býin og landbúnaðarvirksemið í Hoyvíkshaganum. Miðjað verður ímóti at gera avtalu við festaran um at leggja avlopstilfar inn á økið, ið festarin situr við, so hetta kann bøta um møguleikarnar fyri landbúnaðarviksemi á festinum.

Kostnaðurin fyri lendi í Hoyvíkshaganum er 89 kr./m², og afturat hesum skal rindast fyri avloysing av biti (70 oyru/m²), frábýtingarútreiðslur, tinglýsingarkostnaður og sakargjald til Búnaðarstovuna. Saman við útreiðslunum til skipan og projektering av vinnuútstykkingini í økinum og atknýttum vegum, er samlaði fíggjartørvurin mettur til umleið 32 mió. kr.

Viðv. útstykkingum burtur av matr. nr. 139ed og matr. nr. 1æf (írestandi partinum av hesum matr.) er ætlanin at keypa lendi frá Búnaðarstovuni í stigum og rinda so hvørt, sum tørvur verður á lendi at útstykkja. Ilt er at siga í løtuni, hvussu stórari vídd, tørvur verður á, tí økið er ikki endaliga skipað enn. Ætlanin er tískil í fyrsta umfari at fáa heimild til at gera avtalu við Búnaðarstovuna um at keypa lendi burtur av matr. nr. 1æf og allan matr. nr. 139ed til framtíðar býarmenning, og at rindað verður fyri lendið so hvørt, sum tørvur er á tí í mun til býarvøksturin.

**Tilmæli**:
Kommunustjórin, tekniski stjóri, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til:

- at játta kr. 31.987.030,00 til keyp av lendi og aðrar útreiðslur í hesum sambandi til innkomuvegin, íbindingarvegir og framtíðar útstykkingar á matr. nr. 135ed, 1æf, 139a, og 135a Hoyvík.

Mælt verður til at játta peningin soleiðis:

- Kr. 4.600.000,00 av konto 8175 Vegir (løgur), LK81037, Innkomuvegur

- Kr. 1.297.406,00 av konto 8175 Vegir (løgur), L81037, Innkomuvegur

- Kr. 26.089.624,00 kr. av konto 6975, Byggibúning ídnaðarøki, ið verður afturgoldin Tórshavnar kommunu í sambandi við sølu av vinnustykkjum í útstykkingini.

Harumframt mælt til:

- at heimila umsitingini at gera avtalu við Búnaðarstovuna um at keypa lendi í stigum til framtíðar útstykkingar burtur av matr. nr. 1æf og 139ed. So hvørt, sum tørvur er á fígging, verður málið lagt fyri aftur avvarðandi nevndir til støðutakan.
- at heimila umsitingini at samráðast við og gera avtalu við festaran um avlopstilfar og um at framtíðartryggja møguleikarnar at reka landbúnaðarvirksemi á festinum. Avtalan verður at liggja fyri aftur og góðkenna av avvarðandi nevndum.
- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina. Viðvíkjandi játtanini á kr. 26.089.624,00 er talan um eykajáttan, ið krevur tvær viðgerðir í býráðnum.

**Fíggjarnevndin 23. mars 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. mars 2022:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð.

Málið beint víðari til aðru viðgerð.

| | **Býráðsfundur**<br>24. mars 2022 | Blað nr.: 348<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

# 73/22 Ársroknskapur og granskoðanarprotokoll fyri 2021 hjá Westward Ho

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Nevndin fyri Westward Ho | 28.02.2022 | 1/22 | 22/00751-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 16.03.2022 | 84/22 | 22/00751-1 |
| 3 Býráðsfundur | 24.03.2022 | 73/22 | 22/00751-1 |

**Upprunin til málið**

**Lýsing av málinum**
Roknskapurin fyri 2021 verður latin Tórshavnar kommunu til góðkenningar sambært § 6 í reglugerð fyri Westward Ho.

Grannskoðaður roknskapur fyri Westward Ho fyri 2021 verður framlagdur.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/léttar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**

**Nevndin fyri Westward Ho 28. februar 2022:** Roknskapurin góðkendur og undirskrivaður.

**Fíggjarnevndin 16. mars 2022:** Roknskapurin framlagdur og góðkendur og beindur í býráðið til góðkenningar.

**Býráðsfundur 24. mars 2022:** Einmælt samtykt.

| **Býráðsfundur**<br>24. mars 2022 | Blað nr.: 350 |
|---|---|
| | Formansins merki: |

# 74/22 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2022

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 16.02.2022 | 57/22 | 22/00009-1 |
| 2 Býráðsfundur | 24.02.2022 | 51/22 | 22/00009-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 16.03.2022 | 87/22 | 22/00009-1 |
| 4 Býráðsfundur | 24.03.2022 | 74/22 | 22/00009-1 |

**Upprunin til málið**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. §10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna.

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Roknskapurin fyri januar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 16. februar 2022:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 24. februar 2022:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri februar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 16. mars 2022:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 24. mars 2022:** Framlagt og góðkent.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>24. mars 2022 | Blað nr.: 352 |
| | Formansins merki: |

# 75/22 Heildarætlan fyri dagstovnaøkið

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 24.03.2022 | 75/22 | 22/01221-1 |

**Upprunin til málið**
Tjóðveldi ynskir at fáa málið um trot á starvsfólkum á dagstovnaøkinum á skrá á næsta býráðsfundi 24.mars.

Tjóðveldi ynskir at býráðið samtykkir at gerast skal ein heildarætlan við ítøkiligum átøkum fyri at bøta um starvsfólkatroti á dagstovnaøkinum.

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**

**Býráðsfundur 24. mars 2022:** Fyrst varð atkvøtt um, hvørt málið skal fara til atkvøðugreiðslu, og fall málið við seks atkvøðum fyri, sjey ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Jákup Dam, Gunvør Balle, Annika Olsen, Birgir Nielsen og Ruth Vang.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk og Bjørg Dam.

## 76/22 Argja kirkja : Ætlan um nýggjan kirkjubygning á Argjum - matr. nr. 56a og 115, Argir - broyting av byggisamtyktini (2006-0769)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 27.01.2022 | 18/22 | 22/00358-80 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 16.03.2022 | 75/22 | 22/00358-80 |
| 3 Fíggjarnevndin | | | 22/00358-80 |
| 4 Býráðsfundur | 24.03.2022 | 76/22 | 22/00358-80 |

**Upprunin til málið**
**2006-0769/49 SG**
**Ætlan um nýggjan kirkjubygning á Argjum.**

**Lýsing av málinum - samandráttur.**
Kirkjuráðið á Argjum er komið við fyrispurningi um møguleikarnar at byggja uppí verandi kirkju ella at fáa annað stað at byggja nýggja kirkju á. Eitt uppskot er, at byggja kirkju á sokallaðu "Cepa trøðna".

Skjøl:
Umsókn j. nr. 2006-0769/1.
Tekningar j. nr. 2006-0769/2.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, byggi- og býarskipanarnevndin heitir á byggi- og býarskipanardeildina um at ávísa egnaði støð til nýggja kirkju á Argjum, herundir at meta um hvørt útbygging av verandi kirkju er ein møgulig loysn.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. august 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.
-Í sambandi við fyrispurning frá kirkjuráðnum á Argjum um framtíðar møguleikar fyri kirkjuna á Argjum, hevur býarskipanardeildin gjørt eitt uppskot til staðseting av nýggjari kirkju á Argjum.

Økið, ið liggur ímillum Støðlagøtu og Sandá omanfyri Spinnaríið, er uml. 4.000 m2 til støddar og er partar av matr nr. 115 og 56a. Sí hjálagda kort dagf. 08.01.08.

Sambært almennu byggisamtyktini liggur økið í umráðispartinum D1, ið er lagdur til *almenning, náttúrufriðingar- og mentunarlig endamál og tílíkt*.

Mentunarlig endamál kann t.d. vera ein kirkja. Vesturkirkjan liggur í einum D1 øki.

Av tí at økið liggur oman ímóti Sandá, er neyðugt at søkja friðingarmyndugleikarnar um undantaksloyvi frá Náttúruverndarlógini §2, sum sigur, at tað ikki eigur at verða bygt nærri áum, ið eru meira enn 4 m breiðar í botninum, uttan loyvi frá friðingarmyndug-leikunum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, nevndin góðkennir økið til nýggja kirkju á Argjum sambært kortskjali dagf. 08.01.08. og at býarskipanardeildin arbeiðir víðari við málinum. Harumframt skal Friðingarnevndin hoyrast.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 14. januar 2008:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 12. mars 2008:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti 21. august 2008:**
Loyvi er nú givið av friðingarmyndugleikunum til at kirkjan kann leggjast á øki millum Støðlagøtu og Sandá omanfyri Spinnaríið soleiðis sum skotið upp av býarskipanardeildini og góðkent av Byggi- og býarskipanarnevndini tann 14. januar 2008.

Neyðugt er nú at taka støðu til, hvønn prís lendi skal seljast fyri.

Upplýsast kann, at Hoyvíkar kirkja og Samkoman Lívdin hava keypt grundstykkir frá Tórshavnar kommunu fyri kr. 156,00 fermeturin.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til at kommunan í sambandi við eina møguliga sølu av lendinum, fær ávirkan á endaliga útsjónd og staðseting av kirkjuni.

**Fíggjarnevndin 2. september 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at selja kirkjuráðnum á Argjum áleið 4000 fermetrar av økinum millum Støðlagøtu og Sandá oman fyri Spinnaríið, sambært forskjalið 2006-0769, dagfest 1. august 2008, fyri kr. 156,- fermeturin.

**Býráðið 11. september 2008:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Ì november 2008 var umsókn send Umhvørvisstovuni um at frábýta 4.000 m2 av økinum millum Støðlagøtu og Sandá til at byggja kirkju á.

Við tí grundgeving, at økið liggur í D1-øki *(almenning, náttúrufriðingar- og mentunarlig endamál og tilíkt)*, ið eftir teirra meting skal liggja sum grønt øki, noktaði Umhvørvisstovan at frábýta grundøki til kirkju her, og mælti til at kommunan ger eina serstaka byggisamtykt fyri økið.

Hendan avgerðin hjá Umhvørvisstovuni bleiv um ársskiftið 2008/2009 kærd til Kærunevndina í lendismálum.

Málið hevur síðani verið viðgjørt í Kærunevndini í lendismálum til seinast í oktober í 2009 tá skriv kom frá Føroya kærustovni um at nevndin hevði staðfest avgerðina hjá Umhvørvisstovuni.

Á fundi 18. februar 2010, í fundarhølinum hjá borgarstjóranum, við luttøku av m.ø. borgarstjóranum, kommunustjóranum, tekniska stjóranum og trivnaðar stjóranum, var avgjørt at leggja mál fyri byggi- og býarskipanarnevndina um broyting av ásetingunum fyri D1-øki í kap. IV, §22 í almennu byggisamtyktini soleiðis at byggjast kann á D1-øki sambært serstakari byggisamtykt og at gera eina serstaka byggisamtykt fyri øki, sum heimilar bygging av kirkju á økinum.

Í galdandi almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu sær kap. IV, §22 soleiðis út:

**“§ 22. Ásetingar fyri umráðispartar D í 3. Grundumráði**

1. Umráðispartarnir D1 verða í síni heild lagdir til almenning, náttúrufriðingar-og mentunarlig endamál og tilíkt. Økið fram við Hoydalsá kann einans verða skipað og bygt sambært serstaka byggisamtykt fyri økið.

2. Umráðisparturin D2 verður kannaður ítrótti og øðrum, sum eftir eini heildarætlan fyri alt økið ella ein part av økinum kann virka saman við ítróttinum.

3. Umráðispartarnir D3 verða kannaðir stórum almennum stovnum fyri umsiting, skúlaskap, heilsurøkt og tilíkt.

4. Byggistigið og nettonýtslustigið mugu, innan fyri eitt náttúrliga avmarkað øki, ikki fara upp um ávikavist 0,25 og 0,30.

5. Útstykking innan fyri ein umráðispart verður einans loyvd, um hon hóskar til byggiskipan, sum byggivaldið hevur góðkent fyri ein náttúrliga avmarkaðan lut av umráðispartinum.”

Umsitingin mælir til, at soljóðandi nýtt stk. 2 verður sett inn:

2. Bygging í D1 kann bert loyvast sambært serstakari byggisamtykt um tað er í samsvari við stk. 1.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at ásetingarnar í kap. IV, §22 í almennu byggisamtyktini verða broyttar soleiðis at nýtt stk. 2 verður sett inn og kap. IV, §22 kemur at síggja soleiðis út.

**§ 22. Ásetingar fyri umráðispartar D í 3. Grundumráði**

1. Umráðispartarnir D1 verða í síni heild lagdir til almenning, náttúrufriðingar-og mentunarlig endamál og tilíkt. Økið fram við Hoydalsá kann einans verða skipað og bygt sambært serstaka byggisamtykt fyri økið.

2. Bygging í D1 kann bert loyvast sambært serstakari byggisamtykt um tað er í samsvari við stk. 1.

3. Umráðisparturin D2 verður kannaður ítrótti og øðrum, sum eftir eini heildarætlan fyri alt økið ella ein part av økinum kann virka saman við ítróttinum.

4. Umráðispartarnir D3 verða kannaðir stórum almennum stovnum fyri umsiting, skúlaskap, heilsurøkt og tilíkt.

5. Byggistigið og nettonýtslustigið mugu, innan fyri eitt náttúrliga avmarkað øki, ikki fara upp um ávikavist 0,25 og 0,30.

6. Útstykking innan fyri ein umráðispart verður einans loyvd, um hon hóskar til byggiskipan, sum byggivaldið hevur góðkent fyri ein náttúrliga avmarkaðan lut av umráðispartinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 1. mars 2010**: Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 18. mars 2010:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Elsa Berg biður um at fáa málið á skrá til komandi býráðsfund.

**Býráðsfundur 27. januar 2022:** Einmælt samtykt at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina**.**

**Byggi- og býarskipanarnevndin 16. mars 2022:** Kirkjuráðið og umboð fyri mótmælisbólkin kunnaðu nevndina við at leggja fram síni sjónarmið um staðsetingina av Argja Kirkju.

**Ískoyti:**
Elsa Berg biður um at fáa málið á skrá til komandi býráðsfund.

**Býráðsfundur 24. mars 2022:** Atkvøtt varð um uppskot frá borgarstjóranum at beina málið aftur í byggi- og býarskipanarnevndina, og varð uppskotið einmælt samtykt.

Málið beint í byggi- og býarskipanarnevndina.

# 77/22 Nevndarval til nevndina í P/F Visit Faroe Islands

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 25.03.2021 | 86/21 | 21/01228-1 |
| 2 Býráðsfundur | 24.03.2022 | 77/22 | 21/01228-1 |

**Upprunin til málið**

**Lýsing av málinum**
Lýsing av málinum – samandráttur
Vísandi til § 3 í løgtingslóg nr. 62 frá 15. mai 2014 um P/F Visit Faroe Islands, sum broytt við løgtingslóg nr. 168 frá 20. desember 2017, verður nevndin í P/F Visit Faroe Islands mannað við 7 nevndarlimum, harav Tórshavnar Kommuna tilnevnir 1 umboð.

Lutfalsval.

§ 3. Nevndin skal vera mannað við 7 limum. Limirnir skulu umboða Ferðavinnufelagið, ferðaflutningsfeløg, kommunurnar og mentanina/ítróttin.
Stk. 2. Nevndin skal vera sett saman av lyklapersónum innan ymsu økini, og nevndin skal samlað hava teir fakligu førleikar, sum skulu til fyri at røkka endamálinum í § 2.
Stk. 3. Aðalfundurin velur nevndarformannin. Aðalfundurin velur hinar nevndarlimirnar soleiðis:
1) Eitt umboð fyri Ferðavinnufelagið, umboðandi ferðavinnuna í Føroyum, herundir gistingarhús, matstovuvinnu, ferðasmiðir v.m.
2) Tvey umboð fyri ferðaflutningsfyritøkur
3) Eitt umboð frá Tórshavnar Kommunu
4) Eitt umboð fyri kommunurnar uttan fyri Tórshavnar kommunu
5) Eitt umboð fyri mentanina ella ítróttin
6) Eitt umboð fyri landsstýrismannin
Stk. 4. Áðrenn nevndin setur stjóra, skal landsstýrismaðurin verða kunnaður.

Stk. 5. Landsstýrismaðurin góðkennir starvsskipan fyri nevnd og stjórn felagsins, eins og landsstýrismaðurin skal góðkenna samsýningina til nevnd og lønina til stjórn felagsins.

Í viðmerkingunum til § 3 í lógini er í lógaruppskotinum ásett, at *“nevndin skal vera eitt avgerðarforum, sum stingur út í kortið fyri føroyska ferðavinnu. Tað er týdningarmikið, at tað eru professionell lyklaumboð (t.d. stjórar) innan ymsu økini, sum vegna felag ella myndugleika í størst møguligan mun hava avgerðarheimildir.”*
Víðari verður tað nevnt í serligu viðmerkingunum, at *“Tórshavnar Kommuna tilnevnir eitt umboð fyri kommununa, sum umboðar leiðslu ella annan lyklapersón í kommununi, og sum hevur kunnleika til ferðavinnuna í høvuðsstaðnum.”*

**Lógir, ásetingar o.a.**
Løgtingslóg nr. 62 frá 15. mai 2014 um P/F Visit Faroe Islands sum broytt við løgtingslóg nr. 168 frá 20. desember 2017

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☐

**Tilmæli:**
Fyrisitingarstjórin mælir býráðnum til at velja 1 lim í nevndina í P/F Visit Faroe Islands.

**Býráðsfundur 25. mars 2021:** Atkvøtt varð um uppskot frá Heðini Mortensen at velja Bjørgfríð Ludvig í nevndina í P/F Visit Faroe Islands, ið varð einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Tórshavnar kommuna er biðin um at velja eitt umboð í nevndina í P/F Visit Faroe Islands.

**Tilmæli:**
Fyrisitingarstjórin mælir býráðnum til at velja eitt umboð í nevndina í P/F Visit Faroe Islands.

**Býráðsfundur 24. mars 2022:** Atkvøtt varð um uppskot frá borgarstjóranum at velja Bjørgfríð Ludvig í nevndina í P/F Visit Faroe Islands, ið varð einmælt samtykt.

**FUNDURIN LOKIN KL. 20:00**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Heðin Mortensen | Annfinn Brekkstein | Kári Johansen |
| Kristianna Winther Poulsen | Súna Mørk | Bjørg Dam |
| Elsa Berg | Jákup Dam | Gunvør Balle |
| Annika Olsen | Birgir Nielsen | Ruth Vang |
| | Bergur Robert Dam Jensen | |